LØGMANSSKRIVSTOVAN

Prime Minister´s Office

# Frágreiðing løgmans á ólavsøku 2025

LØGMANSSKRIVSTOVAN

Prime Minister´s Office

# Ólavsøkurøða løgmans 2025

Frú forkvinna,

*Búgvin til hernað á vígvølli standa*
*fylkini reystu til hildarfund.*
*Enn valdar kvirran: Caissu anda*
*mana teir fram á feigdarstund.*
*Hugsa væl, far hóvliga:*
*Aldrin kann ein gjørdur leikur broytast*

Orðini eigur telvarin og rithøvundurin Valdemar Poulsen, sum í 1948 yrkti eina kvøðu til Havnar Telvingarfelag.

Ofta verður politikkur samanborin við talv. Sjálvur eigi eg bæði son og verfaðir, sum eru ídnir telvarar – og eg haldi, at samanberingin er góð.

Bæði í politikki og í talvi snýr tað seg um at gera tað, sum er best fyri títt fólk.

Bæði í politikki og í talvi eru mangir leikir.

Og bæði í politikki og í talvi snýr tað seg um støðuna í løtuni – samstundis sum tú mást vera framsíggin um, hvussu tínir leikir ávirka møguleikarnar longur frammi.

Ofta nýta viðmerkjarar talvmyndina, tá ið taktiskar telvingar eru millum fólk og flokkar – ella millum samgongu og andstøðu. Vit politikarar royna eisini mangan at seta hvør annan skák mát – og eggja hinum til at leggja kongin.

Men lat meg gera púra greitt: Okkara harðasta talv er móti umheiminum. Ikki hvør øðrum. Vit mugu tí vera kappingarfør á øllum økjum. Sosialt. Mentanarliga. Útbúgvingarliga. Fíggjarliga. Og vinnuliga.

Á nøkrum økjum standa vit okkum sera væl. Á øðrum hava vit avbjóðingar og mugu finna sterkastu leikirnar.

***

LØGMANSSKRIVSTOVAN

Prime Minister´s Office

Frú forkvinna,

Í bókini um Helga Dam Ziska  greiðir hann frá tonkunum, sum mólu í klingur, meðan hann sat í avgerandi talvinum, tá ið hann gjørdist stórmeistari:

*Lít á tíni dømievni.*
*Sættast ikki við remis móti góðum mótstøðumanni, um støðan er góð.*
*Finn støðugt virknar og skapandi leikir.*
*Varðveit dissiplinina, men miss ikki vinnaraviljan.*
*Ver djarvur og reystur.*

Alt góðar áminningar, sum kunnu nýtast í politikki, eins væl og í talvi.

Vit mugu í felag finna virknar og skapandi leikir, vera djørv og reyst. Lata vit standa til, er vandi fyri, at umheimurin spakuliga tekur okkara fólk, leik fyri leik.

Og høvuðsorsøkin til, at útheimurin tekur okkara fólk, er útbúgving. Bæði tí úrvalið er størri, og eisini tí at lestrarumhvørvið dregur. Nógv ung flyta uttanlands at lesa ella læra – og helvtin kemur ikki aftur.

Tí er tað avgerandi, at vit hava góðar, fjølbroyttar útbúgvingar og stimbrandi karmar, skulu okkara ungu velja Føroyar.

Handaligu útbúgvingarnar eru framúr. Og í dygd er Setrið kappingarført. Støðið er høgt, sambandið við undirvísararnar er tætt – og so hevur tað nakað, sum onnur ikki hava: Tað tekur støði í føroyskum viðurskiftum.

Men ymist má kortini gerast betri.

Til dømis karmarnir. Tí ætla vit at byggja eitt kampus, so okkara lesandi kunnu savnast á einum stað. Har sambond verða knýtt, hugskot kunnu birtast, og eitt livandi lestrarumhvørvi kann spíra.

Vit eru í gongd við prosjekteringina, og arbeiðið byrjar komandi ár. Lonirnar á Frælsinum, sum verða partur av Setrinum, verða umvældar, og ein lon er liðug.

Ein annar leikur fyri at gerast kappingarfør snýr seg um lestrarstuðulin. Lestrarstuðulin í Føroyum er lægri enn í Danmark, men komandi summar hækka vit hann.

Og so er tað hugburðurin til at lesa í Føroyum.

Herfyri gjørdi Kringvarpið samrøðu við Fríðunn Bolstad Mortensen, ið lesur til lærara á Setrinum. Hon segði so beinrakið:

– *Tey tosa um stóru fólkafráflytingina, men samstundis spyrja tey okkum, nær vit fara.*

***

Men frú forkvinna, skal fólkið støðast í Føroyum, mugu vit hava tøkar bústaðir. Við ongum fólki tapa vit talvið.

Fyri at bøta um bústaðartrotið er málið, at vit í 2030 skulu hava 2.000 bústaðareindir afturat.

Øll mugu loysa avbjóðingina í felag – bæði tað almenna og tað privata. Vit hava givið Bústøðum heimild at læna 350 milliónir, og kommunurnar fáa eisini ein týðandi leiklut. Vit hava givið teimum heimild at stovna almannagagnlig bústaðafeløg saman við Bústøðum, at áseta bústaðarskyldu í nýggjum útstykkingum og at leggja gjøld á tóm hús.

Í heyst fara vit undir at gera skrivstovurnar á Eirargarði til á leið 50 bíligar leigubústaðir til ungfólk, sum lesa ella læra. Við tíðini kann Eirargarður gerast okkara Oyrarsund.

Og Bústaðir skulu arbeiða øðrvísi. Ikki fleiri dýrar íbúðir, men bíligar bústaðir til ung, ungar barnafamiljur, støk og eldri fólk, sum vilja flyta úr stóru sethúsunum.

Í talvi ber til at leypa í borg. Tá verða kongur og rókur fluttir í senn, so báðir koma í betri støðu.

Í fluttum týdningi skal tað sama vera galdandi á bústaðarøkinum. Eldri fólk skulu kunna flyta úr stórum húsum í íbúð, meðan barnafamiljur kunnu flyta í sethús. Soleiðis fáa bæði ættarliðini fyrimun av nýggju støðuni.

Tey, sum tó hava tað tyngst á bústaðarmarknaðinum, eru tey, sum einki eiga og mugu leiga. Hesi skulu fáa leigustuðul, ið verður knýttur at inntøkuni. Hetta fer at bøta um sosialu javnvágina á bústaðarmarknaðinum. Um gerandisdagin hjá teimum, sum hava tað truplast. Og um møguleikan at búseta seg í Føroyum. Landsstýrið arbeiðir við at finna fíggingina, og uppskotið verður latið tinginum í heyst.

Ein onnur avbjóðing er, at hús og íbúðir verða keypt við tí eina endamáli at leiga út til ferðafólk – eitt nú á airbnb. Komandi vár fara vit at leggja uppskot fyri tingið um at skipa karmarnar um stutttíðarútleigu, soleiðis at fólkið, her býr, fyrst og fremst fær tak yvir høvdið.

Eisini fólk við serligum tørvi hava rætt til egnan bústað. Í løtuni eru tvær byggiverkætlanir í gongd. Onnur er í Havn til 24 fólk við autismu; hin er í Vágum til 18 fólk við sálarligum og sosialum avbjóðingum. Eftir ætlan verða báðar lidnar í 2027.

Á Mýrini, í Kvíggjartúni og í Reynstúni eru fólk flutt inn og trívast sera væl. Í næstum fara vit at fyrireika bygging í Eysturkommunu, umframt at vit áhaldandi dagføra verandi bústovnar.

***

Frú forkvinna,

*»Ein finna tú ert í talvinum, har pengarnir fólkið flyta,«* syngur Kári P í yrking eftir Hanus Kamban. Eigur tú nógvar pengar, fylla teir lítið, men eigur tú lítið av pengum, fylla teir nógv. Og høga kostnaðarstøðið rakar okkara lágløntu meinast.

Vit mugu tí gera tað liviligari sum heild og tryggja eitt javnari samfelag.

Sum er, økist lønargjógvin millum há- og láglønt støðugt. Tað fer hon at gera, so leingi sum lønarhækkingarnar verða latnar í prosentum. Tann leisturin gevur jú okkum við góðari løn lutfalsliga fleiri krónur hvønn mánað.

Tí er útgangsstøðið hjá landsstýrinum at broyta samráðingarleistin til lønarsamráðingarnar í heyst. At vit í størri mun samráðast um krónur heldur enn um prosent.

Tað er eisini fyri at gera tað liviligari í Føroyum, at vit:

- hava lækkað skattin hjá lág- og miðalløntum.
- hava givið eitt lønarlyft.
- hava hækkað útgjaldið og fara at lækka inngjaldið í arbeiðsloysisskipanina.
- Tí arbeiða vit framvegis við at stytta arbeiðsvikuna.
- Og tí fara vit í heyst at leggja uppskot fyri tingið um at taka mvg'ið av til dømis grønmeti, blæum og øðrum útvaldum gerandisvørum. Hetta fer at gera mun – serliga hjá barnafamiljum.

Eisini broytingarnar í barsilslógini fara at muna hjá barnafamiljum.

Hámarkið fyri barsilspening er hækkað úr 25.000 upp í 30.000 krónur, og frameftir verður tað javnað árliga, so tað fylgir almennu lønargongdini.

Rættindini eru eisini styrkt hjá støkum foreldrum, sjálvstøðugum vinnurekandi – og hjá foreldrum, sum ættleiða, fáa ov tíðliga fødd børn ella tví- og fleirburar.

Fyri at fáa eitt bleytari skifti aftur til arbeiðslívið ætla vit, at foreldur skulu kunna drýggja barsilspeningin yvir eitt longri tíðarskeið.

Uppskotið verður lagt fyri tingið komandi vár.

Alt hetta fer at seta okkara barnafamiljur – og harvið okkum øll – í eina munandi betri støðu.

***

Frú forkvinna,

Tá ið tú telvar, er tað av stórum týdningi at byrja væl. Óteljandi talvbøkur eru skrivaðar um ymsar byrjanir, og hvussu tær hvør sær ávirka tínar møguleikar.

Hetta sama ger seg galdandi hjá okkum menniskjum. Koma vit væl frá byrjan við einum góðum, tryggum barndómi, økir tað um okkara møguleikar, sum vit vaksa til.

Júst hetta er endamálið við barnalógini, sum nú er komin væl áleiðis. Øll børn og ung í Føroyum eru tikin við í tilgongdina.

Eitt úrslit av barnaverkætlanini er royndin við samskipara í Vági, ið virkar sum liður millum ymsar skipanir, so eingi børn detta niðurímillum – úr vøggustovu og í skúla. Afturmeldingarnar eru sera góðar.

Eisini skúlarnir skulu tryggja børnum bestu byrjanina.

Skúlin á Trøðni fer tí at hava heildagstilboð, so børnini, ið hava tørv á tí, verða betur loftað og sleppa undan órógvandi skiftum dagliga.

Í fólkaskúlanum hava vit framt nógvar broytingar, sum gagna bæði næmingum og lærarar. Og fyrstu royndirnar við at stytta skúladagin og endurskoða tíma- og lærugreinabýtið eru góðar.

Tríggir skúlar, sum nú byrja aftur við munandi betri kørmum, eru Húsarhaldsskúlin í Klaksvík, Miðnám á Kambsdali og Rásin í Saltangará.

Og so skulu børnini hava gott føroyskt tilfar á netinum. Kringvarpið er nógv størsti framleiðarin, og vit ætla at seta pening av, so børnini frameftir fáa léttari atgongd til føroyskt barnatilfar.

***

Tá ið byrjanin er telvað, kemur miðtalvið.

Og frú forkvinna, tá er avgerandi at varðveita yvirlitið – eisini undir trýsti. At halda seg til ætlanina, kenna sínar raðfestingar og avlesa, hvat fer at koma, so tú ikki verður tikin á bóli og missir meira fyri minni.

Á sama hátt mugu vit eisini í politikki støðugt hava yvirlit. Vit mugu avlesa, hvat fer at henda, og hava greiðu á raðfylgju og raðfestingum. Á inntøkum og útreiðslum.

Tí eru øll politisku forfólkini samd um, at vit mugu tillaga almenna bygnaðin. Vit mugu nýskipa, umskipa og leggja eindir saman. Fáa meira fyri hvørja krónu.

Tí var eisini breið semja um at hækka gjøldini á alivinnuna, og tí var tað rættvíst at hækka veiðigjøldini á uppsjóvarvinnuna.

Men vit mugu eisini gera aðrar leikir.

Skulu vit vera framsíggin og tryggja fíggjarliga kappingarførið í longdini, noyðast vit at hækka pensjónsaldurin. Samanborið við 1985 liva vit 4-5 ár longur í miðal.

Tað er gott, at miðallivialdurin framvegis hækkar.

Men tað merkir, at vit fáa pensjón í støðugt fleiri ár, og at vit gerast støðugt fleiri eldri. Men samstundis verða støðugt færri at rinda. Tað hongur ikki saman.

Og broytingarnar koma ikki í gildi fyrr enn í 2035. Tá verða tær stigvísar og við undantøkum. Eitt nú kunnu tey, ið hava arbeitt frá ungum árum, fara frá áðrenn pensjónsaldur. Í løtuni samskifta vit við fakfeløg um, hvussu skipanin kann síggja út. Málið kemur ætlandi fyri tingið aftur seinni í ár.

***

Frú forkvinna,

Telvar tú hegnisliga, megnar tú kanska at fáa eina finnu á baklinjuna hjá mótleikaranum. Tá kanst tú skifta finnuna um við eitt annað fólk – oftast eina frúgv. Tú skiftir sostatt smá virði um við størri virði.

Júst hetta er tað, vinnulívið so hegnisliga megnar. Tey veita tænastur, sum gera tað betri at búgva her. Tey skapa spennandi størv, sum draga fólk. Tey økja um virðið á tilfeinginum. Tey skifta finnu um við frúgv.

Og frú forkvinna – nógvar føroyskar fyritøkur teljast millum heimsins fremstu á sínum øki.

Vit hava kt-vinnu, tøkniframleiðslu og handverk í heimsflokki. Vit hava framúr flogvinnu og shipping. Vit byggja skip og undirsjóvartunlar, sum onnur øvunda okkum, og hava matstovur, sum fáa fólk at ferðast til Føroya.

Og vit eiga at styrkja smá vinnurekandi og íverksetar. Tey skapa fjølbroytni og møguleikar, og sum frá líður kunnu tey skapa týðandi inntøkur.

Fyritøkur, sum í dag flyta sum finnur, kunnu um fá ár flyta sum frýr.

Tí vilja vit lofta smáum vinnurekandi betur. Til dømis við at endurrinda stóran part av lønarútreiðslunum, um starvsfólk gerast langtíðarsjúk.

Tí veita vit teimum atgongd til váðafúsan kapital við Framtaki. Fáa smáar fyritøkur umstøður at granska og menna sínar vørur og tænastur, kunnu tær koma langt.

Løgtingið hevur samtykt ein nýggjan landbúnaðarpolitikk, so vit gerast sjálvbjargnari við stuttfluttum matvørum.

Í ferðavinnuni fór umsetningurin í fjør á fyrsta sinni upp um milliardina.

Ferðavinnan skapar størv, tilboð og møguleikar, eisini fyri okkum føroyingar, men hon er eisini tann vinnan, sum hevur størstar fylgjur fyri gerandisdagin. Tí skal hon vera umhvørvisliga, búskaparliga og sosialt burðardygg.

Nýggja lógin um burðardygga ferðavinnu er so smátt farin at virka.

Og í fiskivinnuni hevur burðardygd somuleiðis avgerandi týdning. Tí gjørdu vit avtalu við Bretland um makrelin – og við Bretland og Noreg um sildina. Hóast nøgdirnar eru minkaðar, fáa vit væl meiri fyri hvørt kilo. Fyrst og fremst tí vit nú kunnu fiska, tá ið góðskan er best.

Fyri eisini at tryggja burðardyggan fiskiskap undir Føroyum eru fiskidagarnir hjá heimaflotanum skerdir. Fiskiskapurin í vár hevur kortini verið betri enn undanfarin ár – og prísirnir eru høgir.

Hóast tað gongur striltið, arbeiða vit støðugt við at tryggja Føroyum betri marknaðaratgongd – og tvey framlop eru.

Í vár gjørdu vit avtalu við Kina, so at fiskur, fiskalýsi og mjøl nú kunnu útflytast til henda stóra marknaðin.

Og í juni bragdaði loksins – eftir nógv ár – at fáa marknaðaratgongd til Brasil. Brasil er stór-innflytari av saltfiski og kann gerast ein týðandi marknaður fyri føroyskar fyritøkur.

Allir partar eru somuleiðis samdir um, at alivinnan skal vera burðardygg.

Vit arbeiða støðugt við at dagføra reglurnar við nýggjastu vitanini, tí tað fylgir stór ábyrgd við stórari vinnu. Fyri at skapa kappingarføri mugu lógarverk og karmar kring alivinnuna vera væl skipað og gjøgnumskygd.

Hóast laksaprísirnir í løtuni eru lágir, er alivinnan væl fyri.

***

Frú forkvinna,

Í talvi arbeiðir tú undir tíðartrýsti. Klokkan tikkar, meðan tú skalt meta um støðuna, samstundis sum tú vigar útfallið av leikunum longur frammi. Av øllum møguleikum skalt tú velja tann besta. Alt meðan tíðin rennur frá tær.

Klokkan tikkar eisini hjá náttúruni.

Vit ovurnýta í løtuni so nógv, at gera vit einki, fara vit í 2050 at brúka tríggjar ferðir so nógv náttúrutilfeingi, sum heimurin kann skapa.

Vit mugu endurnýta og endurvinna sum mest. Nýggja burturkastkunngerðin, sum væntandi kemur um ársskiftið, skal stuðla umleggingini.

Eisini tey 25 átøkini í orku- og veðurlagspolitikkinum eru liður í tí. 18 teirra eru longu sett í verk.

Og føroyska útlátið minkaði umleið seks prosent í 2024, samstundis sum vit høvdu lutfalsliga stóran búskaparvøkstur. Men áhaldandi tørvar okkum fleiri tiltøk fyri at tálma útlátinum, so eftirkomararnir fáa besta útgangsstøðið.

Samgongan vil tí seta bindandi langtíðarmál, og veðurlagslógin kemur í heyst.

El-prísurin skal vera lágur, tá ið lítið verður brúkt av olju, og hægri, tá ið nógv olja verður brúkt. Saman við SEV arbeiða vit við kappingarførum prísskipanum, so orkukrevjandi vinnur kunnu skifta frá olju til el. Eisini skal tað loysa seg betur at seta sólsellur á tekjuna og nýta sólorku.

Og sjálvandi skulu allir bygningar hjá landinum leggja um frá dálkandi olju. Við árslok hava vit skift til grøna orkuskipan í umleið 35 bygningum.

Vit mugu eisini verja viðbreknu føroysku náttúruna, tá ið vit innflyta. Nú gera vit kunngerð, so ávísar plantur og lívverur verða bannaðar.

***

Frú forkvinna,

Kongur, frúgv, rókur, bispur, riddari, finna. Í talvi hava øll fólkini sítt egna gongulag. Men saman stríðast tey fyri at røkka einum felags máli, og tey verja hvørt annað, tá ið á stendur. Fjølbroytni er størsta styrkin.

Hetta sama samhaldsfestið byggja okkara vælferðartænastur á. Vit hjálpast, tá ið á stendur. Í skiftum tørvar okkum øllum jú hjálp.

Í summar kom lógin um at skipa heilsutænastur í nærumhvørvinum í gildi. Nýskipanin fer serliga at gagna eldri fólki, fólki við varandi sjúkum og fólki við serligum tørvi.

Nú landið verður skipað í heilsuøki, verða betri møguleikar at velja lækna – eisini millum kvinnuligar og mannligar kommunulæknar.

Næsta stigið er at knýta kommunulæknar at einstøku røktar- og ellisheimunum.

Sjúkrahúsverkið er nú vorðið universitetssjúkrahús. Fyrimunirnir við hesum eru fleiri, til dømis fara fleiri væntandi at granska í føroyskum viðurskiftum. Tíverri hava vit eina serstøðu, tá ið tað kemur til arvaligar sjúkur.

Vit arbeiða tí við, at pør skulu kunna kanna, um tey bera ávísar deyðiligar ílegusjúkur, sum ikki kunnu viðgerast, og sum hava lutfalsliga stóran títtleika í Føroyum.

Harumframt skulu nýføðingar frameftir eisini screenast fyri ávísar ílegusjúkur, sum kunnu viðgerast og eru vanligari í Føroyum enn aðrastaðni. Hetta verður sett í verk 1. oktober í ár.

Sum nakað nýtt skal ein útgreiningareind lofta teimum, ið hava illgruna um krabbamein. Bæði bíðitíð, viðgerð og tænasta skal kunna sammetast við grannalondini.

Og fyrsti føroyski heilsupolitikkurin er um at vera liðugur. Føroyska heilsuverkið skal vera á støði við heimsins bestu.

Eisini tænasturnar á almannaøkinum skulu vera í heimsflokki.

Tað krevur betri samstarv millum land og kommunur á øllum økjum. Saman við kommununum arbeiða vit við at flyta dagtilboð og umlætting til kommunurnar, so eingin skal detta niðurímillum.

Samsýningin fyri at ansa óhjálpnum skal endurskoðast, og fyritíðarpensjonistar skulu fáa eina pensjónsviðbót, tá ið teir røkka pensjónsaldri.

Fyri at nøkta starvsfólkatørvin vilja vit veita løn undir útbúgving á Heilsuskúla Føroya. Uppskotið varð einmælt samtykt, og vónandi finna kommunur og fakfeløg eina góða semju, so skipanin fer at virka sum skjótast.

***

LØGMANSSKRIVSTOVAN

Prime Minister´s Office

Frú forkvinna,

Eitt tað fyrsta, ein telvari lærir, er at taka ábyrgd av gerðum sínum. Eisini tá ið illa gongur í hond. Og í seinastuni hava ikki allir leikir eydnast sum ætlað. Tað staðfestu vit, tá ið uppskotið um at fyrireika og bjóða Suðuroyartunnilin út endaði aftur í nevnd.

Missir tú fólkið, tapir tú talvið. Seinastu 40 árini hevur Suðuroyggin mist nógv fólk og stendur til at tapa, verða ikki avgerandi leikir fluttir.

Vit hava tikið ábyrgd. Vit hugsa væl og fara hóvliga. Vit hava í huga, at aldrin kann ein gjørdur leikur broytast. Nú kanna vit fleiri møguleikar, áðrenn vit flyta.

Eg eri vónríkur um breiða semju, tá ið vit leggja uppskotið fram aftur í heyst. At vit standa saman.

Vit stóðu saman um Fámjinstunnilin, sum nú er latin upp, um Dalstunnilin, sum helst letur upp í ár, og um Tjørnuvíkartunnilin, har arbeiðið væntandi byrjar komandi ár.

Strandferðsluflotin krevur endurnýggjan, og tvey skip eru liðugt prosjekterað. Annað skal sigla til Kalsoynna og verður ætlandi boðið út í ár – hitt skal sigla til Svínoyar og Fugloyar.

***

Frú forkvinna,

*Talvborðið stendur á Nakkinum enn. Røkurnar troyttar í øldir, áðrenn vit náddu fram,* syngja Frændur.

Og tað eru føroysk fjøll og firðir, ið mynda mentanina, sum í øldir hevur knýtt okkum saman og styrkt okkara samleika. Gjørt okkum til føroyingar.

Mentanin er grundarlagið undir øllum; hon er sjálvt talvborðið, fólkið stendur á. Men á mentanar-liga økinum telva vit eisini móti øllum heiminum.

Tí skulu vit styrkja føroyska mentan.

Vit leggja aftur at Mentanargrunni landsins, so virksemið kann fylgja tíðini, og grunnurin áhaldandi kann lyfta føroyskt mentanarlív.

Vit styrkja virksemið hjá Tjóðpallinum og Symfoniorkestrinum. Vit gera nýggja goymslu til Tjóðsavnið, og vit umbyggja Listasavn Føroya.

Verulig gongd kemur á Koltursætlanina, sum – tá ið hon er liðug – bæði verður náttúrugranskingar-støð, umframt at skúlabørn kunnu vitja oynna og styrkja tilvitið um føroyska náttúru.

Fyri fáum árum síðani høvdu øll børn í Føroyum sama førning. Soleiðis er ikki longur. Vit hava havt stóra tilflyting seinastu árini, og fólk úr fleiri enn 100 londum búleikast nú her.

Tá ið tú telvar, er vanligt at greina talv hjá øðrum fyri at læra av teimum. Tað, sum gekk væl, men eisini tað, sum gekk illa. Á sama hátt kunnu vit læra av okkara grannum, tá ið um tilflyting ræður.

Tilflytingin er við til at nøkta tørvin á arbeiðsmegi og ríka samfelagið við nýhugsan og nýmenning.

Hinvegin tyngir hon serliga dagstovnar og skúlar, tí so nógv børn eru, sum ikki duga føroyskt. Mentanarmunir og vantandi málførleikar elva ofta til truplar støður.

Á heysti í 2023 broyttu vit inntøkumørkini hjá útlendskum arbeiðstakarum, sum vilja hava familjuna við til Føroya.

Hetta hevur tálmað tilflytingini av samfylgjandi familjulimum munandi.

Men vit skulu taka okkum væl av teimum, sum eru komin. Tí er fyrsta føroyska integratiónslógin nú sett í gildi. Endamálið er, at tilflytarar kunnu nýta sínar førleikar, vera fíggjarliga sjálvbjargnir og luttaka í samfelagnum á jøvnum føti við okkum onnur.

***

Frú forkvinna,

Fyri 55 árum síðan – í 1970 – vunnu Føroyar á fyrsta sinni viðurkenning sum sjálvstøðug ítrótta-tjóð. Hetta var, tá ið Talvsambandið gjørdist limur í altjóða talvsamgonguni. Sama ár vóru Føroyar við á talvolympiaduni.

Nógv er hent síðani. Í dag hava vit ein stórmeistara og fleiri altjóða meistarar. Merkið sæst javnan á sigurskamlinum, bæði á oyggjaleikum, í EM- og HM-kappingum og á paralympiaduni.

U21-liðið í hondbólti er triðbest í heiminum. Tað er ikki ein fjarur tanki, at Føroyar spæla seg til OL. Men sum er, forðar ríkisrættarliga støðan okkum atgongd.

Hon forðar eisini atgongd á øðrum økjum.

Vit mugu hava fleiri uttanríkispolitiskar heimildir, so vit kunnu fáa altjóða limaskapir. Tað er eitt nú neyðugt, skulu vit tryggja vinnuni kappingarføra marknaðaratgongd.

Samstarvið við donsku stjórnina er gott, og vit vilja varðveita tað. Men verandi støða er ein forðing. Hetta tykjast allir flokkar samdir um.

Vit mugu sjálv sita við borðið og flyta okkara uttanríkispolitisku leikir. Tí kunnu vit í hesum føri ikki sættast við remis.

Í 2023 segði danski forsætisráðharrin í setanarrøðu síni, at vit skulu hava eitt javnbjóðis samstarv millum trý fólk, trý lond og tríggjar tjóðir.

Í 2012 segði Kaj Leo Holm Johannesen, løgmaður og formaður í Sambandsflokkinum, at hann droymdi um ein ríkjafelagsskap við trimum sjálvstøðugum londum. At ein og hvør skipan má lagast til tíðina.

Eg eri púra samdur.

Í talvi er ein meginregla, at nertir tú eitt talvfólk, skal tað flytast. Í fluttum týdningi hava báðir partar – bæði Føroyar og Danmark – nú nortið fólkið. Tíðin er búgvin til at flyta leikin.

Men tað krevur, at vit í Føroyum standa saman.

***

Frú forkvinna,

*Búgvin til hernað á vígvølli standa*
*fylkini reystu til hildarfund,* yrkti skaldið.

Hesar somu reglur lýsa eisini heimsstøðuna væl. Tí stríðini eru fleiri. Um landaøki, trúgv, toll og pengar.

Støðan er ófrættakend. Óviss.

Tollstríðið hjá USA kann fáa stórar fylgjur fyri Føroyar, tí tað, vit framleiða, útflyta vit í stóran mun, og tað, vit nýta, innflyta vit í stóran mun.

Vit hava tó bara ræði á egnum leikum. Vit ráða ikki fyri, hvussu onnur flyta. Men vit fylgja væl við og gera tað, vit kunnu, fyri at leggja uppfyri.

Aðrir vígvøllir síggjast við áhaldandi polarisering og kríggi.

Ukraina stríðist fyri landøki, fólkaræði, frælsi – og fyri øllum Evropa. Føroyar stuðla Ukraina við neyðhjálp. Vit hava tikið ímóti flóttafólkum, og í heyst ætla vit at lata Ukraina skjóttgangandi bátar.

Øll revsitiltøk, sum ES hevur móti Russlandi í sambandi við kríggið í Ukraina, eru eisini galdandi hjá okkum.

ES og Noreg settu fyri kortum tiltøk í verk mótvegis tveimum russiskum reiðaríum, sum eisini eiga skip, ið fiska undir Føroyum. Ikki orsakað av krígnum í Ukraina, men tí orsøkir eru at halda, at teirra skip taka lut í illgrunasomum virksemi. Landsstýrið fer um stutta tíð at biðja løgtingið um at víðka um verandi heimildir, soleiðis at Føroyar kunnu seta hesi tiltøk í verk.

Og í Gasa er støðan ræðulig. Landsstýrið tekur fult undir við fráboðanini, sum 30 lond skrivaðu undir fyri viku síðani, um at enda kríggið í Gasa í stundini.

***

Frú forkvinna,

Fyri knøppum 100 árum síðan var stór mannamúgva savnað á ólavsøku og hugdi at, meðan telvað varð við livandi fólki í Gundadali. Skótar vóru ílatnir sum talvfólk, og eini 600 fólk fylgdu við.

Millum telvararnar var Andrias Ziska, langabbi Helga Dam Ziska.

Hóast Andrias Ziska ikki visti tá, at hann fór at vera langabbi fyrsta føroyska stórmeistaran, vísir hetta, at tað, vit gera í samtíðini, kann fáa avgerandi týdning fyri framtíðina.

Eitt ættarlið kann slóða fyri, at eitt annað gerst stórmeistari.

Vit telva ikki longur við livandi fólki á ólavsøku. Men vit eru hvønn dag í hørðum talvi um okkara livandi fólk.

Ikki hvør við annan. Men við heimin.

Tí mugu vit vera kappingarfør á øllum økjum. Vit mugu í felag flyta røttu leikirnar – og hava bæði nútíðina og framtíðina í huga.

Eg fari at tríva aftur í nakað av tí, sum Helgi Dam Ziska hugsaði um, tá ið hann sat í sínum týdningarmesta talvi:

*Lít á tíni dømievni.*

*Sættast ikki við remis móti góðum mótstøðumanni, um støðan er góð.*

*Finn støðugt virknar og skapandi leikir.*

Góðu tingfólk,

Tíðin er stillað, og fólkið er sett.

Mugu vit í felag finna sterkastu leikirnar hetta komandi tingárið.

Góða ólavsøku,

Gud signi Føroyar.

LØGMANSSKRIVSTOVAN

Prime Minister´s Office

# Ískoytispartur til ólavsøkufrágreiðing løgmans 2025

# STJÓRNARMÁL

**Ríkisrættarliga støðan**
Samstarvið og samskiftið við danskar myndugleikar er gott, ikki minst á verju- og trygdarpolitiska økinum, har føroyskir myndugleikar fáa regluliga kunning um viðkomandi mál. Hóast samstarvið er gott, tykjast allir flokkar í Føroyum samdir um, at tørvur er á at dagføra viðurskiftini millum Føroyar og Danmark. Serliga við atliti til at fáa størri uttanríkispolitiskar heimildir. Løgmaður hevur í vár havt fundir við forfólkini í politisku flokkunum um ríkisrættarligu støðuna. Allir flokkar uttan Sambandsflokkurin hava boðað frá, at teir taka undir við at arbeiða víðari við eini skipan, sum gevur Føroyum uttanríkispolitiskar heimildir, og sum byggir á samstarv millum javnbjóðis lond í einum felagsskapi. Á ríkis- og samstarvsráðsfundunum, sum vóru í Føroyum í juni, greiddi landsstýrið donsku stjórnini yvirskipað frá støðuni í Føroyum og semjuni millum flokkarnar. Avrátt er, at samskiftið við danskar myndugleikar um hesi viðurskifti heldur fram í heyst.

**Íleggingargrunnurin**
Íleggingargrunnurin fyri Føroyar varð handaður føroysku myndugleikunum tann 1. januar 2025. Við hesum fingu føroyskir myndugleikar fult ræði á fænum í grunninum, sum er oman fyri 700 mió. kr. Løgtingið kann tí nú raðfesta, hvat fæið skal nýtast til. Løgmaður hevur víst á møguleikan, at fæið skal nýtast til eina nýggja farstøð í Vága Floghavn og til ein møguligan Suðuroyartunnil. Talan er um tvær stórar íløgur í føroyska infrakervið, sum fíggjarliga kunnu stuðlast við, at grunnurin fær heimild at veita rentu- og avdráttarfrí lán til verkætlanirnar eitt avmarkað tíðarskeið.

Í sambandi við, at Íleggingargrunnurin er avhendaður til føroysku myndugleikarnar, verður við lógaruppskotinum samstundis tikin støða til, hvørja støðu grunnurin skal hava í samband við løgtingsfíggjarlógina og landsroknskapin. Ætlanin er, at grunnurin skal halda fram sum ein sjálvstøðugur almennur grunnur.

**Suðuroyartunnil**
Politisk semja er um at halda fram við fyrireikingum til ein Suðuroyartunnil við tilhoyrandi tunnilskervum og vegakervum.

Á fundi í Tinganesi tann 10. juni 2025 millum løgmann, politisku forfólkini og politiska fylgibólkin var semja um fylgjandi viðurskifti:
- Politiski fylgibólkurin verður víðkaður til eisini at fevna um forfólkini í øllum flokkum á løgtingi, og kunningarfundir verða leypandi fyri tingfólkum.

- Tað verður framhaldandi P/F Suðuroyartunnilin, sum skal standa fyri fyrireikingararbeiðinum, herundir at framleiða tilfar til politiska støðutakan.
- Framleiðast skal eitt avgerðarnotat, sum fevnir um lýsing og samanbering av tveimum farleiðum, sum knýta Suðuroynna upp í meginøkið. Tá tilfarið er framleitt, verður politisk støða tikin til farleið.
- Notatið skal fevna um lýsing av undirsjóvartunlum, vegum og tunlum á landi fyri báðar farleiðir.

Somuleiðis er semja um, at **farleið 1** fevnir um undirsjóvartunnil millum Djúpadal og Sandvík við vegaføring gjøgnum Sands bygd til Sandoyartunnilin og atkomutunnil til Skúvoyar.

Fyri farleið 1 skal gerast forprosjekt fyri ein atkomutunnil til Skúvoyar, umframt vegir og tunlar, sum binda Sandoyartunnilin í Traðadali og Suðuroyartunnilin í Djúpadali saman. Talan er um ein tunnil gjøgnum Sandalíð, sum er umleið 1 km langur, og veg gjøgnum Sands bygd við tveimum rundkoyringum, so verandi bygdavegir í stóran mun verða varðveittir til m.a. bleyta ferðslu.

**Farleið 2** fevnir um undirsjóvartunnil millum Traðardal og Sandvík við eini íbínding til tunnil til Skúvoyar.

Fyri farleið 2 skal gerast prosjektlýsing, so til ber hjá politisku skipanini at samanbera við forprosjekt, sum er gjørt fyri farleið 1.

Fyri báðar farleiðir eru tey somu vega- og tunnilskervi í Suðuroy atknýtt, ið eru lýst í forprosjekti, sum LBF hevur framleitt fyri P/F Suðuroyartunnilin.

Semja er um, at íbinding í Skúvoy skal vera partur av útboðnum av Suðuroyartunlinum. Í farleið 2 er boring úr Skúvoy ein fortreyt. Verður farleið 1 vald, kann Skúvoy bindast í Suðuroyartunnilin við at bora upp til ella niður úr Skúvoy. Í útboði av farleið 1 kann íbinding í Skúvoy vera ein valmøguleiki.

Lýsingin av báðum farleiðum skal fevna um:
- Tey trygdarátøk, ið mælt verður til, og sum farið verður at søkja um góðkenning til, um politiska skipanin velur ta farleiðina.
- Eina kostnaðarmeting, ið er so neyv, sum hon kann verða, tá eitt forprosjekt er gjørt.
- Eina tíðarætlan, sum umframt projektering, byggitíðarskeið v.m., eisini skal fevna um lóggávutilgongdina.

Fyri báðar farleiðir skal lýsast, hvørji umhvørvisviðurskifti og náttúruárin krevja eina nærri lýsing. Eitt nú skal verða greitt, hvussu spurningurin um loyvini at fylla grót úr tunlinum á sjógv við tí endamáli at gera eina fyribils havn í Skúvoy kann avgreiðast.

**Heildarætlanin fyri nýskipan og effektivisering í almenna geiranum**
Í eina tíð hava løgmaður og landsstýriskvinnan í fíggjarmálum arbeitt við eini heildarætlan, ið hevur til endamáls at tryggja langtíðarhaldførið í føroyska vælferðarsamfelagnum. Politiskur fylgibólkur við forfólkunum í øllum flokkum hevur luttikið í arbeiðinum.

Høvuðstiltøkini, ið arbeitt hevur verið við higartil, fevna um:

- Hækking av pensjónsaldri
- Lógaruppskot um fíggjarpolitiskt regluverk
- Nýskipanar- og effektiviseringarátøk

Ætlanin er at hetta arbeiðið skal halda fram og at ein nýskipanarnevnd verður vald og ein nýskipanarskrivstova verður skipað í Fíggjarmálaráðnum. Saman við politisku skipanini skal nýskipanarnevndin koma við uppskoti til skipanarligar og innihaldsligar nýskipanir, sum skulu betra um langtíðarhaldførið í føroyska vælferðarsamfelagnum.

## FÍGGJAR- OG BÚSKAPARMÁL

**Búskapur**
Útgangsstøðið fyri føroyska búskapin er gott, og tað almenna í Føroyum er ikki serliga skuldarbundið, sammett við onnur lond í vesturheiminum. Metingar benda á, at BTÚ veksur millum 4 og 5% í 2025 og 2026. Harafturat er framvegis nettotilflyting til Føroya, tó at hon er minkað munandi síðstu trý árini.

Føroyska samfelagið hevur kortini búskaparligar avbjóðingar, tá ið hugsað verður um afturvendandi sveiggini í búskapinum, ið stava frá okkara tilfeingisvinnum, og tá ið hugsað verður um vantandi haldføri í almenna búskapinum. Neyðugt er tí at stýra við skynsemi, skulu Føroyar koma væl gjøgnum avbjóðingarnar, uttan at vælferðin verður sett í vanda.

Í nýggjastu kredittmetingini metir Moody's, at afturgjaldsevnini hjá landskassanum eru eitt sindur betri, og tí er grundleggjandi kredittmetingin hækkað. Orsøkina sigur Moody's millum annað vera, at landskassin í fleiri fylgjandi ár hevur havt nærum javnvág í landsroknskapinum, og at skuldin tí hevur verið nærum óbroytt. Harafturat er gjaldføri landskassans sera gott.

**Talgildu Føroyar 2.0**
Løgtingið samtykti í apríl 2025 verklagslóg um Talgildu Føroyar 2.0. Við samtyktini verður tikið týðandi stig á leiðini móti at tryggja vælferðina og at fremja effektiviseringar í almenna geiranum. Verklagslógin er grundað á heildarætlanina fyri talgilding av samfelagstænastum árini 2025–2027.

Við talgilding hava vit eitt amboð, sum lættir um gerandisdagin hjá føroyinginum, gevur vinnuni betri kappingarføri og effektiviserar og nútímansger almennu fyrisitingina. Við samtyktu verklagslógini verður talgilding raðfest sum ein av hornasteinunum til at loysa stóru avbjóðingarnar, sum samfelagið stendur fyri.

Heildarætlanin fyri talgilding av samfelagstænastum árini 2025-2027 er framhald av arbeiðinum, sum byrjaði í 2015 og hevur givið okkum Samleikan, Vangan og Skjáttuna. Føroyar eru longu komnar langt innan fyri talgilding, og framgongdin vekir bæði ans og viðurkenning uttanlands.

Farið verður nú undir næsta stig við 15 átøkum, sum skulu fremjast komandi trý árini. Átøkini snúgva seg fyrst og fremst um at gera tað lættari hjá fólki og vinnu og betri fyri samfelagið. Ætlanin er at brúka 66 mió. kr. til at styrkja talgildingina komandi trý árini.

**Skiftisregla í uttanlandsfrádráttinum**
Løgtingið samtykti í apríl 2025 uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (LM-047/2024). Uppskotið snúði seg um at seta í verk eina skiftisreglu fyri uttanlandsfrádrátt.

Í sambandi við skattaumskipanina í 2024 og 2025 vórðu fleiri avmarkingar gjørdar í serligum skattaskipanum til partar av arbeiðsmarknaðinum, tí tær avlaga arbeiðsmarknaðin og skatta føroyingar ymiskt, alt eftir hvørjum arbeitt verður við, og um arbeitt verður í Føroyum ella uttanlands.

Fyri persónar, sum arbeiða uttanlands, og sum higartil hava verið fevndir av sonevnda eksemption linkingarháttinum, hava broytingarnar við sær, at tøka inntøkan aftan á skatt og sosial gjøld minkar munandi frá 2025, tá ið linkingarhátturin broytist. Samtykta skiftisreglan tekur atlit at støðuni og gevur persónum, sum verða ávirkaðir av broytta linkingarháttinum, longri skotbrá at laga seg til skattaumskipanina. Tey, sum higartil hava verið fevnd av sonevnda eksemption linkingarháttinum, fáa við broytingini trý ár við hægri frádrátti at laga seg til skattaumskipanina.

**Almenni arbeiðsmarknaðurin**
Sáttmálasámráðingarnar í 2024 á almenna arbeiðsmarknaðinum vóru serligar, tí at nøkur fakfeløg gjørdu semju áðrenn methøga prísvøksturin. Tað hevði við sær, at lønarkarmurin broyttist og hækkaði í mun til karmin, sum hesi fakfeløg skrivaðu undir í 2021. Lønarkarmurin hjá hesum fakfeløgum var sostatt lægri enn hjá øllum hinum. Tí varð avgjørt, at hesi fakfeløgini skuldu fáa eina lønarregulering, sum legði upp fyri hækkaða prísvøkstrinum, eins og gjørt varð við øll hini fakfeløgini.

Eisini kom tað nýbrotið, at avtala varð gjørt um eina neyðtilbúgving, sum tryggjar, at lív og heilsa ikki verða sett í vanda, tá ið arbeiðssteðgur er. Avtala er gjørd við Starvsfelagið, Kost- og Føðslu-felagið, Heilsurøktarafelagið og Ljósmøðrafelagið. Avtalan ber í sær, at semja skal gerast um, hvørji størv eru neyðug at manna fyri at hava nøktandi tilbúgving, og somuleiðis tryggjar avtalan eina skipan, sum kann loysa møguligar ósemjur um undantøk. Avtalan kom í gildi 1. apríl 2025.

Í 2024 tók landsstýriskvinnan í fíggjarmálum stig til at seta ein arbeiðsbólk við umboðum fyri fakfeløg og arbeiðsgevarar á almenna arbeiðsmarknaðinum, sum skulu arbeiða við at skipa verandi samráðingarleist av nýggjum. Tað varð gjørt, eftir at landsstýriskvinnan í fíggjarmálum fekk handað skriv frá allari fakfelagsrørsluni, har tað m.a. varð sagt, at soleiðis sum samráðingarnar nú eru skipaðar, so er støðan fastlæst, og køin at sleppa til samráðingarborðið er long. Tað ger, at limirnir ofta arbeiða eftir einum sáttmála, ið er uppsagdur og ikki dagførdur.

Fíggjarmálaráðið er samt í, at samráðingarleisturin hevur tørv á ábøtum. Tí skal arbeiðsbólkurin fara undir eina tilgongd, sum skal útgreina verandi samráðingarleist og royna at finna ein brúkiligan leist fyri sattmálasamráðingarnar frameftir.

**Tollsamstarvið við Danmark og Grønland styrkt**
Føroyar, Danmark og Grønland undirskrivaði 17. september 2024 tvær avtalur, har londini eisini góvu hvørt øðrum tilsøgn um eitt enn sterkari tollsamstarv. Londini fara nú at leggja serligan dent á at luta vitan og royndir sínámillum. Tað er týðandi partur av fyrru avtaluni, ið viðger yvirskipaða tollsamstarvið landanna millum. Avtalan fevnir eisini um felags tollverjuátøk fyri tey trý sam-feløgini umframt um førleikamenning av starvsfólkum og um servenjing av rúsevnahundum.

Hin avtalan, sum Føroyar undirskrivaðu, er ein rammuavtala við Danmark, har samstarvið millum londini verður útgreinað, serliga við atliti at førleikamenning.

## ÁTØK KOMANDI TINGÁR

**Tryggja fíggjarpolitiskt haldføri – styrkt fíggjarpolitiskt regluverk**

Fyri at fáa betri javnvág millum útreiðslur og inntøkur komandi árini er neyðugt at fremja átøk, sum tálma útreiðslunum og økja um inntøkurnar næstu árini. Landsstýrið fer at hyggja nærri at almenna geiranum við tí fyri eyga at fremja tillagingar, ið kunnu betra almenna raksturin frameftir. Fíggjarmálaráðið arbeiðir eisini við uppskotum til fíggjarpolitiskt regluverk, sum skal vera við til at tryggja fíggjarpolitiska haldførið og vælferðina í framtíðini. Ætlanin er, at eitt fíggjarpolitiskt regluverk skal hava breiða semju millum politisku flokkarnar.

Partur av fíggjarpolitiska regluverkinum er settur í verk við broytingunum í løgtingslógini um Búskapargrunn Føroya, sum vórðu samtyktar av Løgtinginum í desember 2024 (LM-012/2024). Broytingarnar snúgva seg millum annað um at broyta uppsetingina í fíggjarlógini og at nágreina, hvørjar inntøkur skulu í grunnin umframt aðrar broytingar.

Ein týðandi partur av regluverkinum snýr seg um fíggjarpolitiska stýring av almenna búskapinum, t.d. at áseta hámark fyri útreiðsluvøkstri, játtanarkarmar fyri fleiri ár og at gera regluligar haldførismetingar.

Ætlanin er, at eitt hámark fyri útreiðsluvøksturin út frá ávísum fyritreytum verður regluskipað í játtanarskipanini. Í játtanarkørmunum seinastu árini hevur landsstýrið bundið seg til ein ásettan útreiðsluvøkstur. Tað skal verða ein lógarásett fyriskipan fyri at tálma almennu útreiðslunum.

Yvirskipað er ætlanin at hava ein mest loyvdan útreiðsluvøkstur í rakstrarútreiðslum umframt tillagingar í mun til átøk, sum skulu til at betra um framtíðar haldførið.

Tá ið ræður um løguútreiðslur, eru afturvendandi avbjóðingar ella ivamál við at seta løguverkætlanir hjá landinum í gongd, m.a. tí at tær verða viðgjørdar einsæris og til tíðir ikki verða mettar í mun til, hvørjar verkætlanir eru mest neyðugar ella geva mest nyttu til samfelagið. Løguverkætlanir hjá landinum eiga at verða viðgjørdar í einari samlaðari løguætlan fyri at tryggja so góða langtíðarætlan og samskipan av verkætlanunum sum møguligt. Ein løguætlan skal fevna um 10 ár ella meira og eigur at verða grundað á fakligar metingar um kostnað, nyttu og neyðugleika av hvørjari verkætlan. Ætlanin er at skipa eina breiða politiska tilgongd fyri at gera eina løguætlan, sum skal verða løgd fyri tingið sum uppskot til samtyktar.

Greiningar av búskaparliga haldførinum hava fremstu raðfesting hjá Búskaparráðnum komandi tvey árini. Í hesum sambandi mennir Landsbankin/Búskaparráðið myndlar til búskaparligar haldførismetingar uppaftur meira. Til at menna myndlarnar liggur eisini ein menning av øðrum viðurskiftum, so sum at dagføra ein íbúgvaroknskap, sum krevur, at Landsbankin fær til vega nógvar ymiskar upplýsingar frá almennum myndugleikum, eitt nú frá heilsuverkinum og eldraøkinum. Harumframt hevur Landsbankin ætlanir um at greina onnur viðurskifti, ið eru viðkomandi fyri at menna myndlarnar; eitt nú hvussu vinnuliga virkin pensjonistar longu eru í dag, og um mótrokningin av aðrari inntøku kann byggjast inn í myndilin.

Neyðugt er eisini at menna ein nýggjan stuttsiktaðan myndil til konjunkturgreiningar. Umframt er tørvur á at menna ein nýggjan myndil til millumlanga siktið.

Myndlarnir eru partur av at menna eitt fíggjarpolitiskt regluverk, ið verður eitt týdningarmikið stýringsamboð, sum kann nýtast til at halda skynsama kós fyri føroyska búskapin, har ið politiskar avgerðir í dag gagna heldur enn at tyngja fíggjarliga rásarúmið hjá komandi ættarliðum.

Búskaparráðið fer eftir ætlan at koma við dagførdari haldførisfrágreiðing í januar 2026. Í hesum sambandi ætlar Fíggjarmálaráðið, at aðalorðaskifti verður um frágreiðingina á vári 2026.

Í 2020 læt OECD úr hondum eina greining av almenna roknskaparverkinum. Tilmælini í greiningini vóru m.a., at vit gera ein roknskap fyri allan almenna geiran eftir felags roknskaparmeginreglum, og at vit brúka avskrivingarmeginregluna fyri allan almenna geiran.

Sum undirliggjandi partur av ella fyritreyt fyri einum fíggjarpolitiskum regluverki er ætlanin at fara undir at nýskipa almenna roknskaparøkið, so at tað verður í samsvari við OECD-tilmælini og hóskandi altjóða standardir um roknskaparviðurskifti. Høvuðstættirnir verða ein greining av at fara frá galdandi roknskaparmeginreglum til meginreglur um fullan kostnað (løgur, avskrivingar o.s.fr.) og at dagføra játtanar- og roknskaparreglurnar samsvarandi. Broytingarnar fara at hava við sær betri amboð at stýra stovnsbúskapunum og harvið at reka almenna geiran skynsamari.

**Umskipan av almenna bygnaðinum**
Tørvur verður á nýskipanum, sum árliga effektivisera almenna geiran við tí endamáli at fáa javnvág í inntøkum og útreiðslum. Arbeiðið fer at taka drúgva tíð og røkka tvørtur um fleiri samgonguskeið. Neyðugt verður tí við breiðum politiskum semjum um átøkini, sum skulu fremjast, og at allir flokkar á Løgtingi fáa møguleika at fylgja við og ávirka arbeiðið.

Landsstýrið ætlar at seta á stovn eina nýskipanarnevnd. Yvirskipaði arbeiðsetningurin hjá nevndini verður at koma við uppskotum um at gera almenna geiran skynsamari og bíligari. Fíggjarmálaráðið verður skrivstova hjá nýskipanarnevndini.

**Átøk til at menna almenn hagtøl**
Í 2025 fekk Hagstovan játtan til at fara undir at menna og framleiða sosialhagtøl. Tað er eitt stórt framstig, tí á fleiri av størstu og mest týðandi vælferðarøkjunum eru almennu hagtølini ófullfíggjað. Serliga innan fyri útbúgving og heilsu er tørvurin stórur og almennu hagtølini avmarkað. Eftir at sosialhagtølini eru raðfest, er natúrligt og neyðugt at fara undir at menna almenn hagtøl innan fyri útbúgving og heilsu. Hagstovan arbeiðir í løtuni í tøttum samstarvi við Barna- og Útbúgvingarmálaráðið og Heilsustýrið við forkanningum, sum verða grundarlagið til støðutakan hjá politisku skipanini. Arbeiðið fer fram í fyrru hálvu av 2025 og eftir ætlan verður kanningararbeiðið við tilmælum klárt í august, tá ið støða kann takast til, um Hagstovan skal fáa fígging at byrja at menna og framleiða hagtølini í 2026.

**MVG-frítøka av gerandisvørum**
Landsstýrið hevur sett sær fyri, at útvaldar gerandisvørur skulu vera bíligari at keypa hjá endabrúkarum. Ætlanin er, at frítøkan av mvg verður fíggjað við broytingum, sum verða gjørdar á inntøkusíðu landskassans.

**Styrkt eftirlit við innflutningi av rúsevnum**
Sambært heildarætlanini um at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu skulu átøk fremjast komandi árini, sum væntandi fara at bøta um eftirlitið við innflutninginum, so at tað verður torførari at flyta rúsevni inn í landið. Ein profileringsskipan er tikin í nýtslu. Skipanin ger marknaðareftirlitið munadyggari og beinraknari. Skipanin var eitt átak í heildarætlanini. Tørvur er eisini á at dagføra skannarar hjá TAKS. Í sambandi við komandi dagføring og útbygging av flogvøllinum í Vágum og terminalinum hjá Smyril Line í Tórshavnar havn fáa tollararnar hjá TAKS betri eftirlitsumstøður.

**TAKS nýggja skattaskipan – Kjarnin**
KT-skipanirnar hjá hjá TAKS skulu nútímansgerast og framtíðartryggjast. Verkætlanin kallast Kjarnin og skal vera liðug í 2030. Fíggjarkarmurin er 150 mió. kr. íroknað prís- og váðaískoyti. Verkætlanin er býtt sundur í smærri bitar, so at nøkur fakøki verða gjørd fyrst, og síðan koma onnur í ávísari raðfylgju. Í 2024 og 2025 hevur serliga verið arbeitt við: heildarmyndum fyri bæði borgarar og vinnu, barnapengum, borgaraumsiting, vinnuumsiting, barnafrádrátti, samskatting, kapitalvinningssamskatting, barsli (egin játtan), brúkaraumsiting, hendingarloggum og trygd. Nakrar nýggjar verkætlanir byrja í seinnu helvt av 2025 og halda fram í 2026. Tær eru virkisskattur, persónskattur, bókhald og borgaravendi parturin av barsli. Eisini verður ætlandi byrjað við tollskipanini, herundir serliga innflutningsskipanini í 2026.

**Talgildu Føroyar 2.0**
Sjøtul er settur á annað umfar av Talgildu Føroyum. Heildarætlan fyri talgilding av samfelagstænastum árini 2025-2027 er gjørd, og verklagslóg er samtykt. Eitt átak er at gera eina heildarætlan fyri vitlíki, sum fer at hava avgerandi týdning fyri at økja um produktivitetin í Føroyum – bæði hjá tí almenna og tí privata. Heildarætlanin fevnir eisini um ymisk átøk, m.a. nýggjan talgildan myndugleika, fleiri virkistænastur, fulltrúaloysn og heilsutænastur á Vanganum.

## UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁL

*Vinnumál*

**Sjórættur**
Í dag, ólavsøkudag 2025, er málsøkið sjórættur yvirtikið, og lóggávuvaldið, útinnandi valdið og fíggjarliga ábyrgdin er nú á føroyskum hondum. Hetta er seinasti liður í drúgva arbeiðinum at yvirtaka tað, sum hoyrir sjóvinnuni til: Í 2001 varð trygd á sjónum yvirtikið, í 2011 loðslóggávan, í 2020 sjókortini, og í 2024 vórðu økini sjóuppmerking og vitaverk yvirtikin. Sum siglandi tjóð er umráðandi, at vit hava ræðið á hesum týðandi málsøki, og vit hava víst í verki, at tað væl ber til at fyrisita hetta økið á ein hátt, ið hóskar til okkara samfelag og viðurskifti.

**Alivinna**
Alivinnan hevur avgerandi týdning fyri Føroyar, og fremsta uppgávan hjá landinum er at tryggja, at lógarverkið og karmarnir kring alivinnuna eru væl skipað. Arbeitt verður støðugt við at dagføra reglurnar við nýggjastu vitanini, og hetta er við til at tryggja, at Føroyar teljast millum fremstu alitjóðirnar í heiminum. Hetta er stór ábyrgd, sum krevur, at vit alla tíðina eru tilvitað um, at alivinnan eigur at vera burðardygg í øllum liðum – umhvørvisliga, búskaparliga og sosialt.

Firum, sum fyrr einamest fekst við rognaframleiðslu til føroysku alivinnuna, hevur við tíðini broytt sítt virksemi frá framleiðslu til gransking. Granskingararbeiðið á Firum hevur til endamáls at menna vitan um aling og viðurskifti, ið kunnu setast í samband við aling og teir karmar, alingin virkar í. Serligur dentur verður lagdur á vitan, ið kann menna varandi føroyska aling, og Firum fer komandi árini at seta ferð á at granska burðardygga nýtslu av firðum, lús og smittu og fiskavælferð.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur stuðlað eini verkætlan, sum er fyrsta stigið í at kanna møguligt samband millum laksaaling og upsastovnin. Verkætlanin, ið er samstarv millum Havstovuna og Firum, er býtt sundur í tveir partar; annar parturin snýr seg um at kanna, hvussu nógvan seið alifiskur etur, og hvussu nógvur seiður verður fangaður í aliringum. Hin parturin snýr seg um at skjalfesta ta vitan, sum longu er um føroyskar firðir.

**Loftferðsla**
Farið er undir at yvirtaka málsøkið loftferðsla. Tíðliga í summar varð felags yvirlýsing um at yvirtaka málsøkið loftferðsla undirskrivað, og føroyskir og danskir myndugleikar eru sinnaðir at fáa til vegar heimild at at yvirtaka málsøkið í stigum. Á henda hátt er talan um trygga og væl fyriskipaða yvirtøku við fyriliti fyri altjóða skyldunum hjá Føroyum og Danmark. Ein arbeiðsbólkur við føroyskum og donskum umboðum skal setast, sum skal fylgja við yvirtøkuni og tryggja framdrátt, samskipan og neyðuga vitanarskiftið.

**Landbúnaðarpolitikkur**
Í vár samtykti Løgtingið nýggjan landbúnaðarpolitikk fyri árini 2025-2035, og við hesum er komið eitt týðandi stig longri fram á leið, tá ið ræður um at virða og gagnnýta okkara egna tilfeingi. Eitt nú kann nevnast, at Búnaðarstovan í samstarvi við áhugafelagið Veltuna hevur sett ein gartnara, sum skal ráðgeva og stuðla undir grønmetisframleiðslu um alt landið.

Saman við landbúnaðarpolitikkinum varð stórur partur av landbúnaðarlóggávuni dagførdur, so landbúnaðarvinnan nú fær virðiligar karmar at virka undir. Landbúnaðarpolitikkurin er nýggjasti vinnugreinapolitikkurin hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum.

**Ferðavinna**
Umsetningurin í ferðavinnuni rakk í fjør á fyrsta sinni eini milliard krónur. Við hesum sæst, at ferðavinnan er týðandi ískoyti til samfelagsbúskapin, og rúm er avgjørt fyri, at ferðavinnan veksur uppaftur meira. Tað er kortini avgerandi, at ferðavinnan í Føroyum verður skipað soleiðis, at hon gevur landinum inntøkur, samstundis sum hon ikki verður sædd sum ein bági fyri fólk og land. Ein ferðavinna, sum bara snýr seg um at fáa so nógv fólk til landið sum gjørligt – uttan at hugsa um avleiðingar fyri fólkið, her býr – er ikki tann ferðavinna, sum vit vilja hava.

Løgtingslógin um burðardygga ferðavinnu fer av álvara at virka í heyst, men ferðavinna er enn lutfalsliga nýggj vinna í Føroyum, og ivaleyst eru enn viðurskifti eftir at skipa. Arbeitt verður tó støðugt við hesum, eisini frá politiskari síðu, men greitt er, at allar avbjóðingar verða ikki loystar í einum. Ferðavinnan og ferðavinnumynstur eru ikki støðug, og broytingar henda alla tíðina. Hesum eru vit til reiðar at lofta.

**Skapandi vinnur**
Fokus er sett á skapandi vinnur, m.a. við átøkum at økja tónleikaútflutningin. Hetta hevur gingið væl, og virksemið í Tónleikaútflutningsstovuni FMX er í vøkstri. Fyri at stuðla góðu gongdini eru settar á stovn skipanir, sum stuðla undir útgávu og útflutning av tónleiki framleiddur í Føroyum.

Eisini í filmsvinnuni gongur tað væl. Afturberingarskipanin til filmsframleiðslur ger, at fleiri útlendsk framleiðslufeløg hava áhuga fyri at framleiða í Føroyum. Men kappingin er hørð, og og tað merkist, at fleiri lond, sum vit kappast við, eitt nú Ísland og Írland, geva uppaftur størri afturbering til serliga stórar filmsframleiðslur.

**Stutttíðarleiga**

Stutttíðarleigumál eru seinastu fáu árini vorðin alt vanligari, og stórir altjóða pallar sum t.d. Airbnb, har fólk lættliga kunnu seta kømur, íbúðir og hús til leigu, hava skundað undir gongdina í Føroyum eins og í mongum øðrum londum. Við stutttíðarleigu er góður møguleiki hjá vanligum fólki at gerast partur av ferðavinnuni, men skjótt vaksandi útboðið av bústøðum til stutttíðarleigu leggur samstundis stórt trýst á bústaðarmarknaðin. Slík leigumál kunnu broyta bústaðarmynstur og trivnað. Eisini í Føroyum verða nógv hús keypt til burturav at verða brúkt til stutttíðarleigu. Hetta sæst bæði á bygd og í bý. Í Havn gerast slíkar ognir alsamt fleiri, bæði í miðbýnum og eisini í nýggjum íbúðarbygningum í ytru býarpørtunum.

Stutttíðarleiga er eitt vinnumál, men avleiðingarnar fyri bústaðarmarknaðin gerast alt sjónligari, og neyðugt er tí at skipa góðar karmar kring hetta virksemið; karmar, sum hava fyrilit fyri tí fólki, ið her býr. Uttanríkis- og vinnumálaráðið, Umhvørvismálaráðið og Fíggjarmálaráðið eru farin undir hetta arbeiðið.

**Nettrygd**

Til tess at røkka málunum í nettrygdarætlanini verður lagt fram uppskot um nettrygdarlóg, sum skal styrkja net-kreppustýringina, økja mótstøðuførið og minka um samfelagsavleiðingarnar, um álop henda. Lóggávan tekur støði í felagsevropeisku NIS2-fyriskipanini, men verður lagað til føroysk viðurskifti.

**Vinnupolitikkur og vinnulóggáva**

Kjarnin í verandi vinnupolitikki varð orðað beint fyri aldarskiftið. Síðan er vinnupolitikkurin víðkaður við vinnugreinapolitikkum á rættiliga nógvum økjum, eitt nú kt-vinnu, ferðavinnu, landbúnaði og skapandi vinnum.

Vinnupolitikkurin varð endurskoðaður í 2005, og samlað tilmæli um vinnupolitisk átøk vórðu gjørd í *Visjón 2015, Mál og vegir* (2007). Ítøkilig vakstrartilmæli vórðu eisini gjørd í *Vøkstur og virksemi* (2009) og aftur í arbeiðinum *Vakstrarforum* (2022).

Fleiri partar hava víst á tørvin á nýggjum vinnupolitikki, og nógvu og stóru broytingarnar í heiminum – bæði á trygdarpolitiska økinum og í samhandlinum millum lond – skunda undir, at sjálvur bulurin í vinnupolitikkinum verður eftirmettur og endurskoðaður.

Rákið í heiminum tykist vera, at lógir og reglur skulu vera einfaldar at fylgja og umsita, og hesi viðurskifti verða eisini tikin við, tá ið farið verður undir arbeiðið við nýggja vinnupolitikkinum. Tað er kortini so, at Føroyar einsamallar seta ikki treytirnar; vit mugu í fleiri førum lúka tær treytir, ið onnur seta. Føroyski útflutningurin er tískil í stóran mun treytaður av, at okkara lóggáva støðugt er dagførd og í samsvari við lóggávuna í teimum londum, vit útflyta til.

Partur av vinnupolitikkinum er at økja fjølbroytnið í føroyskum vinnulívi, og endamálið er m.a. at gera kappingina javnari við at geva smáum og miðalstórum fyritøkum betri atgongd at váðafúsum kapitali. Framtak hevur fingið betri møguleikar at stuðla hesum fyritøkum, og royndirnar eru, at fyritøkur kunnu koma langt, um tær fáa umstøður at granska og menna sínar vørur og tænastur.

Ein annar partur av vinnupolitikkinum er at styrkja karmarnar fyri mat- og tilfeingismenning. Sum matvøruframleiðandi tjóð er umráðandi, at vit granska og menna tær vørur, sum vit framleiða og útflyta. Lyklaorðini eru m.a. fleiri føroyskar matvørur, minni oyðsl og størri virðisøking úr tilfeinginum. Fremsta átakið er, at Granskarasetrið iNOVA frameftir fer at savna sína orku um mat- og tilfeingismenning, og Uttanríkis- og vinnumálaráðið setir fólk at standa fyri hesum arbeiði.

Heimurin í dag leggur alt størri dent á førleikar og evni, integritet og umdømi, etikk og burðardygd, bæði vinnuliga burðardygd, búskaparliga burðardygd, umhvørvisliga burðardygd og sosiala burðardygd, og føroyskur vinnupolitikkurin má tí eisini viðgera hesi evni.

Saman við vinnuni og øðrum viðkomandi pørtum eru fyrstu stigini at eftirmeta og dagføra vinnupolitikkin tikin.

*Uttanríkismál*

Heimspolitiska støðan er fyri stórum broytingum, og alt bendir á, at eitt nýtt tíðarskeið í heimspolitikki er byrjað. Eitt tíðarskeið, sum í størri mun er merkt av kapping millum stórveldini. Tí er hóttanarmyndin ein onnur og álvarsamari enn fyri fáum árum síðani. Á handilsøkinum er samstundis boðað frá tollstríði; eitt stríð, ið kann fáa víðfevndar avleiðingar fyri heimshandilin. Sum heild er tað reglubundna samstarv, sum hevur verið stýrandi fyri viðurskifti millum lond síðan miðju 20. øld, undir stórum trýsti. Tí eru viðurskiftini óvissari.

Henda støða krevur, at Føroyar reka ein virknan og miðvísan uttanríkispolitikk, ið hevur til endamáls at røkja føroysk áhugamál í mun til onnur lond og millumtjóða felagsskapir. Tað fevnir bæði um at tryggja rættindi og atgongd, t.d. á fiskiveiðu- og handilsøkinum, at virka fyri nýggjum møguleikum og um at taka lut í millumtjóða samstarvi og felags átøkum, ið mangan leggja seg eftir at lofta ella leggja upp fyri avbjóðingum, ið eru best lyftar av londum í felag.

Í tílíkum broytingartíðum er umráðandi at reka uttanríkispolitikk á einum analytiskt upplýstum grundarlagi, sum tekur støði í føroyskari heimsfatan. Tí er tað ein raðfesting hjá Uttanríkistænastuni at gera greiningar og metingar um viðkomandi uttanríkispolitisk viðurskifti. Í hesum sambandi hava sendistovur Føroya týðandi leiklut.

**Trygdarpolitikkur**

Í fjør samtykti Løgtingið einmælt uppskot til samtyktar um tjóðartrygdarpolitikk Føroya. Aðalmálið er, at trygd og støðufesti skulu valda, og at føroyskir myndugleikar skulu hava virknan leiklut at røkka hesum máli við støði í millumtjóða samstarvi og altjóða lóg. Tá ið ræður um trygdarpolitikk, er neyðugt at leggja upp fyri, at við hybridum hóttanum er markið millum frið og stríð, sum fyrr var greitt, vorðið alsamt kámari. Samstundis er greitt, at siðbundna trygdarpolitiska hugtakið alsamt víðkast og fevnir um málsøki, ið vanliga ikki hava verið sett beinleiðis í samband við trygdarpolitikk, eitt nú orka, talgilding, fjarskifti, tøkni, veitingartrygd, millumtjóða handil og undirstøðukervi í breiðum týdningi. Hetta setir krøv til føroyskar myndugleikar, og tí er munandi meira samskifti og samskipan millum føroyskar myndugleikar, sum virka á markamótinum til trygd og verju, eitt nú Uttanríkistænastuna, Fjarskiftiseftirlitið, Vørn og Arbeiðs- og brunaeftirlitið.

Føroyar eru í einum øki, hvørs strategiski týdningur er alsamt vaksandi. Tí skulu Føroyar taka lut og vera við til at mynda gongdina, nú NATO og limalondini í størri mun enn áður vísa norðurleiðunum ans. Seinasta árið hevur hetta bæði fevnt um luttøku í flotavenjingum og øðrum átøkum, samskifti á operativum stigi umframt politiska luttøku, tá ið sameindu londini á norðurleiðunum hava hitst á uttanríkisráðharrastigi og verjumálaráðharrastigi í NATO-høpi.

Eisini er munagott samskifti við danska verjumálaráðið og danska uttanríkisráðið, umframt at regluligt samskifti eisini er við onnur grannalond um viðkomandi trygdar- og verjupolitiskar spurningar.

**Arktiska ráðið**

Í mai í ár hava Føroyar saman við Grønlandi og Danmark tikið við formansskapinum í Arktiska ráðnum. Grønland fær leiðandi leiklutin, og Føroyar hava tikið við varaformanssessinum. Danmark varðveitir leiklutin sum formaður í felags sendinevndini hjá ríkinum í Arktiska ráðnum.

Føroyar standa somuleiðis á odda fyri raðfestingunum í mun til havið í formansskránni, sum er orðað í tøttum samstarvi við Havstovuna. Undir hesi raðfesting verður skipað fyri eini altjóða havráðstevnu í Føroyum í mai næsta ár við Fróðskaparsetri Føroya sum verti, og Havstovuni og Uttanríkis- og vinnumálaráðnum sum samvertum.

Virkað verður við støði í arktiska politikkinum, sum løgtingið einmælt hevur samtykt. Politikkurin vísir á mál og átøk, ið Føroyar raðfesta í millumtjóða samstarvi í Arktis. Arktiski politikkurin fevnir um málsøki á fleiri økjum, eitt nú gransking, umhvørvi og tilbúgving.

**Marknaðaratgongd**
Arbeitt verður støðugt fyri at tryggja føroyskum vørum kappingarføra marknaðaratgongd til viðkomandi marknaðir úti í heimi, og serliga arbeiðið mótvegis ES, Bretlandi, Brasil og Kina verður raðfest.

*Kina*
Landsstýriskvinnan í uttanríkis- og vinnumálum vitjaði í Kina í vár og undirritaði tá tvær heilsufrøðiligar protokollir, ið fevna ávikavist um veiddan fisk og fiskalýsi og mjøl. Protokollirnar ger tað nú møguligt at útflyta hesar vørur til Kina og nágreinar eisini mannagongdir í sambandi við útflutning til Kina. Landsstýrið og kinverska stjórnin hava somuleiðis umrøtt møguleikan fyri einum fríhandilssáttmála og eru samd um at fyrireika stig hesum viðvíkjandi.

*Brasilia*
Í juni í fjør var heilsufrøðiligi myndugleikin í Brasil á eftirlitsvitjan í Føroyum við tí fyri eyga at staðfesta, at føroysk virki lúka neyðug krøv til at útflyta til brasilska marknaðin. Herfyri fekk landsstýriskvinnan í uttanríkis- og vinnumálum handaða váttan, sum staðfestir, at heilsufrøðiligu krøvini eru lokin. Sostatt ber nú til at fara undir at útflyta til Brasil. Avtala er somuleiðis gjørd um at skráseta Føroyar rætt í brasilsku tollskipanini, so føroyska vinnan ikki skal rinda meira í tolli enn okkara kappingarneytar í Evropa. Talan hevur verið um eitt drúgt arbeiði, sum nú tykist vera komið á mál.

*Bretland*
Tá ið fríhandilssáttmálin millum Føroyar og Bretland varð gjørdur í 2019, vórðu tollfríu kvoturnar lækkaðar lutfalsliga samanborið við fríhandilssáttmálan við ES. Hetta hevur havt serligar avbjóðingar við sær fyri útflutningin av fiskafóðri. Arbeitt verður miðvíst við at betra um atgongdina til bretska marknaðin fyri fiskafóður, men enn er ikki komið á mál, tó at umrøtt hevur verið at hækka kvotuna.

Somuleiðis verður miðvíst arbeitt við at styrkja samstarvið við Bretland á fleiri økjum. Ítøkiliga verður eisini arbeitt við einum yvirskipaðum samstarvsskjali eftir sama leisti, sum er gjørt við m.a. USA og ES.

*ES*
Virkað verður áhaldandi fyri at gera broytingar í fríhandilssáttmálanum millum Føroyar og ES, serliga at fáa betri marknaðaratgongd fyri víðari vørur, ið eru meirvirkaðar. Omanfyri 90 prosent av føroyska útflutninginum til ES í dag hevur ongan toll.

*Japan*
Arbeitt verður áhaldandi við at menna fortreytirnar fyri handilsviðurskiftunum millum Føroyar og Japan m.a. við støði í semjuskjalinum, ið virkar sum karmur fyri samstarvinum millum Føroyar og Japan.

Í heyst luttaka Føroyar á heimsframsýningini Expo 2025 í Osaka. Hetta er serliga við tí fyri eyga at kveikja størri tilvitan um Føroyar í Japan. Fyrireikingarnar eru í gongd, og luttøka verður bæði frá føroysku vinnuni og frá almennari síðu.

**WTO-limaskapur**
Í januar undirritaðu løgmaður og danski forsætisráðharrin eina felags áheitan á Hægstarætt um at seta eina nevnd sambært § 6 í heimastýrislógini, ið skal greiða spurningin um, hvørt stjórnarskipanarliga støða Føroya loyvir Føroyum at gerast sjálvstøðugur limur í WTO. Hetta arbeiðið er framvegis í gongd.

**Samstarvið við USA**
Sendistovan í Washington DC fór undir sítt virksemi í fjør. Mett verður, at við sendistovuni eru fortreytirnar munandi bøttar til at styrkja samstarvið millum USA og Føroyar. Árligi partalagsfundurin millum Føroyar og USA við støði í partalagsyvirlýsingini var í mai. Samstarvið millum Føroyar og USA er gott, og partarnir eru samdir um at halda fram við at menna samstarvið.

**Avmarkandi tiltøk**
Í fjør varð nýggj kunngerð um avmarkandi tiltøk móti Russlandi lýst. Endamálið við broytingini var at áseta, hvørjar vørur eru loyvdar at útflyta, ístaðin fyri hvørjar vørur ikki eru loyvdar at útflyta. Mett varð, at hesin leistur er betur egnaður til føroysk viðurskifti. Kunngerðin varð dagførd tíðliga í ár, og mett verður støðugt um tørvin á at tillaga og dagføra kunngerðina í mun til tey avmarkandi tiltøk, sum ES og onnur samsint seta í verk ímóti Russlandi.

**Norðurlandamál**
Seinastu trý árini hava Føroyar søkt um og fingið limaskap í teimum seks samnorðurlendsku stovnunum: Nordisk Energiforskning í 2022, Nordforsk í 2023, Nordic Innovation í 2024, Nord-Regio, NordGen og Nordisk Velfærdscenter í januar 2025. Í løtuni verður arbeitt við at fáa limaskap í Nordisk Film og TV fond.

Komið er sostatt á mál við tilgongdini at troyta møguleikarnar í Álandsskjalinum um tættari tilknýti. Eftir er nú at gerast limur í egnum navni í Norðurlandaráðnum og Norðurlandaráðharraráðnum og í Helsingforssáttmálanum. Í løtuni loyva hvørki Helsingforssáttmálin ella galdandi stjórnarrættarliga støðan Føroyum limaskap í egnum navni í norðurlendska samstarvinum.

Norðurlandaráðið samtykti á ársfundinum á heysti 2024, at Norðurlandaráðharraráðið skuldi fara undir at dagføra Helsingforssáttmálan, m.a. fyri at kanna møguleikarnar fyri, at Føroyar, Grønland og Áland gerast partar av sáttmálanum. Undir leiðslu av finska formansskapinum er hetta arbeiðið sett í gongd, og úrslitið av einum løgfrøðiligum kanningararbeiði verður lagt fram í heyst.

Danmark og Føroyar taka yvir formansskapin í Norðurlandaráðharraráðnum í 2026 og hava tí møguleika at ávirka málið um dagføring av Helsingforssáttmálanum. Føroyar átaka sær ein virknan lut í formansárinum og  verða vertir fyri umleið 20 fundum á embætis- og ráðharrastigi í Føroyum í 2026.

**Mannarættindi**

Sum partur av fleiri sáttmálum, sum viðvíkja mannarættindum, luttekur landsstýrið við jøvnum millumbilum til hoyringar um støðuna í Føroyum. Í fjør vóru Føroyar til ST-hoyring um breksáttmálan, og arbeitt verður nú við at fylgja upp niðurstøðunum frá hoyringini. Niðurstøðurnar eru almennar.

Komandi ár verður Universal Periodic Review (stytt UPR) hoyring, sum fimta hvørt ár tekur saman um mannarættindastøðuna í londum. Áðrenn hoyringina verður skipað fyri almennum kunningar- og hoyringarfundum, og síðan verður skrivlig frágreiðing latin ST at nýta í hoyringini. Málið verður í løtuni fyrireikað.

**Samstarvið við ES**

At styrkja samstarvið við ES er ein høvuðsraðfesting hjá landsstýrinum. Í mars í fjør vitjaði ES-nevndarforkvinnan Ursula von der Leyen í Føroyum og undirskrivaði tá saman við løgmanni semjuskjal millum Føroyar og ES.

Endamálið við semjuskjalinum er at skipa ein breiðan karm um samstarvið millum Føroyar og ES og á tann hátt menna viðurskiftini enn meira. Meðan tríggir sáttmálar innan ávikavist handil, fiskivinnu og gransking staðfesta formliga samstarvið millum Føroyar og ES, eyðmerkir semjuskjalið fleiri øki, m.a. útbúgving, mentan, grøna orkuskiftið, veðurlagsátøk og talgilding, sum møgulig samstarvsøki.

Tað er ein fyrimunur, at við semjuskjalinum er yvirskipaða ábyrgdin av viðurskiftunum við Føroyar nú hjá uttanríkistænastuni í ES, EEAS. Við hesum ber til at umrøða samstarvið millum partarnar á einum yvirskipaðum stigi og ikki bara við ymsu sektormyndugleikarnar hvør sær.

Uttanríkistænastan og Sendistova Føroya í Brússel eru í samskifti við ávikavist føroyskar myndugleikar og stovnar og við avvarðandi myndugleikar í ES-kervinum fyri at fremja samstarv á eyðmerktu samstarvsøkjunum í semjuskjalinum.

## ALMANNA- OG MENTAMÁL

*Almannamál*

**Almannapensjónir**
Fólkapensjónsaldurin hækkaði tann 1. juli 2024 til 67,5 ár, og sambært galdandi løgtingslóg hækkar hann aftur tann 1. juli 2030 til 68 ár. Løgtingslógin ásetur harafturat, at pensjónsaldurin frameftir skal ásetast í løgtingslóg 10. hvørt ár við eini 10 ára freist – fyrstu ferð í 2025 galdandi frá 2035.

Búskaparráðið hevur víst á, at tað hevur avgerandi týdning fyri haldførið á føroyska búskapinum, at fólkapensjónsaldurin verður hækkaður meira enn tað, sum almannapensjónslógin longu ásetur. Landsstýrismaðurin fer tí komandi tingsetuna at leggja uppskot fyri Løgtingið um at hækka pensjónsaldurin galdandi frá 2035. Samstundis verður uppskot lagt fyri Løgtingið um tíðartreytaða pensjón, soleiðis at tey, sum frá heilt ungum árum hava verið arbeiðsvirkin, frá 2035 fáa møguleika at fara av arbeiðsmarknaðinum við pensjón áðrenn ásetta pensjónsaldurin.

Skipanin við umrokning og eftirrokning av pensjónum er stirvin, umsitingarliga tung og kann seta pensjonistar í eina trupla fíggjarliga støðu. Tøkniliga menningin í Almannaverkinum ger tað møguligt at broyta skipanina, men neyðugt er eisini við lógarbroyting. Landsstýrismaðurin ætlar tí eisini at leggja eitt uppskot fyri tingið um, at pensjónin hvønn mánað skal ásetast við støði í inntøkuni seinastu 12 mánaðirnar. Á henda hátt verður pensjónin javnað, so hvørt sum inntøkuviðurskiftini hjá pensjonistunum broytast, og harvið slepst undan trupulleikanum við stórum eftirrokningum til fólkapensjonistar.

Flest allir føroyingar eru fevndir av bundnu eftirlønarsamansparingini sambært løgtingslóg um eftirløn – eisini tey, sum fáa almannaveitingar. Fyritíðarpensjón er tó undantikin kravinum um eftirlønargjald, og tí kunnu fyritíðarpensjonistar gerast eftirbátur í sambandi við skiftið frá fyritíðarpensjón til fólkapensjón. Landsstýrismaðurin fer tí at leggja uppskot fyri Løgtingið um, at fyritíðarpensjonistar skulu fáa eina eftirlønarviðbót aftrat vanligu fólkapensjónini, tá ið teir verða fólkapensjonistar.

**Sjúkradagpengar**
Privatir arbeiðsgevarar hava í dag skyldu at rinda einum starvsmanni fulla løn undir sjúku, og starvsmenn eru tí ikki fevndir av dagpengaskipanini. Um ein starvsmaður hjá privatum arbeiðsgevara verður langtíðarsjúkur, hevur arbeiðsgevarin skyldu at rinda starvsmanninum løn í minsta lagi fimm mánaðir, áðrenn hann kann siga viðkomandi úr starvi.

Hetta kann raka hart fíggjarliga – ikki minst hjá smærri vinnurekandi við fáum fólkum í starvi. Tað kann t.d. vera neyðugt hjá tí vinnurekandi at seta ein avloysara í starvið hjá tí sjúka og á tann hátt rinda dupulta løn í eitt tíðarskeið.

Fyri at bøta um hesa støðuna hevur landsstýrismaðurin gjørt av at leggja uppskot fyri Løgtingið, sum fer at geva smærri vinnurekandi møguleika at fáa endurrindaðan stóran part av lønarútreiðslunum til starvsmenn, ið verða langtíðarsjúkir.

**Bústaðir til burturriknar ukrainar**
Síðan fyrstu burturriknu ukrainarnir komu til landið í 2022, hevur tað tíverri verið trupult hjá nógvum teirra at fasthalda bústaðin gjøgnum alt árið. Høvuðsorsøkin er, at stórur partur av teimum býr í stutttíðarleigumálum, sum í vár- og summarhálvuni skulu leigast út til ferðafólk gjøgnum eitt nú Airbnb.

Í ár vísti støðan seg at vera verri enn undanfarnu ár, tí í tíðarskeiðinum frá 1. apríl til 30. apríl 2025 gjørdust útvið 50 burturriknir ukrainar heimleysir. Neyðugt var tí at bera skjótt at við at útvega bráðfeingis bústaðir til hesi fólkini, so at tey ikki endaðu úti á gøtuni. Landsverk, sum fekk eykajáttan til endamálið, gjørdi avtalu við stýrið fyri Bláa Kross um at leiga ein part av gamla barnaheiminum við Pedda við Stein gøtu inntil oktober 2025, og allir burturriknu ukrainarnir, ið høvdu tørv á tí, hava nú fingið bráðfeingis bústað.

Væntandi kunnu tey flestu flyta inn aftur í eitt stutttíðarleigumál einaferð í heyst, men roknast má við, at sami trupulleiki fer at taka seg upp aftur í vár. Neyðugt er tí at fáa skipaðar karmar og skipað ábyrgdarbýtið rundan um bráðfeingis bústaðirnar. Landsstýrismaðurin fer tí tíðliga í heyst at leggja lógaruppskot um hetta fyri Løgtingið.

Lógaruppskotið fer at leggja upp til samstarv og ábyrgdarbýti millum Almannaverkið og Landsverk, har Landsverk fær uppgávuna at útvega bygningar og hølir at leiga út sum bráðfeingis bústaðir umframt uppgávuna at reka bústaðirnar, og Almannaverkið skal standa fyri ávísingini og skal veita sosialfakliga ráðgeving og stuðul í bústøðunum. Við lógaruppskotinum fær landsstýrismaðurin eisini heimild til at áseta serreglur á almannaøkinum, sum víkja frá vanligu reglunum innan fyri ávís, nærri tilskilað økir. Heimildin er neyðug, tí tað hevur verið ein afturvendandi trupulleiki

síðan 2022, at ymiskar almennar skipanir ikki leggja upp fyri serligu støðuni hjá burturriknu ukrainunum, og at ukrainarnir tí detta niður ímillum grundleggjandi almennar skipanir. Ætlanin er at løgtingslógin verður verður tíðaravmarkað, og at hon fer úr gildi aftur tann 1. januar 2027.

**Heimleys og ung við rúsevnismisnýtslu**
Ásannandi, at ung fólk við sálarligum og sosialum trupulleikum og rúsevnistrupulleikum í ov lítlan mun fáa røtt og samanhangandi tilboð, varð ein tvørgeiraligur arbeiðsbólkur settur í november 2024 at endurskoða RÓWT og samlaða innsatsin fyri hesi ungu. Álitið varð handað landsstýrisfólkunum í almanna- og mentamálum, heilsumálum og barna- og útbúgvingarmálum í juni.

Álitið staðfestir, at verandi skipanir í Føroyum ikki megna at lofta hesum bólki av ungum í nøktandi mun, og at neyðugt er við samskipaðum innsatsi millum fleiri myndugleikar. Álitið byggir á eina heildarhugsan, har øll stigini eru treyt hvørt fyri øðrum. Arbeiðsbólkurin ger í álitinum greitt, at tað ikki ber til at loysa trupulleikan við bert einum einstøkum liði. Tí er tað altavgerandi, at øll stigini í tilmælinum verða sett í verk í einum samanhangi.

Eitt nú verður mælt til, at eitt tilhaldsstað til ung verður sett á stovn, ið verður flættað saman við RÓWT, har ung kunnu kenna seg møtt og vird, og har viðkomandi tilboð og hjálp kemur inn í tilhaldsstaðið í einum vælskipaðum samstarvi millum avvarðandi myndugleikar.

Eisini verður mælt til, at fyribyrging og uppleitandi arbeiði verða styrkt og betur skipað, at tillaga og styrkja rúsviðgerðartilboð til at veita rúsviðgerð til fólk við dupultdiagnosum, og at tilboð til fólk, ið hava verið í viðgerð, verða styrkt og víðkað, herundir ávegishús, bú- og viðgerðartilboð, stuðulstilboð og bústaðir.

Í arbeiðsbólkinum vóru umboð fyri Almanna- og mentamálaráðið, Heilsumálaráðið, Psykiatriska depilin, Almannaverkið, Kriminalforsorgina og Barna- og útbúgvingarmálaráðið (Sernám).

**Brekumboðið**
Føroyar fáa nú eitt brekumboð. Løgtingslógin um brekumboð varð einmælt samtykt í mars 2024. Endamálið við brekumboðnum er at styrkja rættindi og kor hjá fólki, ið bera brek. Farið er undir fyrireikandi arbeiðið. Starvið er flokkað, lýst er eftir brekumboðnum, setanarnevndin er mannað, og miðað verður eftir, at starvið er sett tíðliga í heyst. Ráðgevandi nevndin, umboðandi ávikavist løntakarar, arbeiðsgevarar, kommunur, almannaøkið, heilsuøkið og skúlaøkið, verður sett í næstum. Arbeitt hevur eisini verið við at finna hóskandi hølir til Brekumboðið, og ein avtala um skrivstovuhølir í Klaksvík er nú komin undir land. Væntandi verður klárt at flyta inn, tá ið brekumboðið byrjar í starvinum. Eisini er tíð farin við fyrireikandi arbeiði at skipa skrivstovuhaldið, eitt nú skjalahald og bókhald. Miðað verður eftir, at brekumboðið kann fara til verka seinni í ár.

**Heildagstilboð á Skúlanum á Trøðni**
Skúlin á Trøðni er einasti serskúli í Føroyum. Í skúlanum ganga børn, sum ikki tola so væl broytingar ella ikki megna skiftið millum skúla og frítíðartilboð frá teirra heimakommunu ella Almannaverkinum.

Landsstýrið hevur sett sær fyri at arbeiða miðvíst við at bróta niður geirar og at skipa tænastur við barninum í miðdeplinum. Tí er avtala gjørd við Kommunufelagið um, at komandi skúlaár verður eitt heildagstilboð sett í verk, sum bæði fevnir um skúlatilboð og frítíðartilboð. Endamálið er at veita eina samanhangandi tænastu, sum kann fyribyrgja óneyðug skifti, ið kunnu hava við sær mistrivnað og strongd. Tilboðið verður stigvíst og miðvíst útbygt. Vónin er, at tilboðið umframt at vera eitt nýbrot, tá ið tað snýr seg um at bróta niður geirar, eisini kann veita íblástur til, hvussu tænastur kunnu umskipast á øðrum økjum, barninum at frama. Heildagstilboðið er samstarv millum Almanna- og mentamálaráðið, Barna- og útbúgvingarmálaráðið og Kommunufelagið. Talan er um eina fimm ára royndarverkætlan.

**Bygging av vardum bústøðum**
Ein ávegis ætlan er gjørd um nýggjar vardar bústaðir o.a., sum skulu byggjast komandi árini – samsvarandi frágreiðingini "Í góðum hondum" frá 2022.

Nakrir bústovnar koma í staðin fyri verandi bústovnar, ið eru ov smáir, ótíðarhóskandi ella í ov vánaligum standi. Aðrir eru til nýggj búpláss, umlættingarpláss og frítíðartilboð.

Í løtuni eru tvær byggiverkætlanir í gongd. Onnur er í Tórshavnar kommunu til 24 vaksin fólk við autismu, hin verkætlanin er í Vága kommunu til 18 fólk við millum annað sálarligum og sosialum avbjóðingum. Eftir ætlan verða báðar verkætlanir lidnar í 2027.

Seinnu árini eru tríggir nýggir vardir bústaðir bygdir: ávikavist Sambýlið á Mýrini í Hoyvík, ið er til fólk við menningartarni, Heimið, umlættingin og frítíðartilboðið í Kvíggjartúni á Argjum, ið er til børn og ung við autismu, og Sambýlið í Reynstúni á Argjum, ið er til fólk við menningartarni og fjølbreki.

Felags fyri allar tríggjar bústaðirnar er, at fólk trívast sera væl í nýggju umstøðunum. Tey hava fingið tíðarhóskandi karmar, rúmari privatlív, og bústaðurin er bygdur til endamálið og til teirra tørv. Eisini eru umstøðurnar hjá starvsfólkunum góðar, og møguligt er at veita eina fakliga betri tænastu, samstundis sum raksturin er skynsamari enn í smærri eindum.

Størsti parturin av teimum, sum búðu á Eirargarði, er fluttur út. Ætlanin er nú at fara undir at fyrireika at umbyggja Eirargarð, og fígging er sett av til endamálið.

Farið verður eisini undir at fyrireika bygging á keyptum grundøki í Eysturkommunu, eins og leistur fyri bygging av verkstøðum í Tórshavnar og Nes kommunu verður fyrireikaður. Harafturat heldur dagføring av verandi bústovnum fram samsvarandi løgtingslóg um dagføring av vardum bústøðum. Serligur dentur er lagdur á at betra brunatrygd, atkomuviðurskifti, persónstryggleikan, orkuskipanir, inniklima og grønar løðarar.

**Heimarøkt og eldratænasta**
Arbeiðið við at skipa eftirlit á eldraøkinum er sett í gongd. Ein arbeiðsbólkur við tveimum umboðum fyri Almanna- og mentamálaráðið og tveimum umboðum fyri kommunurnar er farin til verka, og eftir ætlan verður arbeiðið liðugt tíðliga í heyst.

Ætlanin er eisini at endurskoða kunngerðina um samsýning fyri ansing av eldri og óhjálpnum. Landsstýrismaðurin hevur í hesum sambandi heitt á kommunufelagið um at gera uppskot til nýggja kunngerð.

Harafturat er neyðugt at finna semjur við kommunurnar um, hvussu landið og kommunurnar betur samstarva um eldraøkið og fólk, sum hava tørv á røkt, men ikki eru pensjonistar enn. Eitt nú persónar yngri enn 67 ár við sjúkum, sum standa við og versna, ella persónar, eldri enn 67 ár, sum búgva hjá og Almannaverkinum og fáa tænastur haðani.

Landsstýrismaðurin í almanna- og mentamálum hevur saman við kommunum í hyggju at skipa demensøkið betur, so at fólk undir fólkapensjónsaldur við demensi ikki detta niðurímillum skipanirnar hjá landi og kommunum. Í dag veita kommunurnar búpláss til fólk við demensi, meðan landið veitir dagtilboð og umlætting til fólk undir fólkapensjónsaldur við demensi. Tað vísir seg, at tað eru fólk, sum detta niður ímillum ella ikki verða loftað av teimum skipanum, sum eru. Landsstýrismaðurin ætlar tí at leggja fram uppskot um, at ábyrgdin av dagtilboð og umlætting til fólk við demensi undir fólkapensjónsaldur verður flutt til kommunurnar.

*Javnstøðumál*

**Javnstøða**
Landsstýrið hevur sett sær fyri at tryggja javnstøðu í samfelagnum. Í hesum sambandi hevur landsstýrið í felag orðað javnstøðulýsing, "Saman um javnstøðu". Her lýsa landsstýrisfólkini, hvørjum javnstøðumálum arbeitt verður við, og hvørjum arbeiðast skal við frameftir, um málið um størri javnstøðu í Føroyum skal gerast veruleiki.

Landsstýrið hevur eisini sett sær fyri at endurskoða javnstøðulógina. Arbeitt verður tí við at dagføra lógina og gera hana meira tíðarhóskandi. Ætlanin er m.a. at fáa eina javnstøðulóg, sum umframt at banna mismuni eisini virkar fyri at fremja javnstøðu. Greiðari ásetingar skulu vera fyri Javnstøðuskrivstovuna um ráðgeving og klaguviðgerð umframt nýggjar ásetingar um kynsligan ágang. Eisini verða ásetingar fyri almennar myndugleikar, stovnar, útbúgvingarstovnar og arbeiðsgevarar, sum eru fevnd av javnstøðulógini, um at tey skulu arbeiða miðvíst, virkið og skipað við at fremja javnstøðu og banna mismuni í øllum sínum virksemi. Miðað verður ímóti at leggja eitt lógaruppskot fyri tingið í vár.

**Heildarætlan um harðskap í parlagi og øðrum nærsambondum 2023–2028**
Tvey ár eru nú liðin, síðan landsstýrið í august 2023 fekk handað nýggju heildarætlanina um harðskap í parlagi og øðrum nærsambondum fyri árini 2023-2028. Heildarætlanin hevur 20 átøk, og fleiri átøk eru longu sett í verk.

Í september 2024 var aðalorðaskiftið í løgtinginum, har løgtingsfólk fingu høvi at viðgera heildarætlanina. Yvirskipað fekk heildarætlanin góða móttøku.

Fleiri av átøkunum leggja seg eftir at menna og styrkja tilboð á økinum. Onnur átøk snúgva seg um upplýsing og hava sum endamál at fyribyrgja harðskapi. Yvirskipaða endamálið er at styrkja um hjálpina til tey, ið hava verið ella eru fyri harðskapi. Somuleiðis hevur verið skipað fyri skeiðum at førleikamenna ymisku yrkisbólkarnar, ið hava markamót til harðskapsøkið.

Nýggjur Vitanardepil læt upp í Kvinnuhúsinum tann 1. oktober 2024, og í apríl 2025 varð eitt tilmæli handað landsstýrismanninum um at seta eina hjálparlinju á stovn fyri harðskapsrakt, avvarðandi og yrkisfólk. Hjálparlinjan er harafturat ætlað teimum, ið fremja harðskap, og sum vilja hava hjálp til at gevast. Starvsfólk verður nú sett at taka sær av at fyrireika hjálparlinjuna – og tilboðið til fremjarar – og ætlanin er, at hetta arbeiðið kann byrjað um ársskiftið.

Eitt annað týðandi stig var fyrr í vár, tá ið broytingar í revsilógini vóru samtyktar, sum kriminalisera sálarligan harðskap og tráfylging.

*Mentamál*

**Kringvarp Føroya**
Javningin av kringvarpsgjaldinum kom í gildi 1. januar í ár, og hetta ger, at inntøkurnar hjá stovninum í størri mun enn áður fara at fylgja gongdini í prísvøkstrinum.

Eftir aðalorðaskifti í Løgtinginum í fjør hava landsstýriskvinnan og stýrið fyri Kringvarp Føroya undirritað nýggjan public service sáttmála fyri árini 2024-2028.

**Miðlastuðulin**
Privatu miðlarnir skulu styrkjast. Arbeitt verður víðari við at endurskoða verandi skipan, men enn vantar semja um, hvussu ein nýggj skipan skal síggja út.

**Føroyska málið**
Frágreiðing um løgtingslóg um málráð var til aðalorðaskifti í heyst. Frágreiðingin og Málráðið eru týðandi liðir í at verja og menna føroyska málið. Í løtuni verður arbeitt við einari loysn, so Málstovan fær betri hølisviðurskifti og umsitingarligan styrk.

Ein heil millión krónur er sett av sum stuðul til framleiðslu av føroyskum listaligum tilfari, eitt nú framleiðslu av tónleikatilfari og øðrum mentanarligum tilfari, sum kann íbirta og menna listaligu og málsligu evnini hjá børnum og ungum í føroyskum høpi. Mentanargrunnur landsins umsitur skipanina.

**Eftirløn til listafólk**
Frá 1. januar í ár kom nýggj skipan í gildi, har listafólkalønirnar og starvslønirnar fáa eftirløn áljóðandi 15%.

**Bókasøvn**
Við heimild í nýggju bókasavnslógini eru fýra nýggjar kunngerðir lýstar um ávikavist stuðul til menning av bókasavnstænastum, bókasavnsráð, býti av bókasavnsgjaldinum og um avhendingarskyldu.

Eisini er avtala gjørd millum landsstýrið og Tórshavnar kommunu, Klaksvíkar kommunu og Runavíkar kommunu – ið allar hava fólkabókasøvn við bókavørðum við hægri bókasavnsfakligari útbúgving í starvi – um, at hesar kommunurnar skulu veita hinum 26 kommununum ráðgeving um bókasavnsrakstur umframt at stuðla undir, at bókasøvnini fremja upplýsing, lærdóm, talgilda búgving og luttøku í mentanarlívinum og samfelagnum sum heild.

**Ljóðbøkur**
Stórur partur av føroysku ljóðbókunum, ið Landsbókasavnið hevur framleitt til blind og sjónveik, er nú givin út til almenningin og er til láns á netinum umvegis bókasøvnini.

**Koltursætlanin**
Tjóðsavnið hevur fingið fígging upp á góðar 60 mió. kr. til Koltursætlanina. Í Koltursætlanini verður oyggin býtt upp soleiðis at norðari parturin fær frið fyri seyði, so upprunavøksturin kann koma fyri seg.

Í sunnara parti verður býlingurin Norðuri í Gerði endurskaptur við sethúsum, bátasmiðju, framsýningum og verkstøðum. Í heyst, tá ið útboð væntandi hevur verið, verður uppskot til verklagslóg eftir ætlan lagt fyri Løgtingið.

**Goymslan á Tjóðsavninum**
Á várið 2024 varð blámusoppavøkstur staðfestur í goymsluni hjá Tjóðsavninum í Brekkutúni 6 í Hoyvík. Tjóðsavnið er tí farið undir arbeiðið at reinsa og flyta teir mest viðbreknu gripirnar í fyribils hølir. Komandi árini er ætlanin at reinsa og flyta allar gripir úr goymsluni.

Tjóðsavnið og Landsverk halda, at tað er skynsamari loysn at byggja nýggjan goymslubygning til endamálið. Ein nútímans goymsla er býtt upp í sonur, ið hava ymisk luftvætustig. Tørvur er á grundgoymslu, fornfrøðiligum goymslum, náttúrufrøðiligum goymslum umframt ymsum smærri sergoymslum til eitt nú myndir og klæðir.

Á fíggjarlógini eru 5 mió. kr. játtaðar til at útvega grundøki og at gera byggiskrá í 2025. Tjóðsavnið og Landsverk hava mælt landsstýrinum til at ogna sær eitt grundstykki Innan Glyvur til nýggja goymslubygningin.

**Norðurlendskur UNESCO-fundur í Føroyum**
Í september verður fundur fyri norðurlendskar UNESCO-nevndir hildin í Føroyum. Á fundinum fara norðurlendsku UNESCO-nevndirnar at viðgera mál av týdningi fyri UNESCO-samstarvið.

**Íløgur í ítróttin**
Í februar 2025 bleiv Stórhøllin Við Tjarnir tikin í nýtslu. Landið hevur stuðlað nýggju høllini við 30 mió. kr. Við nýggju stórhøllini kunnu Føroyar m.a. spæla sínar heimadystir í hondbólti heima í Føroyum.

**Listasavn Føroya**
Verklagslóg um at umvæla og útbyggja Listasavn Føroya, so at listasavnið fær nøktandi hølisumstøður at virka undir, verður fyrireikað at leggja fyri Løgtingið fyrst í tingsetuni 2025.

Eisini er farið undir arbeiðið at reinsa og flyta listaverkini úr goymsluni á listasavninum, nú blámu-soppavøkstur er staðfestur har. Arbeiðið verður framt í 2025 og 2026 og er mett at kosta 6 mió. kr. íroknað konservering av fleiri listaverkum.

Goymslan hjá Listasavninum er ov lítil, og ein langtíðarloysn er, at goymslan hjá Listasavninum verður hýst saman við goymsluni hjá Tjóðsavninum, sum eftir ætlan verður bygd komandi árini.

**Listprýðing**
Arbeitt verður við at gera eitt rundskriv um listprýðing í  byggiverkætlanum hjá landinum. Enda-málið við rundskrivinum er at skipa listprýðing av byggiverkætlanum landsins, so at listprýðing og byggilist verður hugsað sum ein heild, og partur av byggikostnaðinum verður settur av til list frá byrjan av verkætlanini.

**Fólkakirkjan**
Arbeitt verður við nýggjari kunngerð um samsýningar til kirkjutænarar og hjálparfólk í fólka-kirkjuni í Føroyum, sum væntandi verður sett í gildi fyrst í komandi ári.

Tvær kirkjubyggingar verða fyrireikaðar í løtuni – á Glyvrum og á Argjum.

**Mentanarstuðulin umsitast við armslongd**
Í samgonguskjalinum stendur, at filmsstuðulin skal umsitast sambært armslongdarmeginregluni. Tann 1. januar í ár varð nýggj kunngerð um filmsstuðul sett í gildi, ið leggur umsitingina av films-stuðlinum til Mentanargrunn Landsins at umsita og taka avgerð við støði í tilmælum frá films-ráðgevum.

**Mentan raðfest á fíggjarlógini**
Umframt omanfyri standandi eru játtanirnar á fíggjarlógini fyri 2025 til Málráðið, Tónleika-sambandið, filmsstuðulin, stuðulin til yrkisleiklist, Føroya Symfoniorkestur og Mentanargrunn Landsins hækkaðar.

Aldubáran og Tórshavnar Big Band hava fingið egna undirkonto á fíggjarlógini, ið setur teirra virksemi í eina tryggari legu.

## FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁL

*Fiskivinnumál*

**Fiskidagatal á landgrunninum og umsitingarætlan**
Sambært sjófeingislógini skal landsstýrismaðurin áseta fiskidagatalið eftir eini umsitingarætlan og veiðireglu, sum hevur meginreglur fyri burðardygga stovnsrøkt.

Í 2021, 2022 og 2023 var dagatalið sett eftir eini umsitingarætlan, sum ein arbeiðsbólkur legði lunnar undir í mai 2019, og sum landsstýrið seinni tók undir við. Henda umsitingarætlan og veiðiregla skuldi eftirmetast, áðrenn fiskidagar vórðu ásettir fyri 2024. Niðurstøðan í tí eftirmetingini var, at neyðugt er at broyta veiðiregluna, so hon betur leggur upp fyri, at toskastovnurin sambært tilmælinum frá Havstovuni fyri 2024 ongantíð áður hevði verið so illa fyri. Gýtingarstovnurin var komin niður um vandamark.

Tí varð ein bráðfeingis endurbyggingarætlan sett inn í veiðiregluni fyri fiskiárið 2024. Fiskidagatalið hjá bólki 3-5 varð skert 20 prosent og fiskidagatalið hjá bólki 2 skert 10 prosent. Hóast batar eru at hóma í toskastovninum, varð við árslok 2024 mett, at toskastovnurin framvegis er sera illa fyri. Veiðireglan í 2025 ber í sær, at fiskidagatalið í øllum bólkum í fiskidagaskipanini er skert 10 prosent. Veiðireglan í 2025 verður eftirmett, áðrenn fiskidagar verða ásettir fyri fiskiárið 2026.

**Fiskiskapur á Føroyabanka**
Føroyabanki var í nógv ár friðaður fyri nærum allari veiðu. Í 2022 varð varisliga latið upp fyri vinnuligum fiskiskapi við eini tíðaravmarkaðari serskipan, har línuskip og og útróðrarbátar kundu royna í avmarkað dagatal. Skipanin varð nakað broytt í 2023 og 2024.

Í 2025 er fiskiskapurin skipaður eftir sama leisti sum í 2024. Tørvur er tó á at kanna alt regluverkið aftur í sambandi við fiskiskapin á Føroyabanka. Farið er undir hetta arbeiði, og ætlanin er at hava eina dagførda kunngerð til fiskiárið 2026.

**Brúksskylda**
Broytingarnar í sjófeingislógini um brúkstreyt fyri at avhenda veiðirættindi og í brúksskylduni, sum Løgtingið samtykti í desember 2023, fingu virknað 1. januar 2025. Fyri at kunna avhenda egnar fiskidagar ella egnar kvotur í 2025 skulu í minsta lagi 60 prosent vera brúkt í 2024. Undantikin er makrelur.

Somuleiðis fekk brúksskylda á veiðiloyvi og fiskiloyvi virknað á nýggjárinum. Hetta ber í sær, at hevur fiskifar við veiðiloyvi ikki verið til vinnuligan fiskiskap í tvey ár á rað, falla veiðiloyvi og øll veiðirættindini hjá skipinum aftur til landið. Um ávíst fiskiloyvi ikki er brúkt í tvey ár á rað, fellur rætturin til hetta fiskiloyvið aftur til landið. Fiskiloyvi og veiðirættindi hjá útróðrarbátum undir 15 tons eru undantikin brúksskyldu.

**Miðsavnan av fiskirættindum**

Løgtingið samtykti í vár at broyta reglurnar um miðsavnan av fiskirættindum. Nýggju reglurnar hava við sær, at nærstandandi feløg verða roknað undir einum, tá ið gjørt verður upp, hvussu nógvum tey hava ræði á. Broytingarnar komu í gildi 1. juli 2025 og galda bert fram í tíð. Tað vil siga, at verandi persónar og feløg varðveita tey rættindi, sum tey ráddu yvir áðrenn lógarbroytingina. Undantak kann gevast í ávísum førum, har persónur ella felag keypir rættindi frá útlendskum eigara í sambandi við, at útlendskur ognarskapur skal úr vinnuni innan 2032.

**Ognarviðurskifti og útlendskur kapitalur**

Løgtingið samtykti í vár at broyta reglurnar um útlendskan ognarskap í føroyskum feløgum við veiðirættindum. Áðrenn broytingina kundu útlendingar eiga upp til 25 prosent av rættindunum í feløgum við veiðirættindum fram til 1. januar 2032, tá ið allur útlendskur ognarskapur skal vera úti úr føroyskari fiskiveiðu. Við lógarbroytingini, sum fekk gildi 1. juli, verður hesin møguleiki nú tikin burtur.

Útlendingar, sum longu eru partaeigarar í feløgum við veiðirættindum, kunnu halda fram við sínum ognarluti, men teir kunnu ikki økja um sítt ræði, og nýggjur útlendskur ognarskapur verður ikki loyvdur. Tíðaravmarkað undantak kann gevast, um treytirnar ikki eru loknar í ávísum førum, t.d. í sambandi við flyting uttanlands í lestrarørindum.

**Avreiðing uttanlands**

Løgtingið samtykti í vár at linka kravið um at landa uppsjóvarfisk í Føroyum. Uppsjóvarskip hava nú møguleika at landa upp til 25 prosent av veiðuni av svartkjafti, makreli ella norðhavssild uttanlands ella í minsta lagi eina last hjá hvørjum fiskifari. Broytingin fer at geva uppsjóvarskipunum rúmari møguleikar at landa, har tey fáa mest fyri fiskin.

**Gransking og menning**

Virðisvøkstur í fiskivinnuni er ein av týðandi táttunum í fiskivinnupolitikkinum hjá samgonguni. Umframt at varpa ljós á nýskapan og virðisøking fevnir ítøkiliga arbeiðið m.a. eisini um eftirmeting av skipanini av Fiskivinnuroyndum.

Arbeiðið at eftirmeta Fiskivinnuroyndir varð framt í 2024. Skipanin er nú umskipað og býtt í tvey: *smærri verkætlanir* og *flaggskipaverkætlanir*. Smærri verkætlanir eru eftir sama leisti sum áður. Flaggskipaverkætlanir skulu verða framdar sum skipað samstarv millum vinnufyritøku og ein føroyskan granskingarstovn. Endamálið er at hækka støði á verkætlanunum og at raðfesta færri og størri verkætlanir. Harumframt verður granskingarførleikin á føroyskum granskingarstovnum nýttur og mentur, umframt at vitanin, sum kemur burtur úr verkætlanunum, vónandi verður til gagns fyri størri part av vinnuni.

Gransking um fiskastovnar, havumhvørvi og fiskiskap á og kring Landgrunnin skal raðfestast fremri, so at vit beturi skilja, hvussu vistskipanirnar virka og samvirka, harundir eisini hvussu veðurlagsbroytingar ávirka vistskipanirnar. Eisini hevur landsstýrið raðfest at seta í gongd eina verkætlan, sum kannar, hvussu laksaaling ávirkar smáfisk inni við land og vistskipanina á føroyska landgrunninum sum heild.

**Royndarfiskiskapur**
Innan skipanina við royndarfiskiskapi eru latnar tilsagnir til royndarloyvi eftir reyðæti og tunfiski. Hóast nakað av tíð er fráliðin, síðan tilsagnirnar vórðu latnar, eru bert smærri royndir gjørdar eftir reyðæti, og eingin royndarfiskiskapur hevur verið eftir tunfiski. Tilsagnirnar til royndarloyvi eftir reyðæti og tunfiski eru gingnar út.

Áhugin í vinnuni og í samfelagnum annars er stórur fyri at gagnnýta reyðæti. Ætlanin er í næstum at lýsa eftir umsóknum til royndarveiðu eftir reyðæti. Í tí sambandi verður í løtuni arbeitt við at gera umsóknartilfar klárt, so at nýggjar tilsagnir til royndarveiðu eftir reyðæti kunnu latast í seinnu hálvu av 2025.

Nýggjastu tilsagnirnar til royndarfiskiskap eru latnar til royndir eftir makrelgeddu og prikkafiski. Einstøk skip hava verið til royndarfiskiskap, men enn eru veiðinøgdirnar avmarkaðar.

Fiskiskapurin eftir brislingi og fjarðarsild, stinglaksi og partvíst eisini eftir jákupsskel hevur verið skipaður sum royndarfiskiskapur. Arbeitt verður við at skipa henda fiskiskap við vanligum fiski-loyvi.

**Fiskiveiðusamráðingar**
Stórar avbjóðingar hava verið seinastu árini við samráðingunum millum strandarlondini um upp-sjóvarfiskasløgini svartkjaft, norðhavssild og makrel. Í 2024 gjørdu Føroyar, Bretland og Noreg strandarlandasemju um makrel, og Føroyar og Noreg strandarlandasemju um norðhavssild. Semjur-nar tryggja føroyskum skipum atgongd at fiska makrel í bretskum og norskum sjógvi og norðhavs-sild í norskum sjógv.

Í strandarlandahøpi verður nú arbeitt fyri at fáa onnur lond at gerast partur av hesum semjum, eins og samráðingar eru um møguliga svartkjaftasemju.

Í 2024 hava Føroyar gjørt sínámillum fiskiveiðuavtalur við Bretland, Grønland, Ísland, Noreg og Russland. Harumframt hava Føroyar eisini veiðirættindi í NAFO-øki, í NEAFC-øki og í SPRFMO-øki.

Síðani Bretland fór úr ES og gjørdist sjálvstøðugt strandarland, hevur ikki eydnast Føroyum og ES at koma ásamt um eina sínámillum fiskiveiðuavtalu. Føroyar og ES hava javnan samskifti um fiskivinnusamstarvið, og vilji tykist vera frá báðum síðum at raðfesta samstarvið.

Í 2022 samdust Føroyar og Grønland um at fara undir at dagføra karmsáttmálan landanna millum, sum er frá 1997. Samráðingarnar eru nú komnar á mál, og nýggi karmsáttmálin verður væntandi klárur at undirrita og síðan leggja fyri Løgtingið í heyst.

Fiskiveiðuavtalan við Russland fyri 2025 er nakað minni í vavi enn undanfarna avtala, og avtalan hevði við sær skerdar møguleikar hjá russiskum skipum í føroyskum sjógvi. Russisk skip hava ikki rætt at fiska í serøkinum millum Føroyar og Bretland. Eisini eru møguleikarnir hjá russiskum skipum at brúka føroyskar havnir framvegis avmarkaðir til einans tað virksemi, sum er beinleiðis knýtt at fiskiveiðuavtaluni. Hetta síðsta hevur støði í lóggávuni um avmarkandi tiltøk í sambandi við atgerðir móti Ukraina.

**Hvala- og grindamál**
Hvalateljingar vóru í Norðuratlantshavi á sumri í 2024. Hvalateljingarnar verða fyriskipaðar av NAMMCO og eru regluliga uml. 6.–8. hvørt ár. Havstovan samskipar føroysku luttøkuna. Rannsóknarskipið Jákup Sverri luttók í hvalateljingunum, og eisini varð eitt skip leigað til endamálið. Hvalateljingar eru grundarlagið undir vísindaliga arbeiðinum við stovnsmeting av grind og øðrum hvalasløgum.

**Fiskiveiðueftirlit**
Vørn hevur eftirlit við føroyskum og útlendskum fiskiskipum í føroyskum sjógvi og við føroyskum fiskiskipum, sum fiska uttan fyri føroyskan sjógv.

Stovnurin hevur somuleiðis eftirlit í føroyskum havnum við landingum og umskipingum.

Skipini Tjaldrið og Brimil, ið Vørn hevur til tilbúgvingar- og eftirlitsvirksemi, verða í ár ávikavist 49 og 25 ára gomul. Aldurin setur tí støðugt økt krøv til viðlíkahald og umvælingar. Landsstýrið hevur sett sær fyri at fáa til vega eitt nýtt skip fyri Tjaldrið, ið er bæði gamalt og ótíðarhóskandi. Arbeitt verður við at fyrireika málið.

Stórt viðlíkahald verður gjørt á Brimli á sumri 2025. Arbeiðið tekur 10 vikur, og tær vikurnar er Tjaldrið tøkt.

Málsøkið "oljubasing á sjónum" kom undir ábyrgdina hjá Vørn 1. januar í 2025. Arbeitt verður við at dagføra mannagongdir og at fáa til vega útgerð at taka olju upp úr sjónum við.

**Veðurtænasta**
Veðurstova Føroya er í eini menningartilgongd fram ímóti nøktandi tænastum, starvsfólkahópi, mátiskipan og undirstøðukervi. Sum frá líður kann virksemið hjá Veðurstovu Føroya eisini gerast partur av gransking um veðurlagsøkið.

Játtanin til Veðurstovuna varð hækkað við tí endamáli at yvirtaka arbeiðið hjá DMI at gera veðurforsagnir um vikuskiftið og eftir arbeiðstíð. Hetta er nú sett í verk.

*Samferðslumál*

**Landsins bygningar**
Tað er umráðandi at umvæla og viðlíkahalda bygningar landsins, tí stórt eftirsleip er í viðlíkahaldi av bygningum landsins. Landsverk hevur mett, at eftirsleipið til at umvæla og viðlíkahalda bygningar hjá landinum er umleið 470 mió. kr.

**Grønar orkuloysnir**
Meginparturin av landsins bygningum verður hitaður við olju. Ætlanin er, at landsins bygningar í størri mun skulu brúka varandi orku. Peningur er játtaður til grønar orkuloysnir, og arbeitt verður eftir eini ætlan fyri økið, sum verður dagførd eftir tørvi.

Umleið 24 bygningar hava fingið grøna orkuskipan í 2023 og 2024, og umleið 12 bygningar fáa grøna orkuskipan í 2025.

**Samferðsluætlan fyri 2026–2038**
Verandi samferðsluætlan er fyri tíðarskeiðið 2018-2030. Arbeitt verður við at dagføra samferðsluætlanina, sum verður fyri tíðarskeiðið 2026-2038. Endamálið er, at politiska skipanin skal hava gott fakligt grundarlag fyri at kunna taka støðu til, hvørjar íløgur skulu gerast næstu árini.

**Asfaltering**
Stórur partur av vegakervinum er ikki í nóg góðum standi, og Landsverk metir, at eftirsleipið á undirstøðukervinum er umleið 420 mió. kr. Asfaltering av landsvegum er raðfest, og 12 mió. kr. eru játtaðar til asfaltering í 2024 og 2025 og eftir ætlan eisini næstu árini.

**Brúgvin um Streymin**
Í 2009-2010 varð eitt større viðlíkahaldsarbeiði gjørt á Brúnna um Streymin, har serliga koyribreytin og gongubreytin varð dagførd. Nýggjar kanningar vísa, at berandi undirparturin av brúnni hevur størri viðlíkahald fyri neyðini.

Verkætlanin verður fyrireikað, og komið er væl áleiðis við at prosjektera verkætlanina. Arbeiðið kann gerast yvir tvey ár.

**Tunnil til Fámjin**
Farið varð undir at bora Fámjinstunnilin í 2022. Tunnilin er nú liðugur og læt upp fyri ferðslu 25. juni í ár.

**Tunnil til Dals**
Arbeiðið við nýggju farleiðini til Dals gongur eftir ætlan. Roknað verður við, at tunnilin verður liðugur og letur upp fyri ferðslu í 2025.

**Tunnil til Tjørnuvíkar**
Tjørnuvíkartunnilin verður liðugt prosjekteraður í ár, so at farast kann undir at gera nýggju farleiðina til Tjørnuvíkar í 2026.

**Endurnýggjan av strandferðsluflotanum**
Landsstýrið hevur sett sær fyri, at strandferðsluflotin skal endurnýggjast. Tvey skip eru liðugt prosjekterað. Eitt skip, sum skal røkja Kalsoyarleiðina, og eitt skip, sum skal røkja Svínoyar- og Fugloyarleiðina. Ætlanin er at byggja Kalsoyarferjuna fyrst og síðani ferjuna til Svínoyar- og Fugloyarleiðina.

Kalsoyarskipið verður eftir ætlan boðið út at byggja í 2025.

**Broyttur prísbygnaður og bíleggingarskipan**
Nýggj prísskipan fyri oyggjaleiðir varð sett í verk í apríl 2025, og bíleggingarskipanir eru nú á øllum oyggjaleiðum.

**Skaðanevnd**
Landsstýrið hevur raðfest, at skaðanevnd verður sett á stovn. Endamálið við einari skaðanevnd er at kanna og varpa ljós á møguligar orsøkir til, hví ferðsluvanlukkur henda, og á henda hátt vera við til at fyribyrgja aðrar ferðsluvanlukkur. Arbeiðið verður væntandi liðugt í heyst, tá ið uppskot verður lagt fyri tingið.

**Ferðslulógin**
Á vári í 2025 vórðu broytingar í ferðslulógini samtyktar í Løgtinginum. Talan var um broytingar í ásetingunum um rúsevnakoyring, sum hevur víst seg at vera ein alsamt vaksandi trupulleiki í Føroyum.

Revsiásetingarnar fyri koyring undir ávirkan av THC (hash) eru broyttar soleiðis, at revsimynstrið nú líkist revsimynstrinum fyri rúsdrekkakoyring, har revsingin verður ásett eftir, hvussu ávirkaður førarin er. Í heyst er ætlanin eisini at dagføra kunngerðina um flokking av evnum, sum eru vandamikil fyri ferðslutrygdina.

## HEILSUMÁL

**Kanningar av ílegusjúkum í Føroyum og víðka verandi pinkubarnascreening**
Føroyar hava  eina serliga støðu, tá ið tað snýr seg um arvaligar sjúkur. Landsstýriskvinnan arbeiðir við at seta tilmælir í verk um kanningar fyri ílegusjúkur í Føroyum.

Komandi foreldur fáa tilboð um berarakanning fyri ávísar deyðiligar sjúkur, sum ikki kunnu viðgerast. Talan er um seks sjúkur, sum koma lutfalsliga ofta fyri í Føroyum. Ætlanin er at raðfesta tilboðið í komandi ár.

Harumframt skal pinkubarnascreeningin av føroyskum nýføðingum víðkast til at fevna um ávísar ílegusjúkur, sum eru vanligari í Føroyum enn aðrastaðni og kunnu viðgerast. Umráðandi er, at møgulig sjúka verður staðfest tíðliga, fyri at kunna veita bestu viðgerðina. Hetta verður eftir ætlan sett í verk í ár.

**Heilbrigdi flyta í Kerit**
Tað er at fegnast um, at Heilbrigdi fær góð og hóskandi hølir til týdningarmikla virksemið hjá viðgerðarstovninum. Eftir at staðfest varð, at bygningurin á Velbastað ikki longur er egnaður til virksemi, hevur tað eydnast at fáa til vega nýggj hølir til Heilbrigdi í Havn.

Kerit, sum er við síðuna av Mariukirkjuni, er gamla kleystrið hjá Franciskanarasystrunum, sum nú eru farnar av landinum. Franciskanarasystrarnar góvu tilsøgn um at selja kleystrið til virksemið hjá Heilbrigdinum.

Bygningurin er væleydnaður til endamálið. Plantasjan er beint við, skjótt at ganga til svimjihøllina, kirkjurúm er í bygninginum, ið kann nýtast til andakt o.a., og grønt øki er rundanum. Farið er undir at gera bygningin kláran til Heilbrigdi at flyta í, og væntandi verður klárt at flyta fyrst í komandi ári.

**Heilsupolitikkur**
Í løtuni verður seinasta hond løgd á fyrsta heilsupolitikkin fyri Føroyar. Heilsupolitikkurin er ein felags ætlan fyri, hvussu vit tryggja føroyingum bestu heilsutænasturnar. Hann leggur lunnar undir eitt burðardygt og gott heilsuverk, sum bæði røkkur dagsins avbjóðingum og framtíðar tørvi. Visjónin er, at føroyska heilsuverkið skal vera á støði við bestu heilsuverkini í heiminum. Heilsupolitikkurin verður handaður landsstýriskvinnuni eftir summarferiuna, og ætlanin er at skipa fyri aðalorðaskifti um heilsupolitikkin í Løgtinginum í heyst.

**Heilsutænastur og heilsumiðstøðir í nærumhvørvinum hjá fólki**
Tann 1. juni 2025 kom lógin um at skipa heilsutænastur í nærumhvørvinum hjá fólki í gildi. Høvuðsmálini eru at tryggja fólki kring landið atgongd til heilsutænastur í nærumhvørvinum og tryggja sama høga tænastustig í øllum landinum; at seta sjúklingatrygdina í hásæti umframt at skapa betri møguleikar fyri, at heilsustarvsfólk kunnu starvast og mennast í heilsufakligum umhvørvum kring landið.

Nýskipanin fer serliga at gagna eldri fólki, fólki við varandi sjúkum og fólki við serligum tørvi.

Føroyar eru nú skipaðar í fimm heilsuøkir við eini ella fleiri heilsumiðstøðum. Við at skipa landið í heilsuøki fáa bæði kvinnur og menn størri læknaval. Møguleiki verður hjá øllum at velja millum kvinnuligar og mannligar kommunulæknar.

Ætlanin er, at sum frá líður skal stórur partur av heilsutænastunum kunna fara fram í nærumhvørvinum. Á heilsumiðstøðunum fara ymisk heilsustarvsfólk at veita heilsutænastur.

**Royndarskipanir í Suðuroynni**
Sum nakað nýtt er farið undir at gera royndarskipanir á heilsuøkinum. Byrjað er í Suðuroynni, har farið er undir tíggju royndarskipanir, sum hava til endamáls at tryggja, betra og menna heilsutænastur til suðuroyingar. Royndarskipanir verða gjørdar í samstarvi millum heilsuøkið, eldraøkið og

almannaøkið. Seinni verður farið undir at gera royndarskipanir í øðrum pørtum av landinum. Úrslitini frá royndarskipanunum skulu brúkast til at menna heilsuøkið og samstarv við aðrar geirar.

**Kommunulækni knýttur at ellis- og røktarheimum og ávísum sambýlum**
Farið er undir arbeiðið at fyrireika eina skipan, har ein kommunulækni er knýttur at einstøku røktar- og ellisheimunum ella at ávísum deildum á heimunum umframt ávísum sambýlum. Ein slík skipan er til fyrimunar fyri bæði búfólk og starvsfólk. Royndir úr Danmark vísa, at ein lækni á ellis- og røktarheimum kann fyribyrgja at búfólk verða innløgd, og tryggja rættari heilivágsviðgerð. Yvirskipað kann heilsustøðan hjá teimum eldru gerast betri.

**Verkseta átøk í krabbameinsætlanini**
Tað verður áhaldandi arbeitt við at seta krabbameinsátøk úr krabbameinsætlanini í verk. Eins og undanfarnu tvey árini er játtan sett av til krabbameinsátøk í ár. Sum nakað nýtt verður ein útgreiningareind í samsvari við krabbameinsætlanina skipað fyri borgarar, har illgruni er um krabbamein. Endamálið er, at allar ávísingar við illgruna um krabbamein verða sendar á sama stað, so at borgarar í framtíðini verða loftaðir og fáa so skjóta og skipaða útgreining, sum er møgulig í Føroyum. Málið er at bíðitíðirnar eru tær somu sum í grannalondunum, og at føroyingar fáa viðgerð og tænastu, sum er samanberandi við eitt nú Danmark. Samskipari er settur í útgreiningareindini. Væntandi verður farið undir virksemið nú í heyst.

Screeningseindin er stigvíst farin til verka. Screeningin fyri lívmóðurhálskrabba er víðkað og dagførd, og samstundis verður arbeitt við at lúka neyðugar fortreytir, sum skulu til, áðrenn screeningin fyri tarmkrabba verður sett í verk.

Harumframt er palliativa økið raðfest bæði í fjør og í ár. Borgarin sleppur skjótari framat tænastuni, og palliatiónin fer í størri mun at verða veitt í heiminum hjá borgarunum. Umstøðurnar hjá sjúklingum og avvarðandi gerast minni tyngjandi, og inntrivið í dagligu tilveruna verður minni.

**Nýggja talgilda heilsuskipan**
Veitarin av talgildu heilsuskipanini hevur sagt avtaluna upp, sum fer úr gildi við ársenda 2028. Farið er undir at fyrireika at fáa eina nýggja skipan til vega.

Arbeiðið at fáa nýggja skipan til vega verður skipað í eini verkætlan. Stýrisbólkurin er mannaður við umboðum úr Heilsumálaráðnum, Sjúkrahúsverkinum, Apoteksverkinum, Heilsutrygd, Gjaldstovuni og Kommunufelagnum.

Talan er um eina felags journalskipan, ið sjúkrahúsverkið, kommunulæknarnir og ellis- og røktarheimini hava atgongd til. Tað er stórur fyrimunur fyri sjúklingatrygdina, at allar upplýsingar um sjúklingar eru savnaðar á sama stað. Hetta hevur tó eisini við sær, at tað er meira krevjandi at menna skipanina.

**Lóg og átøk um at betra fólkaheilsu og minka heilsuskaðar orsakað av tubbaks- og nikotinnýtslu**

Sambært krabbameinsætlanini verður mett, at umleið 130 føroyingar doyggja árliga av sjúkum vegna royking.  Harafturat kemur talið á føroyingum, sum árliga fáa staðfest ymiskar sjúkur, sum stava frá royking. Hesir heilsuskaðar, sjúkutilburðir og andlát kundu verið fyribyrgd, um fólk ikki royktu. Nógv – eisini ung fólk – snúsa. Tað síggjast støðugt fleiri skaðar á tenn og tannkjøt hjá ungum í Føroyum, ið standast av regluligari nikotinnýtslu. Gransking vísir somuleiðis, at daglig nýtsla av nikotinvørum kann elva til angist og tunglyndi, umframt at heilin kann taka skaða hjá ungum fólkum upp til 25 ár, har heilin ikki er liðugt mentur.

Tørvur er á at seta enn munadyggari tiltøk í verk at fyribyrgja sjúkum og andlátum, sum standast av royking, umframt heilsuskaðum vegna snúsnýtslu. Málið er, at árgangirnir hjá teimum, sum eru fødd frá 2015 at rokna, eru royk- og snúsfríir og ikki nýta aðrar tubbaks- ella nikotinvørur.

Arbeitt verður eisini við at skipa fyribyrgjandi tiltøk, so fólk ikki byrja at roykja. Arbeitt fer at verða við tilboðum um stuðul at leggja av til tey, ið vilja gevast at roykja ella brúka aðrar nikotin- og tubbaksvørur.

**Yvirtøka av landslæknaembætinum**

Ein arbeiðsbólkur við umboðum frá føroyskum og donskum myndugleikum handaði í februar í ár álit til landsstýriskvinnuna um møguliga yvirtøku av Landslæknaembætinum og ávísum øðrum málsøkjum. Arbeiðsbólkurin hevur útgreinað og lýst, hvat liggur í yvirtøkuni av Landslæknaembætinum, hvørji øki natúrliga hoyra til yvirtøkuna, hvar markið gongur ímillum donsk og føroysk málsøki, og hvørjar fíggjarligar avleiðingar verða mettar at vera av yvirtøkuni.

Landsstýrið hevur síðan umrøtt málið og hevur gjørt av, í fyrstu syftu at yvirtaka málsøkini: rúsandi evni og tvingsil í psykiatriini.

**Universitetssjúkrahús**

Í september 2023 fekk landsstýriskvinnan handað álit um universitetssjúkrahús. Landsstýriskvinnan hevur fylgt tilmælinum frá arbeiðsbólkinum og hevur sett 1,5 mió. kr. av á fíggjarlógini fyri 2024 og 1 mió. kr. av í 2025 til at fyrireika Sjúkrahúsverkið til universitetssjúkrahús. Í juni 2024

varð samstarvsavtala undirskrivað millum Sjúkrahúsverkið og Fróðskaparsetrið, og í mai 2025 varð lógaruppskot samtykt í Løgtinginum, ið staðfestir, at Sjúkrahúsverkið verður skipað sum Universitetssjúkrahús. Lógin kom í gildi 1. juni í ár.

At Sjúkrahúsverkið verður universitetssjúkrahús, kemur føroysku sjúklingunum til góðar. Gransking vísir, at sjúkrahús, sum raðfesta, at teirra heilsustarvsfólk fáa umstøður og tíð til gransking og undirvísing, veita betri sjúklingaviðgerð. Harumframt eru sannlíkindini størri fyri, at granskað verður meira í serføroyskum viðurskiftum, tá ið granskingin fer fram í Føroyum.

**Heilivágslógin**
Nýggja heilivágslógin letur millum annað upp fyri at styrkja atkomuna til koppsetingartilboð og at arbeiða við at fáa skynsama heilivágsnýtslu í Føroyum.

Arbeiðið er farið í gongd at skipa koppsetingar í Apoteksverkinum og at lýsa, hvørjar koppsetingar Apoteksverkið skal bjóða. Ætlanin er, at tað skal vera klárt hjá Apoteksverkinum at bjóða koppsetingar í heyst, tá ið aftur verður farið undir at koppseta fyri influensu og koronu.

Harafturat verður arbeitt við at seta eitt nýtt Heilivágsráð í heyst. Heilivágsráðið fer at virka fyri skynsamari heilivágsviðgerð og at tryggja at tilfeingið á heilivágsøkinum verður gagnnýtt sum best.

## BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁL

**Barnaverkætlanin**
Barnaverkætlanin, ið er sett í verk við einari greiðari visjón um at betra barna- og ungdómsøkið í Føroyum, hevur seinasta árið útint týðandi virksemi í betranartilgongdini. Í sambandi við ætlanina at gera eina føroyska barnalóg eru øll børn og ung í Føroyum tikin við í tilgongdina, og úrslitið sæst í drúgvari barnafrágreiðing, ið bleiv handað í mai 2025. Granskingardepilin fyri børn og ung á Fróðskaparsetri Føroya er farin undir sítt virksemi, so at vit fáa meira vitanargrundaðar føroyskar dátur at leiða og stýra eftir. Pilotverkætlanirnar, ið eru gjøgnumførdar, hava havt við sær ítøkilig uppskot til mannagongdir. Hesar mannagongdir verða í løtuni royndar í Vágs Kommunu, umframt at verkætlanin “Saman um barnið” í Vágum ger sær týðandi royndir í verki. Endamálið er, at vit í Føroyum gerast munandi dugnaligari at samstarva og samskipa okkara tænastur tværtur um fakmørk og geirar.

**Barnalóg**
Arbeitt verður við eini barnalóg fyri Føroyar. Lógin skal vera við til at stuðla samskipaðum tvørgangandi tænastur til børn og ung. Ætlanin er, at lógin skal virka bæði fyribyrgjandi og viðgerandi og fevna um øll børn í Føroyum. Lógin skal smíðast í tøttum samstarvi við allar avvarðandi partar, eitt nú landsfyrisiting, kommunala geiran, sjálvbodnar felagsskapir v.m. Barnafrágreiðingin er liður í hesi tilgongd.

**Barnaverndarøkið**
Barnaverndarlógin er broytt, so at tað nú ber til at veita familjum hjálp umvegis nýstovnaðu Familjutænastuna, ið er eitt samstarv millum land og kommunur, sum virkar bæði inni á stovninum og úti í heimunum. Ætlanin er at gera tillagingar á barnaverndarøkinum, eitt nú at endurskoða fosturforeldraskipanina, sum frameftir eisini fer at fevna um styrkt fosturforeldur. Eisini er ætlanin at endurskoða samsýningina til fosturforeldur og umlætting til teirra. Virksemið skal umskipast soleiðis, at færri børn verða sett á stovn í framtíðini. Broytingarnar á barnaverndarøkinum verða gjørdar í samstarvi við kommunurnar.

**Dagstovnaøkið**
Dagstovnalógin verður endurskoðað saman við kommununum. Útgangsstøðið fyri hesum arbeiðinum er tilmælið, sum Dagstovnaráðið hevur gjørt. Vitanin um, hvussu stóran týdning góð dagstovnatilboð hava fyri menning barnsins, er økt munandi seinastu árini. Meiri tíð skal vera til námsfrøðiligt virksemi, trivnaðarskapan og málsliga menning hjá børnum. Ætlanin er at menna eina felags menningareind og at skipa sernámsfrøðiliga økið betur. Saman við Hagstovuni verður arbeitt við at menna eina dagførda hagtalsskipan eftir altjóða leisti á dagstovnaøkinum.

**Fólkaskúlin**
Hægsta næmingatalið í flokkunum í fólkaskúlanum er nú lækkað til 22 næmingar. Lógarbroytingin verður verksett yvir eitt 9 ára skeið. Skúlaleiðslur fáa nú heimild til í hvørjum flokki at umskipa fimm tímar um vikuna til at menna handaligar, listarligar og skapandi lærugreinar, til vallærugreinar og til at seta inn í flokkum við øktum læraratímum. Hetta gevur samstundis skúlunum størri rásarúm at skipa skúladagin eftir tørvinum hjá einstaka flokkinum. Breið politisk semja er um kósina til tess at menna fólkaskúlan. Arbeiðið heldur nú fram at fyrireika at stytta skúladagin og at endurskoða tíma- og lærugreinabýtið. Í hesum sambandi verður fylgt væl við royndarverkætlanini í Skúlanum á Fløtum, har skúladagurin er styttur og lærugreinabýtið tillagað. Námsvísindadeildin stendur fyri eftirmetingini, og endaligu úrslitini skulu nýtast sum grundarlag fyri komandi menning av fólkaskúlanum. Flokslærarin skal eisini raðfestast, og ein tvílæraraskipan verður ment, har samundirvísing verður roynd í tveimum skúlum. Ein arbeiðsbólkur viðger sernámsfrøðiliga økið í fólkaskúlanum. Ein trý ára royndarverkætlan fyri støddfrøði í verki er eisini skipað í fólkaskúlanum.

**Skúlin á Trøðni**
Skúlin á Trøðni er einasti serskúli í Føroyum burturav. Til komandi skúlabyrjan verður heildagstilboð sett í verk í skúlanum. Heildagstilboðið verður skipað í einum samstarvi millum Almanna- og mentamálaráðið, Kommunufelagið og Barna- og útbúgvingarmálaráðið. Endamálið við heildagstilboðnum er at fyribyrgja óneyðug skifti hjá børnum í serskúlanum. Málbólkurin til heildagstilboðið eru øll børn í 1. og 2. flokki og tey børn í ovaru lonunum, ið verða mett at hava gagn av einum samanhangandi skúla- og frítíðartilboði.

**Næmingaráð**
Tað hevur stóran týdning fyri bæði trivnað og demokratisku menningina, at næmingarnir koma til orðanna og kunnu siga sína hugsan um viðurskifti, sum eru tongd at skúla og læring. Kunngerð um næmingaráð er tøk hjá skúlunum við skúlaársbyrjan. Stórt arbeiði er gjørt fyri at menna næmingaráðsarbeiði, og í hesum sambandi eru bæði skeið og ráðstevnur hildin fyri næmingaráðunum kring landið. Eisini eru næmingaráðini hoyrd bæði í sambandi við barnaverkætlanina og í fyrireikingum at gera eina barnalóg.

**Snildfonir í skúlanum**
Nýtslan av snildfonum verður avmarkað í fólkaskúlanum fyri at stimbra trivnað og læring hjá børnum og ungum. Broytingar eru gjørdar í kunngerðini um reglur at fremja gott skil og umsjón við næmingunum í skúlatíðini, har lagt er afturat, at reglurnar eisini skulu fata um virðiligt samskifti og at tálma fartelefonnýtslu í skúladegnum. Ráðstevna hevur verið fyri nývaldu skúlastýrunum, sum eisini hava fingið kunning um, hvat reglurnar í  høvuðsheitum skulu fata um. Harumframt er ásett tíðarfreist til 1. oktober 2025, tá ið reglurnar skulu vera tøkar hjá skúlunum.

**Eftirútbúgvingarvirksemi**
Nýggjur eftirútbúgvingarleistur er gjørdur fyri fólkaskúla og miðnámsútbúgvingar, umframt at Námsvísindadeildin skipar fyri masterútbúgving og skeiðum fyri lærarar og námsfrøðingar í fólkaskúlanum. Námsvísindadeildin hevur bjóðað fyrstu skeiðini út í heyst. Við hesum átøkum hava vit fingið longru eftirútbúgvingarnar á fólkaskúlasøkinum í fasta legu. Hetta gevur lærarum betri møguleikar at menna seg í sergreinum og praktiskum førleikum. Nýggja masterútbúgvingin í námsfrøði er skipað við valfríum sergreinum og fjøltáttaðum skeiðsrøðum, sum gevur lærarum møguleika at fáa eina fakliga dýpd í sínum virksemi. Møguleikin hjá námsfrøðingum á dagstovnum og almannastovnum at luttaka verður eisini skipaður.

**Gymnasiala miðnámsøkið**
Eftirmetingin av gymnasialu breytaskipanini varð handað í apríl í ár. Talan er um eina breiða eftirmeting, ið varpar ljós á viðurskifti, har rúm er fyri batum. Tilmælt verður eitt nú at endurskoða

bygnaðin og innihaldið á gymnasialu breytunum, landafrøðiligu staðsetingina av gymnasialu breytunum og próvtøkuhættir í mun til vitlíki. Greiða skal nú fáast á, hvørji av tilmælunum fyrst skulu arbeiðast víðari við.

**Útbygging á Miðnámi á Kambsdali**
Á Miðnámi á Kambsdali er stór útbygging og umbygging, sum bindur skúlan betur saman við felagsfunktiónum. Skúlin hevur fingið nýtt náttúruvísindaligt økið við nýggjum undirvísingarhølum, og felagsøki við køki. Talan er um triðja byggistig, ið er seinasti liðurin í heildarætlanini frá 2012 um útbygging og umbygging í sambandi við samanlegging av miðnámsskúlanum á Kambsdali. Byggingin fór í gongd á sumri í 2023 og er nú klár at taka í brúk.

**Yrkisútbúgvingarøkið**
Góða gongdin við, at nógv velja eina yrkisútbúgving, heldur fram. Tørvur er á yrkisførleikunum, og tí verður støðugt arbeitt við at menna yrkisútbúgvingarnar, og í verandi løtu verður arbeitt við at tillaga skúlaskeiðini innan fyri nakrar av handverksligu og teknisku yrkisútbúgvingunum, so at longdin á skúlaskeiðunum hóskar betur til tað, yrkini vilja hava burtur úr skúlagongdini.

**Tekniski skúli í Klaksvík**
Tekniska skúla í Klaksvík tørvar eina aulu, har næmingar, lærarar, starvsfólk og onnur atknýtt kunnu savnast til samkomur, fyrilestrar, prógvhandanir og onnur tiltøk, sum eru vanlig og umráðandi í einum nútímans skúla. Verkætlanin at byggja aulu til skúlan væntast at verða liðug við árslok 2026.

**Maritima útbúgvingarøkið**
Útbúgvingar á maritima økinum hava alstóran týdning fyri okkum sum sjóvinnutjóð, og tí verður støðugt arbeitt við at menna útbúgvingarnar. Endurskoðað og stytt útbúgving til dekkara varð sjósett við skúlabyrjan í fjør, har nú ber til at taka skúlapartin til dekkara eftir munandi styttri tíð enn áður, og har eisini ber til at halda fram til skipsatstøðara eftir lokna skúlagongd til dekkara. Arbeitt verður við sonevndum bláum miðnámi, sum skal samantvinna maritimar lærugreinar við eina gymnasiala miðnámsútbúgving. Endamálið við hesum er at økja vitanina og hugin til framhaldandi útbúgving í sjóvinnu millum okkara ungu. Harumframt verður arbeitt við at betra um aspirantskipanina, ið eisini skal vera við til at draga fleiri ung til maritima økið.

**Heilsuskúlin**
Lóg um løn undir útbúgving á Heilsuskúla Føroya er samtykt. Lógin gevur heimild fyri at veita lønarendurgjald til góðkendar arbeiðsgevarar, ið rinda starvsfólkum løn, meðan tey taka skúlagongdina á Heilsuskúla Føroya, umframt tá ið tey taka starvsvenjing uttan fyri sítt arbeiðspláss. Arbeitt

verður við at seta skipanina í verk. Umframt hetta verður framhaldandi arbeitt við einari loysn fyri, hvussu heilsurøktarar og námsfrøðihjálparar kunnu fáa atgongd til hægri lesnað á ávikavist sjúkrarøktarfrøði og námsfrøði á Fróðskaparsetrinum.

**Lestrarstuðul**
Fyri at fáa fleiri ung at lesa í Føroyum má lestrarstuðulin hjá teimum, sum lesa hægri lestur í Føroyum hækkast, soleiðis at upphæddirnar verða ájavnar teimum donsku. Henda tilgongdin fer nú ígongd.

**Fróðskaparsetrið**
Seturslógin verður dagførd, so møguleiki m.a. verður at skipa eitt árs yrkisrættaðar masterútbúgvingar, sum serliga er ætlað eftirútbúgvingum í fólkaskúlanum og á námsfrøðiliga økinum. Eitt árs masterútbúgvingarnar kunnu tó brúkast til onnur fak- og virkisøkir eisini. Fróðskaparsetur Føroya hevur samtykt eina nýggja strategi, sum skal seta kósina fyri Setrið tey komandi fimm árini (2025-2030). Í strategiini verður miðað ímóti at fáa í lag betri samband til arbeiðsmarknaðin. Eisini skal strategiin brynja Setrið til komandi ætlanir við Erasmus+. Ein breitt mannaður arbeiðsbólkur endurskoðar økið fyri hægri yrkisrættaðar útbúgvingar. Málið er at fáa størri smidleika millum hægri útbúgvingar í Føroyum. Samstarvið millum Fróðskaparsetur Føroya og Sjúkrahúsverkið er styrkt við at gera Landssjúkrahúsið til universitetssjúkrahús, har samstarvsavtalur um felagsfunktiónir eru gjørdar. Ætlanin er, at Granskingar- og framtakseindin á Fróðskaparsetri Føroya verður stuðlandi eind undir granskingini í heilsuverkinum. Arbeitt verður við einum ítøkiligum uppskoti um, hvussu tey, sum eru útbúgvin á Heilsuskúla Føroya, skulu kunna fáa atgongd til Fróðskaparsetur Føroya.

**Kampus Setrið**
Høliskarmarnir hjá Fróðskaparsetrinum verða mentir við støði í yvirskipaðu heildarætlanini frá 2018 um at savna alt virksemið hjá Fróðskaparsetrinum í ein samanhangandi lestrar- og granskingarbýling, Kampus. Samlaða verkætlanin er skipað sum tvær ymiskar verkætlanir: “Nýggi felagsbygningurin” og “Høvuðsumvæling og umbygging av skúlabygningunum á Frælsinum”. Prosjekteringin av nýggja felagsbygninginum er væl í gongd og væntast at vera liðug við árslok 2025. Næsta stig verður at bjóða byggingina út, og síðani skal støða takast til at gera bygningin, ið eftir ætlan skal byrja í 2026. Høvuðsumvælingin av skúlabygningum á Frælsinum gongur eftir ætlan. Fyrsta stig í verkætlanini var at høvuðsumvæla lon 5. Hetta arbeiðið er liðugt, og hølini verða nú tikin í brúk. Næsta stig í verkætlanini er at prosjektera samlaðu verkætlanina at høvuðsumvæla og umbyggja skúlabygningarnar á Frælsinum, og tað verður gjørt við støði í vinnandi uppskotinum til heildarætlan, ið er ment fyri skúlabygningarnar. Arbeitt verður fram ímóti, at byggingin av næsta stigi byrjar í 2026.

**Rásin**
Útbyggingin á Rásini er klár til skúlabyrjan eftir summarfrítíðina. Ein nýggjur bygningur er bygdur oman fyri verandi bygning. Hann er í tveimum hæddum við kamarslon í ovaru hæddini og undirvísingarhølum og felagshølum í niðaru hæddini. Ein millumbygningur er gjørdur, sum bindur gamla og nýggja bygningin saman. Í millumbygninginum er m.a. gjørdur nýggjur køkur. Gamli bygningurin hjá Rásini verður umvældur. Rásin fer at hava tvífalt so nógvar næmingar og at taka sjey næmingar upp á hvørjum ári.

**Húsarhaldskúlin**
Nýggi húsarhaldsskúlin í Klaksvík stendur liðugur, og klárt er hjá skúlanum at flyta inn í nýggju hølini, tá ið hann byrjar aftur eftir summarfrítíðina. Tað er sjálvsognarstovnurin Húsarhaldsskúli Føroya, ið hevur staðið fyri verkætlanini. Landskassin og Klaksvíkar kommuna hava fíggjað skúlapartin, og Bústaðir hava fíggjað búeindina.

**Gransking**
Hagtøl eru nú tøk um føroyska gransking og menning, sum vísa, at samlaðu útreiðslurnar svara til 1,4 prosent av BTÚ í 2023, ella 367 milliónir krónur. Størsti parturin er menning í vinnuni. Talið á umsóknum til gransking er økt munandi og er nógv størri enn møguleikin at veita stuðul. Gransking og menning hevur verið ein høvuðstáttur í samstarvinum millum Føroyar og ES, síðan Føroyar á fyrsta sinni í 2010 fingu atlimaskap í ES-samstarvsætlanini Horizon Europe. Samstarv millum Føroyar og ES um gransking og menning er ein berandi súla undir leiklutinum hjá Føroyum í altjóða granskingarsamstørvum. Føroyar eru eisini virknar í gransking í Arktis og Norðurlondum.

**Erasmus+**
Føroyar fyrireika at verða partur av Erasmus+ útbúgvingarsamstarvinum hjá ES. Fyrsta liðið er at skipa eina nationala umsitingareind sambært krøvunum frá ES um Erasmus+. Starvsfólk er sett í Undirvísingarstýrinum at fara undir hesa tilgongd.

## UMHVØRVIS-, ARBEIÐSMARKNAÐAR-, OG BÚSTAÐARMÁL

*Náttúrumál*

**Náttúruvernd**
Nýggj náttúruverndarlóg kom í gildi í fjør, og arbeiðið er farið í gongd at seta í verk ítøkilig verndartiltøk og reglur. Samstundis verður arbeitt við at savna náttúruvitan og fyrireika eina framtíðar náttúruskráseting, so at fyrisitingin fær eitt sterkt grundarlag at virka á. Umhvørvisstovan mennir ein metadátugrunn og eina dátugoymslu, sum skulu tryggja yvirlit og varðveita dátur, sum eru fíggjaðar ella góðkendar av almenna myndugleikanum. Ætlanin er, at hesar upplýsingar skulu verða alment atkomuligar á alnótini.

Í fjør varð fyrsta økið vart sambært lógini – Melin og bakkin oman fyri Lónna í Saksun – og fleiri verndarøki eru á veg, m.a. í Skúgvoy. Samgongan arbeiðir við einari lívmargfeldisstrategi í samsvari við skyldurnar í lívmargfeldissáttmálanum hjá ST og Kunming-Montreal-karmin, sum varð samtyktur í 2023.

Tað er í veruleikanum sera avmarkað við krøvum til innflutningar av plantum og fremmandum lívverum til Føroyar. Vit kenna øll dømi um fremmandar lívverur, sum hava breitt seg út í føroysku náttúruna, og sum nú hótta tað upprunaliga føroyska plantu- og djóralívið. Tí er ætlanin at styrkja lógarverkið, so at forðað verður fyri, at fremmandar lívverur, ið kunnu hótta føroyskt lívmargfeldi, verða innfluttar ella sleppa at breiða seg. Hetta skal gerast við eini kunngerð um innflutning, har tað ber til at seta bann fyri innflutningini av ávísum plantum og lívverum, krav um loyvi til innflytarar, og greiðari reglur um váttanir, útseting og fráboðan.

**Krøvini til jarðhitaboringar endurskoðað**
Lóggávan um jarðhitaskipanir er styrkt til tess at avmarka dálkingina frá jarðhitaboringum mun-andi og at tryggja eina skynsama útbygging av grønum orkuloysnum. Hóast hitapumpur hava verið ein týðandi liður í grøna orkuskiftinum, hava jarðhitaboringar elvt til dálking orsakað av borievju og borivatni. Við broytingunum eru krøvini herd, og myndugleikarnir og kommunurnar hava fingið víðkaðar heimildir at seta treytir og hava eftirlit.

*Orku- og umhvørvismál*

**Orku- og veðurlagspolitikkur**
Føroyska útlátið av vakstrarhúsgassi minkaði umleið 6 prosent í 2024. Og hetta hendi, samstundis sum vit høvdu lutfalsliga stóran búskaparvøkstur. Hetta eru gleðilig tíðindi, ið vísa, at tey átøk, sum eru sett í verk, hava virkað. Men enn eru vit langt frá málunum í Parísavtaluni, og tørvur er áhaldandi á at seta tiltøk í verk at tálma útlátinum av vakstrarhúsgassum.

Av 25 átøkum í samtykta orku- og veðurlagspolitikkinum frá 2022 eru 18 longu sett í verk, m.a. útbyggingarætlan fyri orkuøkið, lóggáva um fjarhita og skipan fyri óhefta orkuvegleiðing. Somuleiðis er arbeiðið byrjað at minka nýtsluna av F-gassi. Stuðul og avgjøld eru týdningarmikil amboð til at tryggja eina rættvísa grøna umlegging, har øll kunnu vera við.

IMO arbeiðir við at fremja Parísavtaluna fyri sjóvinnuna, og Føroyar fylgja væl við, tí okkara mál um netto-null í 2050 er tongt at menning av tøkni og brennievni til skip. Havnirnar í Føroyum hava uppgávuna at útbyggja skipanir við landstreymi, men av tí at striltið hevur verið at fingið gongd á hesar útbyggingar, hevur samgongan sett stuðulskipan í verk til tess at stuðla upp undir hjá havnum, ið hava sýnt áhuga.

Føroyar arbeiða eisini altjóða við at minka útlát og dálking frá skipum og eru við í einari felagsumsókn til IMO um at gera havleiðirnar frá Portugal til Grønlands til sonevnt ECA-øki. Endamálið er at seta strong krøv um reinari brennievni. Føroyar ætla at luttaka á COP 30 í Brasil, har m.a. hav, matvøruframleiðsla úr sjónum og tillaging til veðurlagsbroytingar hjá oyggjasamfeløgum verða evni á skránni. Tættari samstarv við Danmark og Grønland á veðurlagsøkinum er eisini ávegis.

**Veðurlagslóg**
Veðurlagsbroytingar eru ein av størstu avbjóðingunum í heiminum, og tað er okkara skylda at tryggja komandi ættarliðum somu møguleikar fyri einum burðardyggum heimi, sum vit sjálvi hava havt. Samgongan vil tí festa veðurlagspolitikkin við lóg og fer at leggja fram uppskot til veðurlagslóg í heyst. Endamálið er at seta bindandi langtíðarmál um at minka útlátið í samsvari við altjóða mál og tryggja eina stigvísa tilgongd at náa teimum.

Veðurlagsmálini skulu eftirmetast og dagførast fimta hvørt ár, og øll skulu hava javnbjóðis møguleika at luttaka í orkuskiftinum. Eisini er ætlanin at seta á stovn eitt fakligt veðurlagsráð og eitt ungdómsveðurlagsráð, sum skal kunna ummæla átøk, áðrenn tey verða sett í verk.

**SEV og orkuútbyggingar**
Við lóg er ásett, at SEV einsamalt eigur og rekur samhaldsfast elnetið í Føroyum, og at alt el til endabrúkara skal um netið hjá SEV. Samhaldsfasta skipanin tryggjar øllum føroyingum hágóðskuel fyri somu prísir, sama hvar í landinum tú býrt. SEV skal hava góðkendar prísskipanir og við skiftatreytir fyri keyp og sølu av varandi orku, og útbyggingar av elskipanini skulu samsvara við útboð av orku, so netið kann taka ímóti henni.

Kundaskarin er ymiskur, og SEV skal tí bjóða fleiri prísskipanir. Landsstýrið vil, at elprísurin verður lægri, tá ið lítil olja verður brúkt, og hægri, tá ið nógv olja verður brúkt. SEV og myndugleikarnir eru farin undir at menna kappingarførar prísskipanir, sum kunnu fáa orkukrevjandi vinnur at skifta frá olju til el.

Orkuútbyggingarætlanin skal dagførast javnan, og bæði SEV og framleiðarar skulu kunna fyrireika seg til útboð. Kunning og hoyring eiga at raðfestast, og kommunur skulu fyrireika seg tíðliga. Sólorka hóskar seg sera væl til ta føroysku elskipanina, og hóast vit ikki hava eins góðar umstøður og tey sólríku londini, so høvdu miðvísar útbyggingar av elframleiðslu úr sólorku gjørt stórt gagn í elskipanini. Tí eru SEV og myndugleikarnar farin undir at menna prís- og avgjaldsskipanir, sum skulu tryggja, at tað í størri mun loysir seg hjá vinnu og privatum húsarhaldum at seta sólsellur upp á sínar tekjur.

**Nýggj kunngerð um burturkast**
Um vit halda fram at nýta náttúrutilfeingi sum nú, fara vit í 2050 at brúka tríggjar ferðir so nógv náttúrutilfeingi, sum heimurin kann skapa og endurskap. Vit mugu tí flyta okkum frá linjubúskapi til ringbúskap, har vit avmarka tilfeingisnýtsluna og endurnýta og endurvinna mest møguligt.

Nýggja burturkastkunngerðin, sum væntandi kemur um ársskiftið, skal stuðla hesi umlegging og styrkja tann hugburð, sum longu er á veg hjá borgarum og vinnu. Tørvur er á tøttum samstarvi við kommunur og myndugleikar, um hetta skiftið skal bera á mál.

*Arbeiðsmarknaðarmál*

**Barsilslógin**
Barsilsskipanin tryggjar løntakarum lønarendurgjald í barsilsfarloyvi og hevur verið ment stigvíst, síðan hon varð sett í verk fyri skjótt 25 árum síðani. Seinasta árið eru fleiri týðandi broytingar framdar til frama fyri familjur í ymiskum lívsstøðum.

Hámarkið fyri barsilspening varð 1. mai hækkað frá 25.000 til 30.000 krónur um mánaðin og verður nú javnað á hvørjum ári, so tað fylgir almennu lønargongdini. Hetta hevur stóran týdning, tí fleiri foreldur raktu útgjaldshámarkið, sum stóð í stað, meðan lønirnar hækkaðu.

Foreldur at tví- og tríburum hava nú rætt til at vera í barsilsfarloyvi samstundis í eitt heilt ár. Støk foreldur kunnu eftir umsókn lata einum umsorganarpersóni rættin til barsilsfarloyvi, sum hitt foreldrið annars hevði havt rætt til. Eisini eru rættindini styrkt hjá ættleiðingarforeldrum, og tey, sum ættleiða fleiri børn samstundis, fáa nú rætt til longri barsilsfarloyvi.

Foreldur at ov tíðliga føddum børnum kunnu leingja barsilsfarloyvið við tí vikutali, barnið varð føtt undan termin. Um barnið ella mamman verða innløgd í barsilstíðini, kann farloyvið eisini leingjast við innleggingartíðini. Somu reglur eru galdandi fyri ættleiðingarforeldur.

Arbeitt verður við at gera skipanina smidligari, so foreldur kunnu býta barsilspeningin út yvir eitt longri tíðarskeið og fáa eitt bleytari skifti aftur til arbeiðslívið. Somuleiðis ætlar samgongan at broyta skipanina soleiðis, at tryggjað verður, at sjálvstøðug vinnurekandi ikki detta niður ímillum skipanirnar, so at tey altíð verða fevnd av barsilsskipanini. Uppskotið verður eftir ætlan lagt fyri Løgtingið í februar 2026.

Eisini verður nýggj kt-skipan sett í verk um ársskiftið, sum skal gera umsitingina lættari og betri fyri borgara og vinnu.

**ALS**

ALS er týðandi partur av okkara norðurlendska arbeiðsmarknaðarmodelli, sum tryggjar løntakarum arbeiðsloysisstuðul og arbeiðsgevarum atgongd til tøka arbeiðsmegi. Í vár varð lógaruppskot samtykt, ið m.a. hækkaði og javnaði mánaðarliga arbeiðsloysisstuðulin munandi, umframt at bíðidagar vórðu strikaðir og karantenur styttar. Eisini fingu fiskimenn betri treytir, tá ið fiskiskip verða løgd til umvælingar.

**Stytting av arbeiðsvikuni**

Arbeitt verður við at stytta arbeiðsvikuna. Arbeiðið hevur tikið longur tíð enn ætlað – serliga tí at tað hevur verið so nógv órógv á arbeiðsmarknaðinum. Hildið verður áfram við hesum arbeiðinum.

**Sálarligt arbeiðsumhvørvi**

Vit brúka stóran part av okkara lívi á arbeiðsplássinum, og arbeiðsumhvørvið hevur beinleiðis ávirkan á okkara trivnað, heilsu og lívsgleði. Lóggávan hevur í fleiri ár sett krøv til trygt, fysiskt arbeiðsumhvørvi. Nú setur nýggj kunngerð fyri fyrstu ferð karmar fyri sálarliga arbeiðsumhvørv-

inum. Kunngerðin setur greiðar treytir fyri, hvussu arbeiðið skal skipast, m.a. við atliti at arbeiðsbyrði, ógreiðum krøvum, høgum kensluligum krøvum, niðrandi atburði og arbeiðstongdum harðskapi.

Kunngerðin staðfestir, at arbeiðsgevarar hava ábyrgd av at skipa arbeiðið á ein hátt, sum bæði fyribyrgir og handfer viðurskifti, ið hava ávirkan á sálarliga arbeiðsumhvørvið. Arbeiðsgevarar skulu hava virkið eftirlit við arbeiðinum, og teir skulu tryggja nøktandi vegleiðingar og mannagongdir fyri, hvussu møguligar fráboðanir frá starvsfólkum skulu handfarast.

**Arbeiðsskaðatryggingarlógin**
Tá ið vanlukka hendir á arbeiðsplássinum, tryggjar Arbeiðsskaðatryggingarlógin endurgjald og neyðuga veiting. Tí er týdningarmikið, at skipanin virkar væl, serliga í truplum støðum. Seinastu tíðina hava tó verið trupulleikar og long viðgerðartíð, og tí eru fleiri broytingar gjørdar. Fyrr í ár vórðu ítøkiligar lógarbroytingar samtyktar fyri at gera mannagongdirnar skjótari og smidligari. Nú síggjast fyrstu tekin um jaliga ávirkan.

**Arbeiðsumhvørvi komandi árið**
Í ár hátíðarhalda vit, at tað eru 50 ár síðan, at fyrsta arbeiðsumhvørvislógin kom í gildi, og Arbeiðseftirlitið varð stovnað. Í hesum sambandi verður varpað ljós á evni sum sálarligt arbeiðsumhvørvi og trygdarskipanir. Samstundis verða batar og dagføringar gjørdar á økinum. Serligt fokus er á asbest, og ætlanin er at dagføra og seta nýggja lóggávu í verk fyri at tryggja trygga handfaring. Eisini verður arbeitt við at betra um arbeiðsumhvørvið hjá børnum og ungum, og við at herða krøvini til tey, sum arbeiða við tungum og vandamiklum tólum, so trygd og førleiki eru í hásæti.

*Bústaðarviðurskifti*

**Bústaðarmál**
Ein fjølbroyttur og vælskipaður bústaðarmarknaður er grundarsteinur undir einum samfelag, har fólk trívast. Men føroyski bústaðarmarknaðurin er undir trýsti; eftirspurningurin er stórur, serliga eftir smáum og bíligum bústøðum, men útboðið er ov lítið. Samgongan hevur tí miðvíst roynt at seta átøk í verk, sum kunnu styrkja karmarnar um føroyska bústaðamarknaðin, stimbra eina øking í útboðnum av bústaðaeindum og samstundis tryggja sosialu javnvágna á bústaðamarknaðinum.

Síðan landsstýrið tók við, hava bústaðarmál verið raðfest. Løgtingið samtykti í 2023 broytingar, sum betraðu fíggingarmøguleikar hjá Húsalánsgrunninum og góvu kommunum heimild at stovna bústaðafeløg og seta bústaðaskyldu í byggisamtyktir. Eisini er møguleiki at áleggja tænastugjald á tóm hús.

Samgongan fekk í vár tilmæli um, hvussu 2.000 nýggjar bústaðir kunnu byggjast fram til 2030. Tey tíggju tilmælini, undir heitinum "+2.000 í 2030", fevna m.a. um, at Bústaðir skulu byggja smærri og bíligari bústaðir til ung og lesandi, at kommunur fáa heimild at bera størri kostnað í sambandi við útstykkingar, og at seta í verk ein skattligan leigustuðul, sum er útreiðsluneutralur og javnsetur tey, sum eiga, við tey, sum leiga. Ein skattligur leigustuðul fer við tíðini at økja um útboðið av leigubústøðum, samstundis sum bøtt verður um sosialu javnvágna á bústaðarmarknaðinum. Somuleiðis hevur landsstýrið ítøkiligar ætlanir um at nýta Eirargarð 2 til lestraríbúðir í samstarvi við Bústaðir.

Farið er undir at gera ein nýggjan bústaðapolitikk, ið skal avloysa tann frá 2012, ið eftir ætlan skal verða framdur í breiðari semju millum flokkarnar á tingi.

**Leigustuðul**

Í Føroyum fáa eigarar rentustuðul, meðan leigarar ongan stuðul ella frádrátt fáa. Tey, sum eiga egnan bústað, hava sostatt ein rættiliga stóran fíggjarligan fyrimun í mun til tey, sum leiga. Eitt uppskot um leigustuðul fer at gera tað lættari fyri tey, sum leiga. Vit vita, at tey, sum leiga, hava lægri lønarinntøku, enn tey, sum eiga. Vit hava tørv á at fólk velja Føroyar til.

Leigustuðulin skal vera ein fíggjarligur stuðul til fólk, ið leiga bústað. Endamálið við leigustuðli er eisini at skapa javnvág í bústaðarmarknaðinum og tryggja, at eisini tey, sum ikki eiga sítt egna heim, fáa ein skattafyrimun líknandi tí, sum eigarar longu fáa. Í dag stuðla vit í stóran mun eigaraskapi við rentustuðli upp á 35% av rentuútreiðslum (upp til 100.000 kr. árliga). Hinvegin fáa leigarar hvørki stuðul ella skattafrádrátt, hóast teir ofta rinda ein stóran part av inntøkuni í húsaleigu.

Við leigustuðli kunnu fleiri fólk fáa betri ráð at búgva. Hetta fevnir um ung, stakar uppihaldarar, barnafamiljur og pensjónistar, sum ofta hava verri fíggjarligar umstøður. Talan er ikki um eina almanna-veiting, men ein rættvísan skattalætta, tí leigarar í dag rinda ov høgan inntøkuskatt í mun til teirra bústaðarútreiðslur. Við øðrum orðum er leigustuðul ein neyðug skattaafturbering, sum skal tryggja, at leigubústaðir eisini eru fíggjarliga atkomuligir – og at bústaðarmarknaðurin verður meira rættvísur.

**Býarskipanarmál**

Løgtingslógin um býarskipanir og byggisamtyktir er frá 1954 og er skrivað til eitt samfelag, sum var heilt øðrvísi enn dagsins Føroyar. Í mun til 1954 er í dag tørvur á eini planlóggávu, sum gevur møguleika fyri heildarplanlegging, og sum tekur atlit at náttúru- og umhvørvisvernd og setir krøv til burðardygga og skynsama lendisnýtslu. Eisini er tørvur á at dagføra lóggávuna, so at hon hóskar til nútímans tøkni og fyrisitingarhættir, og so at skipanin loyvir smidligari viðgerð av býarskipanarmálum. Arbeiðið at endurskoða lógina er byrjað, og uppskot verður lagt fyri Løgtingið í heyst.

**Tinglýsingarlógin**
Tinglýsingarlógin varð broytt í vár, so heimild er at lata skjøl inn talgilt. Fyrst varð talgild innlating tikin í nýtslu fyri vinnukundar til akfarsbókina. Hetta ger handfaringina av skjølum einfaldari, skjótari og tryggari. Talgilda akfarsbókin er fyrsta stigið til at talgilda alla tinglýsingina, og framtíðar loysnir verða brúktar til eisini at umfata fastogn og leysafæ, sum fer at gagna bæði borgarum og vinnulívi.

## LÓGAR-, ÚTLENDINGA- OG TILBÚGVINGARMÁL

*Útlendingamál*

**Nýggj útlendingalóg fyri Føroyar**
Løgmálaráðið er í ferð við saman við Udlændinge- og Integrationsministeriet (hereftir UIM) at gera uppskot til nýggja útlendingalóg fyri Føroyar. Útlendingalógin fyri Føroyar er frá 2001 og er sprottin úr donsku útlendingalógini. Danska útlendingalógin er javnan dagførd, men heilt fáar broytingar eru gjørdar í føroysku útlendingalógini síðan 2001. Føroyska samfelagið er nógv broytt viðvíkjandi útlendingum síðan 2001, serliga tey seinastu árini. Føroyska útlendingalógin er tí á nógvum økjum afturúrsigld í mun til støðuna í føroyska samfelagnum í dag.

Útlendingaøkið er felagsmál, og tað er tí UIM, sum stendur fyri arbeiðinum at gera uppskot til nýggju føroysku útlendingalógina. UIM hevur sett á stovn eina nýggja eind við fýra starvsfólkum, sum skal arbeiða við nýggju útlendingalógini burturav. Ein arbeiðsbólkur er settur við føroyskum og donskum embætisfólkum, og arbeitt verður við nýggju útlendingalógini í tøttum samstarvi við Útlendingastovuna og ein politiskan fylgibólk, sum hevur ein lim úr hvørjum flokki á Løgtingi. Arbeiðið við nýggju útlendingalógini fyri Føroyar verður væntandi liðugt á sumri 2026.

**Útlendingamál**
Talið á útlendingum í Føroyum er økt alsamt seinastu árini. Tørvurin á arbeiðsmegi innan fyri ávísar vinnugreinar, serliga byggivinnuna, fiskiídnaðin og tænastuvirksemi, hevur verið stórur, og neyðugt hevur tí verið at fara út um landoddarnar at finna hesa arbeiðsmegi.

Stóra tilflytingin av útlendingum til Føroyar hevur bæði jaligar og neiligar avleiðingar. Tilflytingin er við til at nøkta tørvin á arbeiðsmegi, sum er ein treyt fyri samfelagsbúskaparligum vøkstri. Tilflytingin av útlendingum kann eisini ríkað okkara samfelag við nýhugsan og nýmenning. Hinvegin tyngir stóra tilflytingin okkara skipanir, eitt nú dagstovnar og skúlar, tí tað eru so nógv børn, sum ikki duga føroyskt. Mentanarmunir og vantandi málførleikar hjá foreldrunum elva ofta til truplar støður í samstarvinum við dagstovnar og skúlar.

Fyri at gera tað smidligari at fáa útlendskar arbeiðstakarar til Føroyar varð Fast Track-skipan sett í gildi í november 2021. Skipanin hevur havt við sær, at nógv fleiri útlendsk arbeiðsfólk, serliga ófaklærd, eru komnir til Føroyar seinastu árini.

Talvan niðanfyri vísir talið á arbeiðs- og uppihaldsloyvum, sum eru latin fyrstu ferð frá 2021 til 1. juli 2025, og talið á uppihaldsloyvum til samfylgjandi familjur latið fyrstu ferð:

| | 2021 | 2022 | 2023 | 2024 | Pr. 01.07.2025 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Arbeiðsloyvi** | | | | | |
| ES-skipanin | 620 | 839 | 699 | 559 | 271 |
| Útlendingalógin, arbeiðsloyvi | 176 | 21 | 144 | 70 | 86 |
| Ítróttaloyvi | 45 | 23 | 51 | 45 | 30 |
| Fast Track | 60 | 635 | 372 | 421 | 269 |
| **Arbeiðsloyvi í alt** | **901** | **1518** | **1266** | **1095** | **656** |
| | | | | | |
| **Samfylgjandi familja** | | | | | |
| Hjúnafelagi o.a. | 26 | 40 | 49 | 18 | 5 |
| Børn | 22 | 78 | 76 | 48 | 11 |
| **Samf. familja í alt** | **48** | **118** | **125** | **66** | **16** |

***Viðmerking:*** *Útlendingastovan viðmerkir, at yvirskipað skal fyrivarni takast fyri tølunum, tí tey eru úr eini máls-viðgerðarskipan og ikki eini hagtalsskipan, og tí er ávís óvissa í tølunum, hóast tey eru eftirkannað. Tað er tó fatanin hjá Útlendingastovuni, at tølini vísa eina neyva mynd.*

Talvan vísir, at í 2021 vórðu 60 arbeiðsloyvir latin eftir Fast Track-skipanini, í 2022 vórðu 635, í 2023 vórðu 372, í 2024 vórðu 421 og til 1. juli 2025 vórðu 656 arbeiðsloyvir latin fyrstu ferð eftir Fast Track-skipanini. Sambært tølunum var sostatt eitt rættiliga stórt fall í talinum á arbeiðsloyvum eftir Fast Track-skipanini, sum vórðu latin fyrstu ferð, frá 2022 til 2023, men talið er nú á veg upp aftur.

Fyri at tryggja, at útlendskir arbeiðstakarar eru førir fyri at uppihalda síni familju her, setti landsstýrið í september 2023 inntøkumørk í sambandi við arbeiðsloyvir til arbeiðstakarar, sum hava familjuna við sær til Føroyar. Sambært tølunum í talvuni omanfyri hava inntøkumørkini tálmað tilflytingini av samfylgjandi familjulimum. Talið á samfylgjandi hjúnafeløgum lækkaði 63% frá 2023 til 2024, og talið á samfylgjandi børnum er lækkað 37% frá 2023 til 2024, og talið sær út til at halda fram at lækka í 2025.

Ætlanin er í komandi tingsetu at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið, sum setir krøv til arbeiðsgevarar, ið taka útlendskar arbeiðstakarar í arbeiði, sum t.d. krøv um revsiváttan, málkunnleika og tryggingar. Innleiðandi samskifti hevur verið um hetta við Vinnuhúsið.

**Delegatión sett í verk 1. september 2024**

Tann 1. september 2024 varð delegatiónin sambært Útlendingalógini sett í verk. Hetta merkir, at Útlendingastovan nú tekur avgerð í øllum umsóknum um bæði varandi loyvir og fyribils loyvir viðvíkjandi familjusameining, arbeiði (eisini eftir ítróttaravtaluni, Fast Track-avtaluni og ES-lógini), sjálvstøðugum vinnurekandi, lesandi, starvsnæmingum, granskarum, trúboðarum umframt samfylgjandi familjum og au pair.

Síðan avgerðarmyndugleikin av málunum omanfyri kom á føroyskar hendur, hevur Útlendingastovan stovnað 3005 mál. Av hesum eru 1369 mál lokað (pr. 3. juni 2025). Avgerðirnar hjá Útlendingarstovuni kunnu kærast til Udlændingenævnet.

Broytingar eru gjørdar í útlendingalógini í sambandi við delegatiónina til m.a. at lata langtíðarvisum, at krevja gjald fyri viðgerð av umsóknum og at samkoyra skráir umframt heimildir til Útlendingastovuna.

**Flóttafólk úr Ukraina**

Í apríl 2022 samtykti Løgtingið einmælt eitt uppskot um at taka ímóti 200 flóttafólkum úr Ukraina. Flóttafólkini fingu fyribils uppihaldsloyvi í Føroyum til 17. mars 2024. Á vári 2024 økti Løgtingið kvotuna til 250 loyvir.

Av tí at støðan í Ukraina er óbroytt, varð uppihaldsgrundarlagið hjá ukrainsku flóttafólkunum longt í vetur til tann 17. mars 2026. 183 ukrainar hava fingið longt síni uppihaldsloyvir. Umleið 65 ukrainar eru farnir av landinum aftur.

Øll 250 fyribils uppihaldsloyvini eru nú latin. Móttøkuskeiðið, har tikið varð móti nýggjum flóttafólkum, er sostatt lokið, og Móttøkuhúsið er latið aftur.

Av teimum 250 ukrainunum, sum hava fingið fyribils uppihaldsloyvi í Føroyum, eru 143 kvinnur, 34 menn og 73 børn. Flestu teirra búgva í Havn.

Sum heild hevur tað gingið væl at taka ímóti ukrainsku flóttafólkunum, men tað hevur kravt nógv av almennum myndugleikum, kommunum og eitt nú Reyða Krossi. Serliga trupult hevur verið at finna bústaðir til langtíðarleigu til ukrainsku flóttafólkini, tí nógvir bústaðir verða leigaðir út til ferðafólk um summarið. Støðan í vár var tí tann, at umleið 50 ukrainsk flóttafólk stóðu uttan tak yvir høvdið frá apríl/mai mánaði. Landsstýrið hevur tí gjørt avtalu um, at fyrrverandi Barnaheimið fyribils kann nýtast sum bráðfeingis bústaður til heimleys ukrainsk flóttafólk. Reyði Krossur Føroyar skipar hetta arbeiðið.

**Nýggj integratiónslóg**

Tann 1. juli 2025 kom fyrsta føroyska integratiónslógin í gildi. Partar av lógini verða tó settir í gildi í stigum. Ásetingarnar um skeið um føroysk samfelagsviðurskifti og føroyska mentan og skeið fyri foreldur um integratión av børnum koma í gildi 1. januar 2026, og ásetingarnar um kommunalar integratiónssamskiparar og trivnaðarætlan á dagstovnum koma í gildi 1. juli 2026.

Integratiónslógin gevur myndugleikum greiðar heimildir at seta í verk og fremja integratións-fremjandi átøk og setur karmarnar fyri at skipa økið best møguligt.

Yvirskipað er endamálið við integratiónslógini at betra um integratiónina hjá tilflytarum. Hetta skal gerast við at tryggja, at tilflytarar fáa møguleika at gagnnýta sínar førleikar og síni evni á ein hátt, sum gevur teimum møguleika at vera fíggjarliga sjálvbjargnir og at luttaka í samfelagnum á jøvnum føti við aðrar borgarar og í samsvari við grundleggjandi virði og siðvenjur í føroyska samfelagnum.

Løgtingslógin er galdandi fyri allir útlendingar, sum hava uppihaldsloyvi í Føroyum, tó so at skilt verður millum ymisk sløg av uppihaldsloyvi. Løgtingslógin áleggur bæði landi og kommunum at veita integratiónstilboð. Samstundis verða ymisk krøv sett til tilflytarar.

Lógin ber somuleiðis í sær, at landsmyndugleikar, kommunalir myndugleikar og privatir aktørar mugu arbeiða saman fyri at lyfta integratiónsøkið. Løgmálaráðið og Útlendingastovan fara næsta árið at raðfesta at fáa integratiónsøkið og samstarvið hesum økinum at virka so væl sum til ber.

**Altjóða menningarsamstarv og neyðhjálp**

Játtanin á fíggjarlógini fyri 2024 til altjóða menningarsamstarv og neyðhjálp var 15,7 mió. kr. Við árslok var útgoldni stuðulin soleiðis býttur:

| | |
|---|---|
| Altjóða menningarsamstarv | 9,2 mió. kr. |
| Neyðhjálp | 6,5 mió. kr. |
| **Tilsamans** | **15,7 mió. kr.** |

Stuðul til neyðhjálp snýr seg í høvuðsheitum um lívbjargandi tiltøk so sum mat, vetrarklæði, heilivág og kreppuhjálp, og stuðul til altjóða menningarsamstarv kann til dømis fevna um skúlagongd og sálarheilsu í krígsraktum økjum.

*Verkætlanarstuðul býttur eftir landi*

Í samsvari við ynskið hjá landsstýrinum um at leggja dent á stuðul til humanitert virksemi í Ukraina fóru 62% av samlaða stuðlinum til altjóða menningarsamstarv til verkætlanir í Ukraina. Átta onnur lond í Afrika, Asia og Karibiska havinum og ein heimspartur (Miðeystur og Norðurafrika) fingu 38% av verkætlanarstuðlinum til altjóða menningarsamstarv. Harav vórðu fimm lond umboðað gjøgnum verkætlanina hjá Firum (Kuba, Malavi, Sierra Leone, Jamaika og Nikaragua).



*Stuðul til neyðhjálp býttur eftir landi*
Stuðul varð latin til 18 neyðhjálparátøk, og fýra teirra vóru partur av virkisætlanini hjá Reyða Krossi Føroya, ið varð stuðlað sambært samstarvsavtalu við Føroya landsstýri. 39% av stuðlinum fóru til neyðhjálparátøk í Ukraina, og 17% av stuðlinum fór til tvey neyðhjálparátøk í Libanon. Eitt av átøkunum í Libanon var partur av virkisætlanini hjá Reyða Krossi Føroya. Sjey onnur neyðhjálparátøk vórðu stuðlað í hvør sínum landi, sum vóru Vanuatu, Armenia, Gaza, Haiti, Ísland og Sýria.




**Ráðgevandi nevndin fyri altjóða menningarsamstarv**
Nýggj ráðgevandi nevnd fyri altjóða menningarsamstarv tók við 1. apríl 2024. Ráðgevandi nevndin fyri altjóða menningarsamstarv er sett sambært § 4 í løgtingslóg nr. 44 frá 2007 um altjóða menningarsamstarv, sum sigur, at ein nevnd við fimm limum skal ráðgeva landsstýrisfólkinum at fremja lógina í verki.

Umsóknir um altjóða menningarsamstarv verða latnar ráðgevandi nevndini, sum viðger umsóknirnar og ger tilmæli til landsstýrisfólkið um stuðulsjáttan frá Føroya landsstýri.

*Lógarmál*

**Tænastugjald á tóm býli**
Løgtingið samtykti í vár eitt lógaruppskot um at geva kommununum heimild til at krevja tænastugjald fyri býli, har eingin er skrásettur at búgva sambært landsfólkayvirlitinum. Lógin kemur í gildi tann 1. januar 2026. Orsøkin til hesa heimildina er, at talið á húsum og íbúðum, har eingin er skrásettur at búgva, er vaksandi um alt landið og er nú vorðið rættiliga stórt. Serliga smærru bygdirnar uttan fyri miðstaðarøkið eru í størri ella minni mun vorðnar til økir, har fólk hava hús, sum verða nýtt sum frítíðarhús, og sum í fleiri førum verða leigað út til ferðafólk ein part av árinum. Tænastugjaldið skal hvíla í sær sjálvum. Talan er ikki um ein skatt, men gjald fyri tænastur, sum kommunan veitir býlunum í kommununi í sambandi við vatnveiting, burturveiting av kloakkvatni, burturbeining av húsarhaldsburturkasti og brandtilbúgving. Fíggjarmálaráðið ásetur á hvørjum ári eitt hámark fyri tænastugjaldið. Kravið frá kommununi fyri tænastugjald má ikki fara upp um hetta hámarkið. Í 2025 hevði hámarkið á tænastugjaldinum verið 673 kr. um mánaðin. Kommunurnar gera sjálvar av, um tær nýta heimildina at krevja tænastugjald.

Hóast kommunalu inntøkurnar av tænastugjaldinum neyvan verða so stórar samanlagt, so kann talan blíva um eina munandi upphædd hjá teimum kommunum, har lutfalsliga nógv hús standa tóm. Við løgtingslógini hevur landsstýrið lagt seg eftir at tryggja, at tey tómu býlini í kommununum ikki gerast ein áhaldandi og vaksandi eykakostnaður fyri kommunurnar. Ein slík skipan fer væntandi eisini at hava við sær ávísa fíggjarliga útjavning millum kommunurnar.

**Ættleiðingarlógin**
Tann 16. januar 2024 boðaði felagsskapurin Danish International Adoption (DIA) frá, at tey góvust at miðla altjóða fremmandaættleiðingar. DIA er einasti felagsskapur í Danmark, sum tekur sær av at miðla ættleiðingar í Danmark og harvið eisini í Føroyum. Sum avleiðing av hesum varð ættleiðingarlógin broytt. Heimildargrundarlagið fyri fyribils staðseting av einum barni, sum verður ættleitt uttan samtykki, er tryggjað. Hetta merkir, at innanlands fremmandaættleiðing nú er ein møguleiki, so at føroyingar kunnu greipast við eitt barn á innanlandslistanum.

Ættleiðingarlógin er eisini broytt soleiðis, at heimild er fingin til vega at gera samstarvsavtalu um ættleiðing við onnur Norðurlond, um hetta gerst neyðugt.

**Nýggj sterilisatiónslóg**
Galdandi sterilisatiónslóg er frá 1967 og er í nógvar mátar ótíðarhóskandi. Nýggj lóg verður orðað við tí endamáli at dagføra og nútíðmansgera galdandi lóg um sterilisatión og kastratión. Samstundis verður lógin føroyskað. Endamálið við uppskotinum er at tryggja fólki lættari atgongd til sterilisa-

tión. Talan er um eitt tilboð, og eingin heimild er at fremja inntriv, sum eru fevnd av lógini, við tvingsli. Skotið verður upp, at fólk, sum hava fylt 25 ár, kunnu verða steriliserað uttan loyvi. Fólk yngri enn 25 ár og fólk, sum ikki eru før fyri at skilja týdningin av inntrivinum, kunnu fáa loyvi til sterilisatión undir nærri ásettum treytum.

**Broyting í løgtingslóg um fólkayvirlit**
Ætlanin er at gera broyting í fólkayvirlitslógini, sum hevur til endamáls at tryggja ríkismyndugleikum í Føroyum atgongd til upplýsingar í Landsfólkayvirlitinum. Hetta er ein partur av heildarætlanini hjá Talgildu Føroyum, soleiðis at eisini ríkismyndugleikar í Føroyum kunnu brúka loysnirnar hjá Talgildu Føroyum til at veita føroyingum sínar tænastur talgilt.

**Dagføring av rættargangslógini**
Rættargangslógin er ein tann mest víðfevnda lógin, sum er galdandi í Føroyum. Rættargangslógin ásetur m.a. reglur um, hvussu dómstólarnir viðgera revsimál og sivilmál, og nær og hvussu politiið kann kanna mál. Eisini ásetur rættargangslógin m.a. reglur um viðgerð av faðirskapsmálum, foreldramyndugleikamálum og verjumálum.

Dómstólarnir, ákæruvaldið og politiið eru framvegis undir donskum málsræði, og tað hevur stóran týdning, at rættargangslógin fyri Føroyar verður dagførd regluliga og broytt í samsvari við, at broytingar verða gjørdar í øðrum lógum, sum krevja fylgibroytingar í rættargangslógini.

Justitsministeriet er í samstarvi við løgmálaráðið farið undir arbeiðið at dagføra rættargangslógina fyri Føroyar. Umframt at fremja broytingar, sum eru neyðugar orsakað av broytingum í løgtingslógum og lógum undir donskum málsræði, verða broytingar framdar við tí endamáli at einfalda ávísar partar av rættarganginum og at minka um viðgerðartíðina hjá dómstólunum.

**Nýtt fongsul í Føroyum**
Á heysti 2024 varð avgjørt, at nýggja fongslið í Føroyum verður staðsett við Áir í Sunda kommunu. Løgmálaráðið fylgir arbeiðinum, og gott samstarv er millum føroyskar og danskar myndugleikar.

Við nýggja fongslinum er ætlanin, at so at siga allir føroyingar skulu kunna sita dómin í Føroyum. Hetta hevur stóran týdning fyri endurmenningina av føroyskum fangum, tí nógv bendir á, at tað hevur ringa ávirkan á føroysku fangarnar at verða sendir til Danmarkar, har teir koma í samband við eitt ráari kriminelt umhvørvi. Harafturat er tað at verða sendur av landinum fyri at sita dómin eitt slag av tvífaldari revsing.

**Nýggj avtala um býtið av sektum millum landskassan og ríkiskassan**
Ásett er í § 50 í revsilógini, at sektir falla til ríkiskassan, og tað er tí útgangsstøði. Løgmálaráðið og Justitsministeriet hava arbeitt við at broyta býtið av sektum millum landskassan og statskassan. Arbeiðið er nú komið á mál, og Føroya Landsstýri og danska stjórnin hava 15. juni skrivað undir nýggja avtalu um býtið av sektum. Avtalan hevur við sær, at frá 1. januar 2026 fara inntøkur frá sektum og inndráttum, sum verða álagdar ella dømdar eftir lóggávu í yvirtiknum málum, í landskassan, og inntøkur frá sektum og inndráttum, sum verða álagdar ella dømdar eftir lóggávu í felagsmálum, fara í statskassan. Undantikið hesa avtalu eru inntøkur, sum stava frá handhevjingini hjá løgregluni í Føroyum av føroysku ferðslulógini. Tær fara framvegis í statskassan.

**Talgild valkort**
Arbeiðið at menna talgilt valkort at leggja í Skjáttuna er farið í gongd. Tað er Talgildu Føroyar, sum hevur ábyrgd av arbeiðinum. Í verkætlanini eru løgmáláráðið, Umhvørvisstovan, Fólkakirkjan og kommunurnar.

**Broyting í revsilógini. Ásetingar um sálarligan harðskap, tráfylging og ágang móti alment settum starvsfólkum settar í gildi.**
Sálarligur harðskapur hevur álvarsligari mein og drúgvari avleiðingar við sær enn likamligur harðskapur og er altíð, har onnur sløg av harðskapi eru. Tráfylging er serligt slag av sálarligum harðskapi, ið hevur stórar avleiðingar fyri lívið og gerandisdagin hjá tí, sum er fyri tráfylging. Við broytingini fáa sálarligur harðskapur og tráfylging sjálvstøðugar ásetingar í revsilógini. Hetta ger tað samstundis greitt, at talan er um álvarslig brotsverk, sum vit sum samfelag undir ongum umstøðum kunnu góðtaka. Samstundis sum sálarligur harðskapur er vorðið eitt sjálvstøðugt brotsverk í revsilógini, er broyting somuleiðis gjørd í frástøðuboðslógini, so at frástøðuboð eisini kann áleggjast, um ein persónur hevur framt sálarligan harðskap.

Við lógarbroytingini fáa alment sett starvsfólk eisini betri verju móti ónáðum og ágangi, tí tað hevur alstóran týdning, at alment sett starvsfólk uttan ótta og vanda fyri at verða fyri ágangi kunnu útinna sítt starv.

**Rúsdrekkalógin**
Í Føroyum hava vit eina avmarkandi rúsdrekkalóggávu, sum hevur til endamáls at tálma nýtsluna og at minka um skaðan á einstaklingin og samfelagið. Hagtølini vísa, at síðan Rúsdrekkasøla Landsins læt upp, hava fólk drukkið minni av sterkum brennivíni og spyrja eftir veikari rúsdrekka av betridygd í staðin. Skipanin er góð, og gongdina vilja vit hava at halda fram. Matstovuvinnan hevur tó eftirlýst at kunna keypa rúsdrekka beinleiðis úr útheimi, uttan um einkarsøluna. Hetta verður ikki mett hava neiliga ávirkan á nýtsluna, men kann hava nógv at siga fyri ferðavinnuna.

Ferðavinnan hevur stóran týdning fyri skapa ein fjøltáttaðan og mótstøðuføran búskap og tí fara vit at virka fyri at broyta rúsdrekkalógina, so vinnan fær betri karmar at virka eftir.

**Nýtt útoyggjaálit**
Løgmálaráðið hevur seinasta árið arbeitt við at orða eitt nýtt útoyggjaálit, sum snýr seg um útoyggjarnar Fugloy, Svínoy, Kalsoy, Mykines, Hest, Koltur, Skúvoy og Stóru Dímun.

Álitið lýsir høvuðsavbjóðingarnar og møguleikarnar á útoyggjunum og leggur upp til, at politiska skipanin setur sær seks málsetningar fyri útoyggjarnar. Fyrst ein yvirskipaðan málsetning um at orða eina framtíðarhugsjón við breiðari politiskari semju um, hvønn leiklut útoyggjarnar hava í føroyska samfelagnum komandi áratíggjuni. Eitt nú má gerast av, í hvønn mun útoyggjar skulu kunna rúma fastbúgvandi fólki, summarhúsum, ferðavinnu, landbúnaði ella eini blanding av øllum hesum. Afturat yvirskipaða málsetninginum eru fimm málsetningar fyri hvørt av kjarnuøkjunum samferðslu, búseting, undirstøðukervi, heilsutænastur og vinnuligar møguleikar.

Álitið lýsir eisini í fleiri smálutum týdningarmestu avbjóðingarnar og menningarmøguleikarnar á føroysku útoyggjunum. Tvørtur um øll evni er ein felags og grundleggjandi trupulleiki eyðsýndur: avmarkaðu samferðslumøguleikarnir millum meginøkið og útoyggjarnar, sum ofta gera tað torført hjá útoyggjabúgvum at røkka tænastum, hava arbeiði, ganga í skúla ella taka lut í samfelagnum á nøktandi hátt. Hetta rakar eisini trivnaðin, heilsutænasturnar og vinnuligu menningina. Um ikki samferðslan gerst betri, verður torført hjá øðrum viðurskiftum at mennast stórvegis.

Flestu avbjóðingarnar á útoyggj kunnu loysast, men tað krevur, at politiska skipanin raðfestir hetta fíggjarliga. Útoyggjarnar mugu síggjast sum ein samfelagsíløga heldur enn ein útreiðsla. Útoyggjarnar kunnu gerast eitt týdningarmikið samfelagsligt og mentanarligt tilfeingi, sum vit hava skyldu at røkja bæði av sosialum, umhvørvisligum og samfelagsbúskaparligum orsøkum.

Farið verður nú undir eina politiska viðgerð av tilmælunum í álitinum.

*Tilbúgvingarmál*

**Haga-samstarvið**
Tilbúgvingarøkið varð yvirtikið í 2007. Nógv er hent seinastu árini. Veðurlagsbroytingar eins og trygdarpolitisk atlit gera, at vit hava stóran tørv á at samstarva við grannar okkara, so vit standa saman um at avmarka vandan av hóttanum, ið kunnu taka seg upp.

Haga-samstarvið er eitt norðurlendskt samstarv um tilbúgving. Føroyar hava seinastu árini virkað fyri, at vit kunnu luttaka í Haga samstarvinum á jøvnum føti við onnur Norðurlond, og hetta sær nú

út til at fara at bera á mál. Á fundi millum norðurlendsku forsætisráðharrarnar í Finnlandi síðst í mai var semja um felags yvirlýsing, har fullur stuðul verður latin Føroyum, Grønland og Álandi til at kunna luttaka í samstarvinum. Væntandi verður føroyskur limaskapur veruleiki innan alt ov langa tíð, og vit vilja áhaldandi virka fyri fullum limaskapi.

Eisini er at fegnast um, at Føroyar síðan í fjør heyst hava verið við í nýstovnaða Nordic Security of Supply Network, ið er eitt samstarv millum Norðurlond um veitingartrygd.

**Váðameting fyri Føroyar**
Í kjalarvørrinum av øktu óvissuni í okkara parti av heiminum, m.a. orsakað av krígnum í Ukraina, er tað natúrligt, at eisini vit í Føroyum seta okkum spurningin, um vit eru til reiðar, skuldi støðan versnað, og um kríggj skuldi brostið á.

Tað er tó soleiðis, at kríggj í dag ikki neyðturviliga er eitt álop við konventionellum vápnum ella ein innrás av fíggindasinnaðum hermonnum. Kríggj í dag kann eisini vera netálop, upplýsingar-falsan, politisk ávirkan og álop ella ávirkan á talgildar og fysiskar veitingar og ymiskt annað, ið kann økja um okkara sárbæri og hava neiliga ávirkan á gerandisdagin hjá okkara borgarum umframt ávirkan á virkisførið í samfelagnum. Tískil er tað trupult, fyri ikki at siga ógjørligt, at tosa um kríggj sum eina einstaka og einsháttaða hending.

Tað er júst hetta fjølbroytni, sum ger, at einki einfalt svar finst, men vit kunnu tó staðfesta, at vit sum land hava væl skipaða tilbúgving og dugnaligar myndugleikar, sum dagliga arbeiða við at tryggja okkara samfelag, ikki einans í samband við tær siðbundnu hendingarnar, men sanniliga eisini viðvíkjandi óvæntaðum og umfatandi hendingum.

Fyri at fáa eina væl grundaða meting av okkara førleikastøði er ein váðameting fyri Føroyar í umbúna, so vit kunnu arbeiða meiri skipað og miðvíst við at menna tilbúgvingina í Føroyum. Tilbúgving er ikki nakað, sum bert liggur á herðunum hjá yvirskipaðum myndugleikum. Tilbúgving er ein felags ábyrgd, sum krevur, at bæði almennir myndugleikar og stovnar, privat virki og húski eru partar av. Húsarhaldini skulu tí eisini hugsa um, hvussu tey skulu vera útgjørd og bera seg at, um náttúruvanlukkur, arbeiðsósemjur ella kríggj gera tað trupult at fáa neyðsynjarvørur o.s.fr.

Arbeiðs- og brunaeftirlitið er komið væl áleiðis við at orða føroysku tilmælini til heimatilbúgvin, ið eru ein liður ella ein avleiðing av arbeiðnum at gera eina føroyska váðamynd. Ætlanin er, at tilmælini skulu almannakunngerast um hálvan august 2025.

LØGMANSSKRIVSTOVAN

Prime Minister´s Office

# Løglisti 2025

**LØGMANSSKRIVSTOVAN**

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av tvingsli í psykiatri og rúsandi evni)**
Landsstýrið ætlar at yvirtaka málsøkini "rúsandi evni" og "tvingsli í psykiatri" við støði í álitinum um møguliga yvirtøku av uppgávunum hjá landslæknaembætinum og ávísum øðrum málsøkjum. Talan er um lóggávu innan fyri málsøkið hjá landsstýriskvinnuni í heilsumálum, og Heilsumálaráðið fyrireikar uppskotið, sum løgmaður leggur fyri Løgtingið. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkinum flogferðsla)**
Uppskotið hevur til endamáls at yvirtaka málsøkið flogferðsla. Til tess at tryggja, at málsøkið verður yvirtikið á mest skynsama hátt, verður yvirtøkan framd í stigum. Hetta merkir, at einstøku partarnir av málsøkinum koma á føroyskar hendur, so hvørt føroyskir myndugleikar í samskifti við danskar myndugleikar taka ábyrgd av hesum. Hetta er treytað av, at danskir myndugleikar útvegað sær heimild til at býta málsøkið flogferðsla sundur, og lógaruppskot hesum viðvíkjandi verður væntandi lagt fyri Fólkatingið í heyst. Talan er um lóggávu innan fyri málsøkið hjá landsstýriskvinnuni í uttanríkis- og vinnumálum, og Uttanríkis- og vinnumálaráðið fyrireikar uppskotið, sum løgmaður leggur fyri Løgtingið. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í lov om en investeringsfond for Færøerne m.v.**
Uppskotið gevur Íleggingargrunninum heimild til at kunna veita rentu- og avdráttarfrítt lán til P/f Suðuroyartunnil og P/f Vága Floghavn. Harumframt verður ásett, at Íleggingargrunnurin, sum varð avhendaður til føroysku myndugleikarnar tann 1. januar 2025, skal halda fram sum sjálvstøðugur almennur grunnur.

**Uppskot til løgtingslóg um at fyrireika og projektera undirsjóvartunnil millum Suðuroy og Sandoy við hartil hoyrandi vegagerð v.m.**
Uppskotið gevur P/F Suðuroyartunnil heimild til at prosjektera og senda verkætlanina um undirsjóvartunnil millum Suðuroy og Sandoy við har tilhoyrandi vegagerð v.m. í útboð. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

## FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

*Játtanar- og roknskaparviðurskifti*

**Uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri 2026**
Samsvarandi stýrisskipanarlógini skal landsstýriskvinnan fyri 1. oktober á hvørjum ári leggja uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri Løgtingið fyri komandi álmanakkaár. Uppskotið verður lagt fyri tingið 30. september 2025.

**Uppskot til játtanarkarmar fyri 2027–2031**
Sambært játtanarskipan landsins skal landsstýriskvinnan leggja fram uppskot til løgtingssamtykt fyri 1. apríl, sum fevnir um ein samlaðan játtanarkarm fyri fíggjarlógina næsta ár. Uppskotið verður lagt fyri tingið 31. mars 2026.

**Uppskot til løguætlan fyri landið**
Arbeitt verður við einari langtíðarløguætlan við tí endamáli at tryggja so góða langtíðarætlan og samskipan av verkætlanunum sum møguligt. Ætlanin er at skipa eina breiða politiska tilgongd fyri at gera eina løguætlan, sum røkkur yvir 10 ár ella meira. Uppskot til samtyktar verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um landsins játtanarskipan og í løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald v.m.**
Arbeitt verður við at endurskoða játtanar- og roknskaparligu meginreglurnar. Tað snýr seg serliga um møguleikan fyri avskrivingum, at flyta avlop og hall fram og at leggja ætlanir fleiri ár fram. Samstundis verða gjørdar nakrar tillagingar í játtanarskipanini, nýggj játtanarsløg o.a.

Arbeitt verður við nøkrum fyriskipanum um fíggjarpolitiska stýring av almenna búskapinum, t.d. at áseta hámark fyri útreiðsluvøkstri, játtanarkarmar fyri fleiri ár og haldførismetingar. Ein partur av fyriskipanunum verður væntandi tikin við í játtanarskipanina. Uppskot verða løgd fyri tingið á heysti 2025 og á vári 2026.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um Búskaparráð**
Frá 2026 er ætlanin, at Búskaparráðið bert skal gera eina konjunkurfrágreiðing um árið. Ístaðin skal orka leggjast í at gera eina temafrágreiðing um heystið. Harumframt er ætlanin at leggja onkrar uppgávur til Búskaparráðið sum part av fyriskipanum um fíggjarpolitiska stýring. Til dømis haldførismetingar, metingar av fíggjarlógini og eftirlitsuppgávur. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Frágreiðing til aðalorðaskifti um fíggjarpolitiskt haldføri**
Búskaparráðið gav út eina temafrágreiðing í 2024 um fíggjarpolitisk haldføri hjá føroyska búskapinum. Frágreiðingin verður nú dagførd og eftir ætlan almenn fyrst í 2026. Í hesum sambandi verður frágreiðingin løgd fram til aðalorðaskifti í Løgtinginum. Frágreiðingin verður løgd fram á vári 2026.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um grannskoðan av landsroknskapinum v.m.**
Ætlanin er at leggja onkrar uppgávur til Landsgrannskoðanina sum part av fyriskipanum um fíggjarpolitiska stýring. Til dømis ábyrgd av øllum roknskapum hjá landinum (konsernábyrgd) og eftirlit við útreiðsluvøkstri o.tíl. Uppskotið verður lagt fyri tingið á vári 2026.

*Skattir, avgjøld o.a.*

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn (AMEG)**
Stýrið fyri Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin hevur heitt á Fíggjarmálaráðið um at leggja uppskot fyri tingið, sum dagførir verandi løgtingslóg, serliga við atliti at Norðurlendsku Sosialkonventiónini. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um veg- og umhvørvisgjøld á motorakførum o.a. (Vegskattalógin)**
Ætlanin er at endurskoða vegskattalógina. í hesum sambandi at taka atlit til m.a. brennievni, vekt og kostnað. Uppskotið verður lagt fram í vár.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (mvg-frítøka av gerandisvørum)**
Við uppskotinum verður farið undir at endurskoða undantøkini í meirvirðisgjaldslógini. Í hesum sambandi verður kannað, í hvønn mun til ber at tillaga meirvirðisgjaldið á gerandisvørum. Tillagingar verða fult fíggjaðar og framdar soleiðis, at tað ber til hjá TAKS at fremja munagott eftirlit. Harumframt er ætlanin at gera nakrar aðrar nágreiningar í lógini í hesum sambandi. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um tonsaskatt**
Við uppskotinum verða verandi ásetingar um time-charter (t.v.s. leiga av skipi við manning) endurskoðaðar, soleiðis at tað í størri mun verður tikin hædd fyri tíðarnýtslu í sambandi við umvæling og nýbygging av skipum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)**
Í sambandi við, at galdandi reglur um umbýti av fíggjarkontum við tilknýti til útheimin skulu uppstigast og víðkast, er tørvur á at gera broytingar í skattalógini fyri at hesar broytingar kunnu fremjast í verki. Harnæst er tørvur á at víðka galdandi reglur um fríar ágóðar frá bert at skatta faktiska nýtslu av fríum ágóðum til at skatta virðið av at hava ágóðar tøkar. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um eftirløn (eftirlønarlógin)**
Endamálið við lógaruppskotinum er at dagføra lógina og at lætta um umsitingina av lógini fyri TAKS, eftirlønarveitarar og borgarar. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um stuðul til rentuútreiðslur av lánum**
Í sambandi við haldførisarbeiðið, har allir flokkar luttaka, verður arbeitt við at endurskoða rentu-stuðulin stigvíst yvir nøkur ár. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í heyst.

**Løgtingslóg um at krevja inn, innheinta og rokna rentu av krøvum hjá landinum**
Í sambandi við stóru kt-verkætlanina hjá TAKS, Kjarnin, verða allar mannagongdir endurskoðaðar fyri at gera raksturin skynsamari. Ein liður í arbeiðinum er at gera galdandi reglur um at krevja inn, innheinta og at rokna rentu av krøvum hjá landinum einfaldari og einsháttaðar. Einfaldar og eins-háttaðar reglur fyri krøv hjá tí almenna kunnu samstundis virka fyri, at fleiri mál verða avgreidd sjálvvirkandi í nýggju skipanini. Uppskot verður lagt fyri tingið á vári 2026.

**Uppskot til broyting í Løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap (Veiðigjaldslógin)**
Ásetingarnar í verandi lóggávu kunnu hava avleiðingar, sum eyðsæð ikki eru tilætlaðar; t.d. at veiðigjaldið lækkar, hóast prísurin er høgur og kostnaður lágur vegna effektivari fiskiskap. Neyð-ugt verður at gera aðra skipan uttan hesi lýti, sum tekur fyrilit fyri avleiðingum fyri vinnuna, um kvotan minkar serliga nógv. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til broyting í Løgtingslóg um toll (tolllógin)**
Neyvari heimild í sambandi við at lata sínámillum upplýsingar og aðrar tekniskar broytingar. Uppskotið verður lagt fyri tingið á vári 2026.

**Lóg um javning av skattum og avgjøldum**
Stigvaksandi trinini í inntøkuskattinum og avgjøld, sum eru krónur pr. eind, fylgja ikki við prís- og lønargongdini í samfelagnum. Veruligi skatturin broytist tískil við tíðini, uttan at løgtingið hevur avgjørt tað. Ætlanin er tí at samtykkja lóg, sum ásetir, hvussu skattastigin og avgjøld verða javnað, so tey yvir tíð fylgja prís og lønargongdini í samfelagnum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

## UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um nettrygd**
Sum liður í nettrygdarætlanini verður lagt fram uppskot um nettrygdarlóg, sum tekur støði í felags-evropeisku NIS2-fyriskipanini, tó at ásetingarnar verða lagaðar til føroysk viðurskifti. Lógaruppskotið hevur til endamáls at styrkja net-kreppustýringina, økja mótstøðuførið og minka um samfelagsavleiðingarnar, um álop henda. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um stutttíðarleigu**
Stuttíðarleigumál eru sum útgangsstøði eitt vinnumál, men avleiðingarnar fyri bústaðarmarknaðin gerast alt sjónligari. Lógaruppskotið, sum verður evnað til saman við Umhvørvismálaráðnum, hevur til endamáls at skipa karmar um hetta virksemi. Uppskotið verður lagt fyri tingið komandi vár.

**Uppskot til løgtingslóg um ársroknskap**
Endamálið við uppskotinum er at fáa til vegar nýggja ársroknskaparlóg á føroyskum, sum er í samsvari við tær broytingar, sum eru gjørdar við nýggja roknskapardirektivinum hjá ES og við nýggjastu altjóða standardunum (IFRS). Bæði grannskoðarar og Skráseting Føroya hava víst á greiðan tørv á hesum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðaravirki, vinnufelagalógini, lóg um vinnurekandi fyritøkur, lóg um vinnurekandi grunnar, løgtingslóg um tryggingarvirksemi**
Talan er um broytingar, sum standast av nýggju ársroknskaparlógini. Harafturat verður fingin til vega heimild at lata grannskoðarar fáa serstaka góðkenning at grannskoða burðardygdarfrágreiðingar í samsvari við ES-reglur. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um løggilding av handverksmeistarum í byggivinnuni**
Lógaruppskotið hevur til endamáls at tryggja, at handverksmeistarar, sum bjóða seg fram at byggja fyri onnur, eru løggildir og hava staðið ta útbúgving, sum krevst fyri at gerast løggildur handverks-meistari. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Føroyska Altjóða Skipaskráseting**
FAS-lógin verður broytt soleiðis, at krøvini til eigarar verða í samsvari við altjóða skipaskrásetingar í grannalondunum, eins og fleiri skyldur verða lagdar á umboðsfólkini, tá ið skip verða skrásett í FAS. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um bjargingarútgerð á opnum bátum og førum undir 20 tons**
Til tess at økja um trygdina á útróðrarbátum verður ásett, at teir skulu hava AIS-útgerð (klassi B) umborð. Uppskotið verður gjørt eftir áheitan frá útróðrarfeløgunum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um burðardygga ferðavinnu**
Galdandi skipan við at avrokna burðardygdargjaldið eina ferð um mánaðin er umsitingarliga trupult og kostnaðarmikið, og tí er neyðugt at gera hetta einfaldari. Samstundis verða ásettar reglur um m.a. kravdar upplýsingar, innheintan og pant. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu**
Talið á grágás er vaksið nógv seinastu árini, og fuglurin kann partvíst metast sum búfuglur. Stóri stovnurin er ein bági fyri landbúnaðin, og lógaruppskotið hevur til endamáls at fáa til vegar heimild at veiða grágás í avmarkaðan mun. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um broyting í Lov for Færøerne om luftfart**
Í sambandi við yvirtøkuna av málsøkinum flogferðsla verður Lov for Færøerne om luftfart broytt soleiðis, at danski samferðslumálaráðharrin fær til vegar heimild at lata málsøkið verða yvirtikið í stigum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

## ALMANNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir (hækka pensjónsaldurin og tíðartreytað pensjón)**
Landsstýrismaðurin fer at leggja uppskot fyri Løgtingið um at hækka fólkapensjónsaldurin – galdandi frá 2035. Samstundis verður uppskot lagt fyri Løgtingið um tíðartreytaða pensjón, soleiðis at tey, sum frá heilt ungum árum hava verið arbeiðsvirkin, frá 2035 fáa møguleika at fara av arbeiðsmarknaðinum við fólkapensjón, áðrenn tey røkka ásetta fólkapensjónsaldrinum. Lógaruppskotini verða eftir ætlan løgd fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir (um- og eftirrokning av fólkapensjón)**
Fyri at sleppa undan trupulleikanum við stórum eftirrokningum til fólkapensjonistar verður nú farið yvir til eina skipan, har fólkapensjónin hvønn mánað verður ásett við støði í inntøkuni hjá fólkapensjonistinum seinastu 12 mánaðirnar. Á henda hátt verður fólkapensjónin javnað, so hvørt sum inntøkuviðurskiftini hjá fólkapensjonistinum broytast. Lógaruppskot verður væntandi lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir (eftirlønarviðbót til fólkapensjonistar, sum hava verið fyritíðarpensjonistar áðrenn fólkapensjónsaldur)**
Landsstýrismaðurin fer at leggja uppskot fyri Løgtingið um at broyta almannapensjónslógina soleiðis, at eftirlønarviðbót verður veitt teimum fólkapensjonistum, sum frameftir flyta frá fyritíðarpensjón til fólkapensjón. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur (hækkað endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sambært § 25 í almannalógini)**
Í 2024 hækkaði hægsta upphædd frá Barsilsskipanini til 30.000 kr. um mánaðin. Samstundis er hægsta endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku sambært § 25 í almannalógini bara 27.779 kr. um mánaðin. Landsstýrið ætlar, at hesar báðar upphæddirnar skulu vera tær somu, og tí verður uppskot lagt fyri tingið í heyst um eisini at hækka upphæddina í § 25 í almannalógini til 30.000 kr. um mánaðin.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagpening vegna sjúku v.m.**
Landsstýrið hevur í samgonguskjalinum sett sær fyri at endurskoða rættin hjá smærri vinnufyritøkum til sjúkradagpengaskipanina. Landsstýrismaðurin fer tí at leggja uppskot fyri Løgtingið um at geva smærri vinnurekandi møguleika at fáa endurrindaðan stóran part av lønarútreiðslunum til starvsmenn, ið gerast langtíðarsjúkir. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um bráðfeingis bústaðir og serreglur á almannaøkinum fyri burturriknar ukrainar**
Landsstýrismaðurin fer at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið, sum skipar karmarnar og ábyrgdarbýtið rundan um bráðfeingis bústaðirnar til burturriknu ukrainarnar. Við uppskotinum fær landsstýrismaðurin eisini heimild at áseta serreglur á almannaøkinum, sum víkja frá vanligu reglunum innan fyri ávís, nærri tilskilað økir. Hetta fyri at tryggja, at burturriknu ukrainarnir ikki detta niður ímillum tær mest grundleggjandi almennu skipanirnar. Lógaruppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til verklagslóg um at byggja sambýli til fólk við autismu við Rygsá á Argjum**
Ætlanin er at byggja eitt nýtt sambýli við Rygsá á Argjum til vaksin fólk við autismu. Sambýlið verður bygt í fýra eindum og er til 24 fólk. Seks fólk skulu búgva í hvørjari eind. Bygningurin skal eftir ætlan vera liðugur á vetri 2027. Uppskotið til verklagslóg verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um javnstøðu millum kvinnur og menn**
Landsstýrið hevur sett sær fyri at endurskoða og nútíðargera javnstøðulógina. Ætlanin er m.a. at fáa eina javnstøðulóg, sum – umframt at banna mismuni – eisini virkar fyri at fremja javnstøðu. Samstundis eru ynski um at fáa greiðari ásetingar um Javnstøðuskrivstovuna umframt nýggjar ásetingar um kynsligan ágang og javnstøðusamtáttan. Miðað verður ímóti at leggja eitt lógaruppskot fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. (Ábyrgdin av dagtilboði og umlætting til fólk við demensi undir fólkapensjónsaldur verður flutt til kommunurnar)**
Landsstýrismaðurin fer at leggja uppskot fyri Løgtingið, har ábyrgdin at veita dagtilboð og umlætting til fólk undir fólkapensjónsaldur við demensi verður flutt frá landinum til kommunurnar. Uppskotið verður lagt fyri Løgtingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um miðlastuðul**
Í samgonguskjalinum stendur, at miðlalandslagið skal styrkjast, og at miðlastuðulsskipan skal stuðla undir hetta. Arbeitt verður tí við at endurskoða verandi miðlastuðulsskipan. Eitt lógaruppskot um hetta verður væntandi lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til verklagslóg um at umvæla Listasavn Føroya**
Listasavn Føroya hevur tørv á týðandi umvælingum umframt útbygging og nútímansgering. Aftrat væntaða stuðlinum frá landinum hevur Listasavnið fingið tilsagnir um stuðul til verkætlanina frá Tórshavnar kommunu og útlendskum grunnum. Tá ið útboðið hevur verið í heyst, fer landsstýrismaðurin at leggja uppskot til verklags- og heimildarlóg fyri Løgtingið. Hetta verður væntandi gjørt í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um heimild til at útvega uttanhýsis fígging til at byggja tjóðleikhús**
Ætlanin er at leggja uppskot til eina verklags- og heimildarlóg fyri Løgtingið, sum setur eina ávísa upphædd av til verklagið, og sum gevur landsstýrismanninum heimild at taka ímóti fígging frá útlendskum grunnum til tjóðleikhúsið.

**Uppskot til verklagslóg um at skipa Koltur sum savnsoyggj**
Landið fekk í 2022 heimild at fíggja 9 mió. kr. av Koltursætlanini hjá Tjóðsavninum. Fíggingin úr landskassanum er tó treytað av, at Tjóðsavnið fær uttanhýsis fígging til restina av ætlanini, sum er mett at kosta 65 mió. kr. tilsamans. Endamálið við Koltursætlanini er at bjóða føroyingum og útlendingum eina einastandandi uppliving, ið lýsir samspælið millum náttúru og menniskju í Koltri í meir enn 1000 ár. Uppskot til verklagslóg um Kolturætlanina verður lagt fyri Løgtingið í heyst.

## FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)**
Við uppskotinum er ætlanin at dagføra og nágreina ásetingar, m.a. heimildir at skipa fiskiskap og at seta inn heimildir at fremja føroyskar skyldur sambært fiskiveiðiavtalum við onnur lond. Harumframt er ætlanin at gera tekniskar tillagingar av ávísum ásetingum í verandi lóg. Uppskotið verður eftir ætlan lagt fyri tingið í heyst.

**Frágreiðing til aðalorðaskiftis um sjófeingi**
Sambært sjófeingislógini leggur landsstýrismaðurin áðrenn 20. februar á hvørjum ári fyri Løgtingið frágreiðing um fyrisiting av sjófeingi og teimum veiðirættindum, Føroyar hava uttan fyri føroyskan sjógv, og hvørjar ætlanir hann hevur í hyggju at fremja. Uppskotið verður latið Løgtinginum í februar 2026.

**Uppskot til samtyktar um nýggjan karmsáttmála millum Føroyar og Grønland**
Føroyar og Grønland hava seinastu árini samráðst um at dagføra karmsáttmálan millum londini, sum er frá 1997. Eftir ætlanin verður sáttmálin undirritaður og lagdur fyri Løgtingið á heysti 2025.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu (ferðslulógin)**
Eftir áheitan frá summum av teimum størru kommununum verður arbeitt við at geva kommununum heimild í ferðslulógini til at taka gjald fyri parkering. Ferðslutrýstið økist støðugt, og tað hevur við sær, at eftirspurningurin eftir parkeringsplássum økist. Tá kann gjaldsparkering vera eitt gott amboð hjá kommununum at hava. Uppskotið verður eftir ætlan latið Løgtinginum á vári 2026.

**Frágreiðing um koyrikort**
Í vár samtykti Løgtingið uppskot til samtyktar um avtalur við onnur lond um koyrikort, har landsstýrismaðurin verður biðin um at lata tinginum frágreiðing um nýtslu av føroyska koyrikortinum uttanlands og útlendskum koyrikortum í Føroyum. Frágreiðingin verður løgd fyri Løgtingið á vári 2026.

**Lóg um skaðanevnd**
Arbeiðið við at gera eina nýggja løgtingslóg um skaðanevnd er væl ávegis. Miðað verður eftir, at uppskotið verður latið Løgtinginum í heyst.

**Nýggj farleið til Tjørnuvíkar**
Um neyðug játtan fæst til vega, verður uppskot til løgtingslóg um nýggja farleið til Tjørnuvíkar løgd fyri Løgtingið í heyst.

**Brúgvin um Streymin**
Um neyðug játtan fæst til endamálið, verður uppskot til løgtingslóg (verklagslóg) um at umvæla brúnna um Streymin løgd fyri Løgtingið í heyst.

**Strandfaraskip landsins**
Uppskot til løgtingslóg (verklagslóg) um at byggja kalsoyarferju. Ætlanin er, at lógaruppskotið verður lagt fyri Løgtingið í heyst.

## HEILSUMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at broyta "Lov om sundhedsvæsenet på Færøerne"**
Tørvur er á fáa strikað § 2 í lov om sundhedsvæsenet på Færøerne. Henda grein ásetur, nær ein persónur hevur rætt til heilsutænastur við heimild í rammulógini, og har landsstýrið hevur avmarkaðar møguleikar at áseta, nær persónar hava rætt til heilsutænastur í føroyska heilsuverkinum. Tað er til dømis ein avbjóðing, at føroyska heilsuverkið ikki kann bjóða persónum, sum flyta til Føroya, viðgerðir ella tænastur fyrr enn seks vikur eftir, at tey eru flutt. Heldur ikki er tað møguligt, at t.d. børn hjá føroyingum undir útbúgving uttanlands kunnu verða koppsett ókeypis, tá ið tey eru stødd fyribils í Føroyum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til broyting í løgtingslóg um almenna heilslustrygd (flyta innkrevjing, ábyrgd og málsviðgerð av heilsutrygdargjaldi til TAKS at umsita)**
Í heilsutrygdarlógini er ásett, at TAKS krevur heilsutrygdargjaldið inn fyri Heilsutrygd, men tað er Heilsutrygd, sum rindar kostnaðinum av hesum. Sostatt er tað TAKS, sum skipar og umsitur innkrevjingina av heilsutrygdargjaldinum, men Heilsutrygd hevur ongan leiklut í sjálvari innkrevjingini. Endamálið við broytingini er at flyta innkrevjing, ábyrgd og málsviðgerð av heilsutrygdargjaldi til TAKS at umsita. Uppskotið verður lagt fram í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um farsóttarøkið**
Farsóttarmálsøkið varð yvirtikið tann 1. januar 2024. Í hesum sambandi er neyðugt at fara undir at tilevna eina føroyska farsóttarlóg. Í løtuni er danska lógin: "Anordning for Færøerne af lov om foranstaltninger mod smitsomme og andre overførbare sygdomme" galdandi við teimum broytingum, ið vóru gjørdar viðvíkjandi myndugleikaflytingum vegna yvirtøku av farsóttarmálsøkinum í løgtingslóg nr. 41 frá 29. mars 2023. Í tíðini undir koronufarsóttini mátti tíðum staðfestast, at stórur tørvur var á eini dagførdari lóg. Uppskotið verður lagt fram í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjúkrahúsverkið (ásetingar um kanningar av ílegusjúkum)**
Í tilmælinum um ílegukanningar, sum landsstýriskvinnan fekk handað í mars í ár, verður mælt til, at berarakanning fyrst og fremst verður bjóðað pørum, ið planleggja at fáa barn. Harumframt er eitt aldurskrav, sum í útgangsstøðinum er 18-45 ár. Hesi krøv víkja frá meginreglunum um ókeypis viðgerð frá Sjúkrahúsverkinum til ávikavist persónar, sum búgva í Føroyum, og persónar, sum ikki búgva í Føroyum, sambært § 5 og § 6 í Sjúkrahúsverklógini. Mett verður tí, at tørvur verður á at gera eina broyting í løgtingslógini um sjúkrahúsverkið. Uppskotið verður lagt fram í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um at betra fólkaheilsuna við at minka um heilsuskaðar vegna royking, snús v.m.**
Sambært krabbameinsætlanini verður mett, at umleið 130 føroyingar doyggja árliga av sjúkum vegna royking. Harafturat síggjast støðugt fleiri skaðar á tenn og tannkjøt hjá ungum í Føroyum, ið standast av regluligari nikotinnýtslu. Gransking vísir, at daglig nýtsla av nikotinvørum kann elva til angist, tunglyndi, umframt at heilin kann taka skaða hjá ungum fólkum upp til 25 ár, har heilin ikki er liðugt mentur. Dentur verður lagdur á at: a) fyribyrgja, at børn og ung byrja at brúka tubbaks- og nikotinvørur, b) tryggja, at royking, nikotinvørur v.m. ikki eru partur av gerandisdegnum hjá teimum og c) tryggja støðugt fleiri roykfrí umhvørvi. Málið er, at ung født frá 2015 og frameftir ikki brúka tubbaks- og nikotinvørur. Uppskotið verður lagt fram í heyst.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Anordning om ikrafttrædelse af lov om ændring af lov om autorisation af sundhedspersoner og om sundhedsfaglig virksomhed og sundhedsloven"**
Virkisøkið hjá sjúkrarøktarfrøðingum verður ásett og virkisøkið hjá ljósmøðrum og tannrøktarum verður víðkað. Uppskotið hevur við sær, at bíðitíðin hjá sjúklingum at koma fram at ávísum viðgerðum kann verða stytt í teimum førum, tá ið sjúkrarøktarfrøðingar o.o. skulu bíða eftir lækna-góðkenning av løgfrøðiligum ávum, áðrenn viðgerðin kann setast í verk. Harafturat skulu læknar ikki taka støðu til viðgerðir av formligum og løgfrøðiligum ávum. Uppskotið verður lagt fram í heyst.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Anordning om ikrafttrædelse af lov om ændring af lov om autorisation af sundhedspersoner og om sundhedsfaglig virksomhed og sundhedsloven (Sundhedsfaglig autorisation af psykologer)"**
Danmark arbeiðir við at broyta autorisatiónsskipanina fyri sálarfrøðingar, soleiðis at galdandi "lov om psykologer" verður sett úr gildi. Í staðin verður ein nýggj autorisatiónsskipan sett í gildi fyri sálarfrøðingar sambært autorisatiónslógini. Hetta merkir, at Psykolognævnet, ið higartil hevur veitt bæði donskum og føroyskum sálarfrøðingum autorisatión, verður niðurlagt, og at tað í staðin verður ein nýggj autorisatiónsskipan fyri sálarfrøðingar undir Styrelsen for Patientsikkerhed. Hetta hevur eisini við sær, at sálarfrøðingar hereftir koma undir sama eftirlit sum onnur heilsustarvsfólk, ið fáa sína autorisatión frá Styrelsen for Patientsikkerhed. Uppskotið verður lagt fram í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um almenna heilsutrygd**
Stórur tørvur er á at eftirmeta heilsutrygdarlógina, nú lógin hevur virkað í meira enn 10 ár. Heilsutrygd hevur eisini ofta víst á, at tørvur er á, at lógin verður dagførd. Uppskotið verður lagt fram í vár.

**Frágreiðing til aðalorðaskifti um heilsupolitikk**
Í tráð við samgonguskjalið verður nýggjur politikkur orðaður fyri heilsuverkið og langtíðarætlanir við ítøkiligum málum og visjónum lagdar. Í hesum sambandi verður frágreiðing um heilsupolitikk løgd fram til aðalorðaskiftis. Uppskotið verður lagt fram í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í ymiskum lógum á heilsuøkinum (Myndugleikaflytingar vegna yvirtøku av málsøkjunum "tvingsil í psykiatri" og "rúsandi evni")**
Endamálið við lógaruppskotinum er formliga at yvirtaka málsøkini tvingsil í psykiatri og rúsandi evni. Við uppskotinum fáa føroyskir myndugleikar sambært lóg um mál og málsøki føroyskra myndugleika at yvirtaka lóggávuvaldið og útinnandi valdið á nevnda málsøki.

Ætlanin er at tilevna lógaruppskot um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum, umframt lógaruppskot um myndugleikaflytingar í sambandi við yvirtøku av málsøkjunum "rúsandi evni" og "tvingsil í psykiatri" við støði í álitinum um møguliga yvirtøku av uppgávunum hjá landslæknaembætinum og ávísum øðrum málsøkjum. Uppskotið verður lagt fram í vár.

**Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar "Anordning om ikrafttrædelse af lov om ændring af lov om klage- og erstatningsansvar inden for sundhedsvæsenet"**
Í Danmark er lógin broytt soleiðis, at tað nú ikki er møguligt at kæra um privatstarvandi tannlæknar til Styrelsen for Patientklager. Ætlanin er tí at dagføra føroysku lógina soleiðis, at hon samsvarar við galdandi praksis á økinum. Eisini verða gjørdar møguligar aðrar dagføringar í donsku lógini, sum væntandi eisini verða tiknar við í ríkislógartilmælið. Uppskotið verður lagt fram í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um at byggja Stenomiðstøð á Landssjúkrahúsinum**
Samsvarandi avtaluni við Novo Nordisk grunnin er ætlanin at byggja eina Steno Miðstøð á Landssjúkrahúsinum. Verkætlanin verður í løtuni fyrireikað at fara í útboð. Tá ið tilboð eru komin inn, og veruligi kostnaðurin er kendur, verður hetta nýtt sum grundarlag fyri nýggjari verklagslóg at leggja fyri Løgtingið. Uppskotið verður lagt fram í heyst.

## BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til barnalóg**
Lógin skal vera við til at stuðla upp undir rættin til betri tvørgangandi tænastur fyri børn og ung. Lógin skal virka bæði fyribyrgjandi og viðgerandi og fevna um øll børn í Føroyum. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið á vári 2026.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barnavernd**
Broytingin umfatar, at fosturforeldraskipanin verður styrkt og víðkað. Ætlanin er at endurskoða bygnað, samstarvshátt og virksemið á barnaverndarøkinum í samráð við Kommunufelagið. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið á vári 2026.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um dagstovnar og dagrøkt**
Broytingin viðvíkur m.a. skipan av menningareind og skipan av sernámsfrøðiligum tænastum. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið á vári 2026.

**Uppskot til løgtingslóg um lønarafturberingarskipan til aspirantar**
Lógin skal geva møguleika fyri lønarafturbering til reiðarí, sum rinda aspirantum løn í útbúgvingini og fáa ávísan part av lønini afturgoldna frá landinum. Talan verður um at gera uppskot til broytingarlóg til verandi løgtingslóg um útbúgving av manning umborð á skipum frá 2001 ella at gera nýggja lóg í hesum sambandi. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið á vári 2026.

**Uppskot um heimildarlóg at byggja ítróttaháskúla**
Ítróttarháskúlin hevur fingið tilsøgn frá Nordea Grunninum um fígging av helvtini av íløguni í nýggjan ítróttaháskúla í Vági. Lógin skal geva heimild til at stuðla hina helvtina av bygginigini sambært ásetingunum í háskúlalógini. Prosjekteringin skal gerast í 2026. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til broytingar í løgtingslóg um frítíðarundirvísing**
Dagføringar skulu gerast í lógini um frítíðarundirvísing, sum Landsgrannskoðanin leingi hevur víst á, at tørvur er á. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið á vári 2026.

**Uppskot til broyting í verklagslóg viðvíkjandi framhaldandi umvæling av Kampus**
Verklagslógin, sum fatar um heildarætlanina at umvæla Frælsið, skal broytast í sambandi við prosjektering av tí partinum, sum skal bjóðast út fyrst. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til broyting í verklagslóg viðvíkjandi felagsbygninginum av Kampus**
Tá ið prosjekteringin av felagsbygninginum er liðug, og útboð hevur verið, skal verklagslógin broytast, fyri at farast kann undir bygging. Uppskotið verður væntandi lagt fyri tingið í heyst.

## UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan**
Endamálið er at gera Barsilsskipanina smidligari. Uppskotið skal tryggja, at einstøku familjurnar fáa størri frælsi at leggja barsilsfarloyvið til rættis, so tað passar teimum best. Somuleiðis skal uppskotið tryggja, at sjálvstøðug vinnurekandi ikki detta niður ímillum almennar arbeiðsmarknaðarskipanirnar. Uppskotið krevur ráðlegging við partarnar á arbeiðsmarknaðinum og verður væntandi lagt fyri tingið í vár.

**Løgtingslóg um veðurlag**
Endamálið við uppskotinum er at áseta bindandi veðurlagsmál fyri Føroyar í samsvari við Parísavtaluna. Ásett verður, at útlátið av vakstrarhúsgassi skal vera netto null ár 2050, og at tíðarfestar virkisætlanir skulu gerast fimta hvørt ár, sum seta greið mál um minking 10 ár fram, og hvørji átøk skulu setast í verk fyri at fremja minkingina. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir**
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir hevur tørv á størri dagføring. Endamálið við lógarbroytingini er m.a. greitt at staðfesta, hvar planmyndugleikin liggur, greiðari at staðfesta yvirskipaða endamálið við býarskipan og byggisamtyktum, umframt at dagføringar verða gjørdar fyri smidligari mannagongdir, skynsama gagnnýtslu av lendi v.m.

Somuleiðis verða ásetingarnar, sum eftir eru í náttúrufriðingarlógini, og sum snúgva seg um lendisdisponering, settar inn í ein nýggjan kapittul í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, so at náttúrufriðingarlógin kann verða strikað. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Løgtingslóg um leigustuðul**
Endamálið við løgtingslóg um leigustuðul er at skapa javnvág í bústaðarmarknaðinum og tryggja, at eisini tey, sum ikki eiga sítt egna heim, fáa ein skattafyrimun líknandi tí, sum eigarar longu fáa. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Løgtingslóg um broyting í útleigan av bústøðum (Leigulógin)**
Leigulógin hevur verið í gildi síðan 2010, og stórar broytingar eru farnar fram á leigumarknaðinum. Lógin verður tískil dagførd soleiðis, at leigusáttmálar og innflytingarfrágreiðingar kunnu avgreiðast talgilt, umsiting av depositum verður gjørd smidligari, og reglur um mishald verða tillagaðar. Eisini verða heimildir, mannagongdir og virkisføri hjá Leigunevndini endurskoðað. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Løgtingslóg um Húsalánsgrunn**
Løgtingslóg um Húsalánsgrunn er upprunaliga karmur um ein fíggingarstovn, sum lænti pening út, men við broytingunum, sum komu í løgtingslógina í 2011, gjørdist løgtingslógin eisini karmur um eitt bústaðafelag, sum byggir, fíggjar, útvegar fígging til og rekur leigubústaðir. Tørvur er á at dagføra lóggávuna, soleiðis at viðurskifti viðvíkjandi almennari bústaðabygging og -umsiting verða nágreinað, umframt at greiðari reglur fyri húsaleiguáseting, reglur um útleigan til ávísar málbólkar o.a. verða ásettar. Eisini skal uppskotið áseta, hvørt Húsalánsgrunnurin skal vera innan fyri ella uttan fyri fíggjarlógina og landsroknskapin. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at byggja bygningar o.a. (Byggilógin)**
Tørvur er á at nágreina nøkur viðurskifti í Byggilógini. Í galdandi løgtingslóg er t.d. ikki heimild til at undantaka bygging frá kravi um skrivligt byggiloyvi. Hetta verður mett at vera óheppið, tí tað merkir, at munur ikki kann verða gjørdur á eitt nú sethúsum og smærri úthúsum. Tá ið farið verður undir at broyta løgtingslógina kortini, verða málsligar og viðkomandi innihaldsligar dagføringar gjørdar. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Løgtingslóg um verju av havumhvørvinum**
IMO-sáttmálin um upphøgging av skipum, Hong Kong sáttmálin, kom í gildi fyrr í ár, men enn hava Føroyar ikki tikið støðu til sáttmálan. Eitt uppskot til samtyktar verður lagt fyri tingið við tilmæli um at taka undir við sáttmálanum. Fyri at implementera sáttmálan verður neyðugt at dagføra ymiska lóggávu, eitt nú lógina um havumhvørvisvernd og møguliga umhvørvisverndarlógina, tí krøv skulu setast bæði skipum og góðkendum upphøggingarstøðum. Eisini skulu Føroyar boða IMO frá, hvat vit gera fyri at implementera sáttmálan við váttanum, eftirliti, eftirmeting o.a. Lógaruppskot og uppskot til samtyktar verða løgd fyri løgtingið í desember.

**Frágreiðing til løgtingið um Húsalánsgrunnin**
Løgtingið hevur heitt á Føroya landsstýri (løgtingsmál nr. 040/2024) um at leggja fyri Løgtingið frágreiðing um Húsalánsgrunnin. Frágreiðingin verður væntandi latin Løgtinginum í vár.

## LØGMÁLARÁÐIÐ

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli**
Lógaruppskotið hevur til endamáls at heimila kommunum at seta upp vakmyndatól. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fólkayvirlit**
Lógaruppskotið hevur til endamáls at tryggja ríkismyndugleikum í Føroyum atgongd til upplýsingar í Landsfólkayvirlitinum, soleiðis at ríkismyndugleikar í Føroyum kunnu brúka loysnirnar hjá Talgildu Føroyum til at veita føroyingum sínar tænastur talgilt. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Ríkislógartilmæli um broyting í rættargangslógini fyri Føroyar**
Reglulig dagføring av rættargangslógini. Umframt at fremja broytingar, sum eru neyðugar orsakað av broytingum í løgtingslógum og lógum undir donskum málsræði, so verða broytingar framdar við tí endamáli at einfalda ávísar partar av rættarganginum og at minka um viðgerðartíðina hjá dómstólunum. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Uppskot til løgtingslóg um sterilisatión og kastratión (Sterilisatiónslógin)**
Galdandi sterilisatiónslóg er frá 1967 og er í nógvar mátar ótíðarhóskandi. Nýggj løgtingslóg verður orðað við tí endamálið at dagføra og nútímansgera galdandi lóg um sterilisatión og kastratión. Samstundis verður lógin føroyskað. Uppskotið verður lagt fyri tingið í heyst.

**Broyting í Rúsdrekkalógini**
Lógaruppskotið hevur til endamáls at loyva matstovuvinnuni at keypa rúsdrekka beinleiðis úr útheimi heldur enn um Rúsdrekkasølu Landsins. Hetta verður mett ikki at hava neiliga ávirkan á nýtsluna, men kann hava nógv at siga fyri ferðavinnuna. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.

**Uppskot til løgtingslóg um krøv til arbeiðsgevarar, sum taka útlendskar arbeiðstakarar í arbeiði.**
Krøv um t.d. revsiváttan, málkunnleika og tryggingar. Uppskotið verður lagt fyri tingið í vár.